# BAHÁ'Í BØNIR

## INNIHALDSYVIRLIT

### OBLIGATORISKAR BØNIR


**STUTT OBLIGATORISK BØN -**
**MIÐAL-LONG OBLIGATORISK BØN -**
**LONG OBLIGATORISK BØN -**


### ALMENNAR BØNIR


**ANDALIGIR EGINLEIKAR -**
**ANDALIG RÁÐ -**
**BØRN OG UNG -**
**EIND -**
**FAMILJUR -**
**FYRI TEIMUM FARNU -**
**FASTLEIKI Í SÁTTMÁLANUM -**
**FRÁLÆRA -**
**FRÍGERING -**
**FUNDIR -**
**FYRIGEVING -**
**GRUNNURIN -**
**GRØÐING -**
**HJÁLP OG STUÐUL -**
**HJÚNABAND -**
**KVØLD -**
**LOVPRÍSAN OG TAKKSEMI -**
**MANNAÆTTIN -**
**MORGUN -**
**ROYNSLUR OG TRUPULLEIKAR -**
**STÓRSIGUR SAKARINNAR -**
**STØÐUFESTI -**
**VERND -**


### BØNIR TIL SERLIG HØVI

**TALVA AHMADS -**
**ELD-TALVAN -**
**TALVA HEILAGA SJÓFARANS -**
**VITJANARTALVUR -**
**INNSKOTSDAGARNIR -**
**FØSTAN -**
**NAW-RÚZ -**

**INDEX -**

# OBLIGATORISKAR BØNIR

"Tær dagligu obligatorisku bønirnar eru tríggjar í tali….Tað stendur tí trúgvandi púra frítt at velja eina av hesum trimum bønum, men hann hevur skyldu til at siga fram eina av teimum og í samsvari við tær nágreiniligu ávísingar, ið fylgja við henni." – Úr brævi, skrivað vegna Shoghi Effendi.

"Við 'morgun', 'middegi' og 'kvøldi', ið verða nevnd í sambandi við tær Obligatorisku Bønirnar, meinast ávíkavist millumbilini ímillum lýsing og middag, ímillum middag og sólsetur, og frá sólsetri til tveir tímar aftaná sólsetur." – Samandráttur og Lógasavnan av Kitáb-i-Aqdas, s. 36.

## STUTT OBLIGATORISK BØN

SKAL SIGAST FRAM EINA FERÐ UM DØGNIÐ, Á MIDDEGI

Eg vitni, O mín Guð, at Tú hevur skapað meg til at kenna Teg og til at tilbiðja Teg. Eg vitni í hesari løtu um mítt máttloysi og Tína megi, um mína fátækt og Títt ríkidømi.
Eingin annar Guð er uttan Tú, Hjálpin í Neyðini, hin Sjálv-Uppihaldandi.

Bahá'u'lláh

# MIÐAL-LONG OBLIGATORISK BØN

SKAL SIGAST FRAM DAGLIGA, Á MORGNI, Á MIDDEGI OG UM KVØLDIÐ

*Hvør tann, ið ynskir at biðja, lat hann vaska sínar hendur og ímeðan hann vaskar, lat hann siga:*

Styrk mína hond, O mín Guð, so at hon kann taka í Bók Tína við slíkum fastleika, at herskarar heimsins ikki skulu hava nakað vald yvir henni. Vara hana tá frá at fáast við nakað, ið ikki hoyrir henni til. Tú ert, sanniliga, hin Almáttugi, hin Mest Máttmikli.

*Og ímeðan hann vaskar sítt andlit, lat hann siga:*

Eg havi vent mínum andliti mótvegis Tær, O mín Harri! Lýs á tað við ljósinum frá ásjón Tínari. Vern tað tá frá at venda sær ímóti nøkrum uttan Tær.

*Lat hann síðan standa uppi og, ímeðan hann vendir sær ímóti Qiblih ( Depilin fyri Tilbiðjan, t.v.s. Bahjí, 'Akká ), lat hann siga:*

Guð vitnar um, at tað eingin annar Guð er uttan Hann. Hansara er kongsríki Opinberingar og skapanar. Hann hevur, av sonnum, manifesterað Tann, sum er Degningur Opinberingar, sum talaði á Sinai, við Hvørjum tann Hægsta Havsbrúgvin er fingin at skína og Lotustræið, handan hvørt tað ikki sleppist, hevur talað og við Hvørjum kallið er kunngjørt øllum, sum eru í himli og á jørð: "Sí, hin Alt-Eigandi er komin. Jørð og himmal, dýrd og ræði eru Guðs, Harra alra menniskjanna og Eigara av Trónuni í tí høga og av jørðini í neðra!"

*Lat hann síðan boyggja seg niður við hondunum hvílandi á knøunum og siga:*

Upphevjaður ert Tú yvir mínari lovprísan lovprísanini hjá nøkrum øðrum umframt mær, yvir mínari lýsing og lýsingini hjá øllum, sum eru í himli og øllum, sum eru á jørð!

*Síðan, standandi við opnum hondum, við lógvunum vendum ímóti andlitinum, lat hann siga:*

Vónsvík ikki, O mín Guð, hann, sum, við bønandi fingrum, hevur krøkt seg í seymin í Tínari miskunn og Tínari náði, O Tú, sum millum teirra, ið vísa miskunn, ert hin Mest Miskunnsami!

*Lat hann síðan seta seg niður og siga:*

Eg vitni um Tína eind og Tín einleika og at Tú ert Guð og, at tað eingin Guð er uttan Tú. Tú hevur, sanniliga, opinberað Tína Søk, fullgjørt Tín Sáttmála og latið upp á víðan

vegg dyrnar til Tína miskunn fyri øllum, sum búgva í himli og á jørð. Vælsignilsi og friður, kvøða og dýrd veri Tínum elskaðu, sum broytingar og tilvildir heimsins ikki hava forðað í at venda sær til Tín og, sum hava givið teirra alt, í vónini um at ogna sær tað, ið er hjá Tær. Tú ert, av sonnum, hin Æviga-Fyrigevandi, hin Mest Gávumildi.

*( Um nakar, í staðin fyri tað langa versið, heldur vil siga: "Guð vitnar, at tað er eingin Guð uttan Hann, Hjálpin í Neyðini, hin Sjálv-Uppihaldandi", so er tað nóg mikið. Og á sama hátt hevði tað eisini verið nóg mikið um hann, ímeðan hann situr, sigur hesi orð: "Eg vitni um Tína eind og tín einleika og, at Tú ert Guð og, at tað eingin Guð er uttan Tú." )*

Bahá'u'lláh

# LONG OBLIGATORISK BØN

SKAL SIGAST FRAM EINA FERÐ UM DØGNIÐ

*Tann, ið ynskir at siga fram hesa bøn, lat hann standa uppi og venda sær til Guðs og, ímeðan hann stendur har, lat hann hyggja til høgru og vinstru, sum um at hann bíðar eftir miskunn Harra síns, hins Mest Miskunnsama, hins Samkennandi. Lat hann síðan siga:*

O Tú, sum ert Harri alra navna og Skapari himlanna! Eg bøni Teg við teimum, ið eru Degningarnir av Tínum ósjónliga Kjarna, hin Mest Upphevjaði, hin Al-Dýrdarligi, um at gera mína bøn til ein eld, ið fer at brenna burtur tey slør, ið hava stongt meg úti frá Tínum fagurleika, og til eitt ljós, ið fer at leiða meg til hav Tínar Hjáverunnar.

*Lat hann síðan lyfta upp sínar hendur í bøn til Guð – vælsignaður og upphevjaður veri Hann – og siga:*

O Tú Tráan heimsins og hin Elskaði av tjóðunum! Tú sært meg venda mær mótvegis Tær og frían fyri allar bindingar til nakran uttan Teg og krøkja meg í Tín strong, við hvørs rørslu øll skapanin er fingin í røring ( stirred up ). Eg eri Tín tænari, O mín Harri, og sonur Tíns tænara. Síggj meg standa til reiðar til at fremja Tín vilja og Títt ynski og ikki ynskja nakað annað enn Tín góða tokka. Eg bøni Teg við havi Tínar miskunnar og Morgunstjørnu Tíns hásinnis um at gera við Tín tænara sum Tú vilt og sum Tær lystir. Við Tínum mátti, ið er langt omanfyri alla umrøðu og lovprísan! Alt tað, ið er opinberað av Tær, er tráan hjartans mítt og elskað av mínari sál. O Guð, mín Guð! Lít ikki at mínum vónum og gerðum, nei, lít heldur at Tínum vilja, ið hevur umfevnt himlarnar og jørðina. Við Tínum Mest Mikla Navni, O Tú Harri alra tjóða! Eg havi bara ynskt tað, ið Tú ynskti og elski bara tað, ið Tú elskar.

*Lat hann síðan falla til kníggja og leggja pannu sína ímóti jørðini og siga:*

Upphevjaður ert Tú yvir lýsingini hjá nøkrum uttan Tær Sjálvum og yvir allari fatan uttan Tínari.

*Lat hann síðan standa og siga:*

Ger mína bøn, O mín Harri, til eina keldu av livandi vatni, við hvørjum eg kann liva eins leingi og Títt fullveldi varar og kann nevna Teg í øllum Tínum heimum.

*Lat hann aftur lyfta upp sínar hendur í bøn og siga:*

O Tú, vegna skilnað frá Hvørjum hjørtu og sálir eru smeltaði og við Hvørs kærleiks eldi allur heimurin er settur í ljósan loga! Eg bøni Teg við Tínum Navni, við hvørjum Tú hevur lagt undir Teg alla skapanina, um ikki at halda aftur frá mær tað, ið er hjá Tær, O Tú, ið ræður yvir øllum menniskjum! Tú sært, O mín Harri, hendan fremmanda skunda sær til sítt mest upphevjaða heim undir trónuhimli Tínar hátignar og inná eginøki Tínar miskunnar; og hendan syndara leita eftir havi Tínar fyrigevingar; og hendan ússaliga eftir hovi Tínar dýrdar; og hendan fátæka skapning eftir orienti Tíns ríkidømis. Tín er myndugleikin til at geva boð um hvat sum helst, ið Tær lystir. Eg vitni, at Tú skalt lovprísast fyri Tínar gerðir og verða lýddur í Tínum boðum, og verða verandi óavmarkaður í Tínari fyriskipan.

*Lat hann síðan lyfta upp sínar hendur og endurtaka tríggjar ferðir hitt Størsta Navnið. Lat hann síðan boyggja seg fyri Guði – vælsignaður og upphevjaður veri Hann – við hondunum hvílandi á knøunum og siga:*

Tú sært, O mín Guð, hvussu mín andi er østur upp í øllum mínum limum í sínum longsli eftir at tilbiðja Teg og í sínari stundan eftir at minnast Teg og at lovprísa Tær; hvussu hann vitnar um tað, sum Tunga Tína Boðanna hevur vitnað um í kongsríki Tínar talunnar og í himli Tíns kunnleiks. Eg elski í hesari støðu, O mín Harri, at biðja Teg um alt tað, ið er hjá Tær, so at eg kann vísa mína fátækt og hálova Tínum gávumildi og Tínum ríkidømi og kann vátta mítt máttloysi og manifestera Títt vald og Tína styrki.

*Lat hann síðan standa uppi og lyfta sínar hendur tvær ferðir í bøn og siga:*

Eingin Guð er uttan Tú, hin Almáttugi, hin Al-Gávumildi. Tað er eingin annar Guð uttan Tú, Fyriskiparin bæði í byrjanini og í endanum. O Guð, mín Guð! Tín fyrigeving hevur givið mær mót og Tín miskunn hevur styrkt meg og Títt kall hevur vakt meg og Tín náði hevur reist meg upp og ført meg til Tín. Hvør eri eg annars, at eg skuldi vága mær at staði við portrið til bý Tíns nærleikans ella at vent mínum andliti mótvegis ljósunum, ið skína frá himli Tíns viljas? Tú sært, O mín Harri, hendan neyðarsliga skapning banka uppá Tínar náðidyr og hesa stokkuttu sál leita eftir á æviga lívsins frá Tínum gávumildu hondum. Títt er ræðið til allar tíðir, O tú, sum ert Harri alra navna; og mær fellur í lut at lata mær lynda, og at vera fúsur til at geva meg undir tín vilja, O Skapari himlanna!

*Lat hann síðan lyfta sínar hendur tríggjar ferðir og siga:*

Mætari er Guð enn nakar, ið er mætur!

*Lat hann síðan falla til kníggja og, ímeðan hann leggur pannuna ímóti jørðini, siga:*

Ov høgur ert Tú til at lovprísanin hjá teimum, ið eru Tær nær, kann náa himmal Tínar hjáverunnar ella, at hjartanna fuglar teirra, ið eru trúføst ímóti Tær, kunnu náa dyrnar í tínum portri. Eg vitni, at Tú hevur verið halgaður omanfyri allar eginleikar og heilagur yvir øllum nøvnum. Eingin Guð er uttan Tú, hin Mest Upphevjaði, hin Al-Dýrdarligi.

*Lat hann síðan seta seg niður og siga:*

Eg vitni um tað, ið allir skaptir lutir hava vitnað um og Herskarin í tí høga og íbúgvarnir í tí allarhægsta Páradísi og yvir teimum Tunga Stórfingnis sjálv frá tí al-dýrdarligu Havsbrúnni, at Tú ert Guð, at tað eingin Guð er uttan Tú og, at Hann, ið er vorðin manifesteraður, er hin Fjaldi Loyndardómur, hin Høgtmetta Ímynd, við hvørjum bókstavarnir V-E-R-Ð eru samanskoyttir og bundnir saman. Eg vitni, at tað er Hann, hvørs navn er niðurskrivað av Penni hins Mest Høga og, sum er nevndur í Bókum Guðs, Harranum á Trónuni í tí høga og á jørðini í neðra.

*Lat hann síðan standa uppreistur og siga:*

O Harri alra verunnar og Eigari alra luta, sjónligum og ósjónligum. Tú varnast míni tár og tey suffini, ið eg gevi frá mær, og eymkanina frá mínum hjarta. Við Tínum mátti! Míni misbrot hava hildið mær aftur frá at nærkast Tær; og mínar syndir hava hildið mær langt burtur frá hovi Tíns heilagleiks. Tín kærleiki, O mín Harri, hevur ríkað meg og skilnaður frá Tær hevur oyðilagt meg og fjarleiki frá Tær hevur tært meg. Eg biði Teg inniliga við Tínum fótasporum í hesari oyðimørk og við orðunum “Her eri eg. Her eri eg”, sum Tíni útvaldu hava mælt í hesum endaloysi, og við fleyrunum frá Tínari Opinbering og teimum mildu vindunum frá Degningi Tínar Manifestasjónar, um at gera av, at eg kann skoða Tín fagurleika og liva eftir øllum tí, sum er í Tínari Bók.

*Lat hann síðan endurtaka hitt Størsta Navnið tríggjar ferðir og boyggja seg við hondunum hvílandi á knøunum og siga:*

Prís veri Tær, O mín Guð, fyri at Tú hevur stuðlað mær til at minnast Teg og at lovprísa Tær og hevur gjørt meg vitandi um Hann, sum er Degningurin fyri Tínum teknum, og hevur fingið meg til at boyggja meg fyri Tínum Yvirvaldi og eyðmýkja meg sjálvan frammanfyri Tínum Guddómi og, at ásanna tað, ið er mælt av Tungu Tíns stórfingnis.

*Lat hann síðan reisa seg og siga:*

O Guð, mín Guð! Mín ryggur er boygdur av mínari syndabyrðu og mín líkasæla hevur oyðilagt meg. Tá ið eg grundi yvir mínar óndu gerðir og Tína vælvild smeltar hjartað í mær og mítt blóð kókar í mínum æðrum. Við Tínum Fagurleika, O Tú heimsins Tráan! Eg rodni við at lyfta mítt andlit ímóti Tær og mínar langtandi hendur skammast við at toyggja seg fram ímóti himli Tíns gávumildis. Tú sært, O mín Guð, hvussu míni tár forða mær í at minnast Teg og at lovsyngja Tínar dygdir, O Tú, Harrin á Trónuni í tí høga og á jørðini í neðra! Eg bøni Teg við teknunum um Títt Kongsríki og loyndardómunum í Tínum Yvirvaldi, um at gera við Tíni elskaðu sum tað sømir seg Tínum gávumildi, O Harri alra verunnar, og er vert Tína náði, O Kongur yvir tí sædda og tí ósædda!

*Lat hann síðan endurtaka hitt Størsta Navnið tríggjar ferðir og falla til kníggja, við pannuni ímóti jørðini og siga:*

Prís veri Tær, O Guð okkara, at Tú hevur sent niður til okkum tað, ið fær okkum at nærkast Tær og veitir okkum allar góðgripir, ið eru sendir niður av Tær í Tínum Bókum og Tínum Skriftum. Vern okkum, bøna vit Teg, O mín Harri, ímóti herskarunum av tómum heilaspunum og fáfongdum ímyndanum. Tú ert, av sonnum, hin Máttmikli, hin Alvitandi.

*Lat hann síðan lyfta upp høvd sítt, seta seg og siga:*

Eg vitni, O mín Guð, um tað, ið Tíni útvaldu hava vitnað um og ásanni tað, sum íbúgvarnir í tí allarhægsta Páradísi og tey, ið hava gingið í ring um Tína máttmiklu Trónu, hava ásannað. Kongsríki jarðarinnar og himmalsins eru Tíni, O Harri heimanna!

Bahá’u’lláh

# ALMENNAR BØNIR

## ANDALIGIR EGINLEIKAR

Av teimum søtt angandi streymum Tíns ævinleiks gev mær at drekka, O mín Guð, og av fruktunum á træi Tínar verunnar lat meg smakka, O mín vón! Úr teimum krystalkláru keldum Tíns kærleiks lat meg drekka, O mín Dýrd, og undir skugganum av Tínari ævigu forsjón lat meg dvøljast, O mítt Ljós! Á ongum Tíns nærleiks, í Tínari hjáveru, lat meg reika um, O mín Elskaði, og undir høgru lið á trónu Tínar miskunnar set meg, O mín Tráan! Av angandi lotum Tínar frøinnar lat eitt fleyr fara framvið mær, O mítt Mál, og til hæddirnar í páradísi Tíns veruleikas lat meg fáa atgongd, O mín Tilbidni! Eftir tónunum hjá dúgvu Tíns einleiks lat meg lurta, O Tú Glæsiligi, og við anda Tíns máttars og Tínar styrkinnar upplívga meg, O mín Uppihaldari! Í anda Tíns kærleiks halt meg

trúgvan, O mín stuðul, og á gøtu Tínar gleðinnar ger fet míni føst, O mín Skapari! Í urtagarði Tíns ódeyðiligleikas, fyri Tínari ásjón, lat meg um ævir dvøljast, O Tú sum ert miskunnsamur ímóti mær, og á sæti Tínar dýrdar set meg, O Tú sum ert mín Eigari! Til himmalin í Tínari miskunn lyft meg upp, O mín Upplívgari, og til Morgunstjørnu Tínar leiðbeiningar før meg, O Tú sum dregur meg at Tær! Frammanfyri opinberingunum av Tínum ósjónliga anda stevn mær at vera til staðar, O Tú sum ert mín Uppruni og mítt Hægsta Ynski, og til kjarnar í anga Tíns fagurleiks, ið Tú fert at manifestera, fá meg til at venda aftur, O Tú sum ert mín Guð!

Máttugur ert Tú til at gera tað, ið er Tær til vildar. Tú ert, sanniliga, hin Mest Upphevjaði, hin Al-Dýrdarligi, hin Allarhægsti.

Bahá'u'lláh

Skapa í mær eitt reint hjarta, O mín Guð, og endurnýggja eina friðfulla samvitsku innan í mær, O mín Vón! Við anda meginnar staðfest Tú meg í Tínari Søk, O mín Hægst-Elskaði, og við ljósi Tínar dýrdar opinbera fyri mær Tín veg, O Tú Mál mínar tráanar! Við megini í Tínum gøvgaða mátti lyft meg upp til himmal Tíns heilagleiks, O Kelda mínar verunnar, og við fleyrum Tíns ævinleiks gleð meg, O Tú sum ert mín Guð! Lat Tíni ævigu songløg anda frið yvir meg, O mín Felagi, og lat ríkdómar Tínar fyrndargomlu ásjónar fría meg frá øllum uttan Tær, O mín Meistari, og lat tíðindini um opinberingina av Tínum óspillandi Kjarna bera mær frøi, O Tú sum ert tann mest sjónligi av teimum sjónligu og tann mest loyndi av teimum loyndu!

Bahá'u'lláh

Hann er hin Náðiligi, hin Al-Dýrdarligi!

O Guð, mín Guð! Tín kallan hevur drigið meg at Tær og Tín Pennur Dýrdar hevur vakt meg. Streymurin av Tínari heilugu framsøgn hevur bergtikið meg og vín Tíns íblásturs hugfangað meg. Tú sært meg, O Harri, leysan av øllum uttan Tær, ímeðan eg krøki meg í strong Tíns gávumildis og brellist eftir undrum Tínar náðinnar. Eg biði Teg, við teimum ævigu bylgjum Tínar elskandi góðvildar og teimum skínandi ljósum Tínar eymu umsorganar og Tíns tokkas, um at veita tað, ið fer at draga meg nær at Tær og gera meg ríkan í Tínum ríkidømi. Mín tunga, mín pennur, øll mín vera, vitna um Tína megi, Tín mátt, Tína náði og Títt gávumildi, at Tú ert Guð og at tað eingin annar Guð er uttan Tú, hin Máttmikli, hin Mæti.

Eg beri í hesari løtu vitnisburð, O mín Guð, um mítt hjálparsloysi og Títt fullveldi, mín linleika og Tína megi. Eg veit ikki hvat gagnar mær ella skaðar meg; Tú ert, sanniliga, hin Alvitandi, hin Alvísi. Fyriskipa mær, O Harri, mín Guð og mín Meistari, tað, ið fer at fáa meg til at kenna meg nøgdan við Títt æviga boð og fer at vera

eydnuberandi fyri meg í hvørjum av Tínum heimum. Tú ert av sonnum hin Náðiligi, hin Gávumildi.

Harri! Rek meg ikki burtur frá havi Tíns ríkidømis og himli Tínar miskunnar, og fyriskipa mær tað góða í hesum heimi og hereftir. Sanniliga, Tú ert Harrin av miskunnarsessinum, sitandi á trónuni í tí hægsta; tað er eingin annar Guð uttan Tú, hin Eini, hin Alvitandi, hin Alvísi.

Bahá'u'lláh

O mín Harri! Lat Tín fagurleika vera mína føði og Tína hjáveru mín drykk og Tína fragd mína vón og lovprísan av Tær mína gerð og minning á Teg ( remembrance of Thee) mín felagi og megina í Tínum fullveldi mín stuðul og Tín bústað mítt heim og mítt tilhaldsstað ta sæti, ið Tú hevur halgað frá teimum, ið eru stongd úti frá Tær eins og av einum sløri.

Tú ert, sanniliga, hin Almáttugi, hin Al-Dýrdarligi, hin Mest Máttmikli.

Bahá'u'lláh

Lovað veri Navn Títt, O Harri mín Guð! Eg eri Tín tænari, ið hevur tikið í snór Tína eymu miskunna og krøkt seg í seym Títs gávumildis. Eg bøni Teg við Tínum navni, ið Tú hevur lagt allar skaptar lutir undir Teg við, bæði sjónligar og ósjónligar, og við hvørjum tann andadrátturin, ið er sjálvt lívið, varð blástur yvir alla skapanina, um at styrkja meg við Tínari megi, ið hevur fevnt um himlarnar og jørðina, og at verja meg frá allari sjúku og roynslu. Eg vitni, at Tú ert Harri alra navna og Fyriskiparin av øllum tí, sum Tær lystir. Tað er eingin annar Guð uttan Tú, hin Almáttugi, hin Alvitandi, hin Alvísi.

Fyriskipa Tú mær, O mín Harri, tað, ið fer at gagna mær í hvørjum av Tínum heimum. Ger meg tá út við tí, ið Tú hevur skrivað niður fyri teimum útvaldi av Tínum skapningum, sum hvørki atfinningin frá atfinnaranum ella rópini frá tí vantrúgvandi, ei heldur vinaslit teirra, ið hava tikið seg aftur frá Tær, hava forðað í at venda sær mótvegis Tær.

Tú ert, vissuliga, Hjálpin í Neyðini við megi Tíns fullveldis. Eingin Guð er uttan Tú, hin Almáttugi, hin Mest Máttmikli.

Bahá'u'lláh

O mín Guð, Guð gávumildis og miskunnar! Tú ert tann Kongur við hvørs krevjandi orði øll skapanin er skapt; og Tú ert hin Al-Gávumildi, sum gerningarnir hjá hvørs tænarum ongantíð hava forðað í at vísa Sína náði, ei heldur hava teir órógvað opinberingarnar av Hansara gávumildi.

Lat hendan tænara, bøni eg Teg, náa tað, ið er orsøkin til hansara bjarging í hvørjum av Tínum heimum. Tú ert, sanniliga, hin Almáttugi, hin Mest Máttmikli, hin Alvaldandi, hin Alvísi.

Bahá'u'lláh

Hann er hin bønahoyrandi, bønasvarandi Guð!

Við Tínari dýrd, O Elskaði, Tú sum gevur ljós til heimin! Logar skilnaðins hava tært meg og mín treiskleiki hevur smeltað mítt hjarta innan í mær. Eg biði Teg við Tínum Mest Mikla Navni, O Tú Tráan heimsins og Høgt-Elskaði mannaættarinnar, um at geva, at lot Tíns íblásturs kann styðja mínari sál, at Tín undursama Rødd kann náa mítt oyra, at míni eygu kunnu síggja Tíni tekin og Títt ljós sum tey eru opinberaði í manifestasjónunum av Tínum nøvnum og Tínum eginleikum, O Tú í hvørs taki eru allir lutir!

Tú sært, O Harri mín Guð, tárini hjá Tínum framumtiknu, ið eru feld vegna teirra skilnað frá Tær, og angistirnar hjá Tínum trúføstu í teirra fjarleika frá Tínum Heilaga Hovi. Við Tínari megi, ið vinnur á øllum lutum, sjónligum og ósjónligum! Tað sømir seg Tínum elskaðu at fella tár av blóði yvir tað, ið hevur rakt tey trúføstu frá teimum óndu og frá kúgarum jarðarinnar. Tú sært, O mín Guð, hvussu tey ógudiligu hava umringað Tínar býir og Tíni ríki! Eg biði Teg við Tínum Boðberum og Tínum útvaldu og við Honum, við Hvørjum merki Tínar guddómligu eindar er sett í jørðina millum Tínar tænarar, um at verja tey við Tínum gávumildi. Tú ert, sanniliga, hin Náðiligi, hin Al-Gávumildi.

Og, enn einaferð, biði eg Teg við teimum søtu regnskúrum Tínar náðinnar og við bylgjunum á havi Tíns tokkas, um at fyriskipa Tínum halgimennum tað, ið fer at ugga teirra eygu og troysta teirra hjørtu. Harri! Tú sært tann, ið liggur á knæ og tráleingist eftir at reisa seg upp og tæna Tær; tann deyða, ið rópar eftir ævigum lívi úr havi Tíns tokkas og brellast eftir at flúgva upp til himmal Tíns ríkidømis; tann fremmanda, ið leingist eftir sínum dýrdarheimi undir trónuhimli Tínar náðinnar; tann søkjandi, ið skundar sær við Tínari miskunn til Tínar gávumildis dyr; tann syndafulla, ið vendur sær til hav fyrigevinganna og náðinganna.

Við Tínum fullveldi, O Tú sum ert lovsungin í hjørtum menniskjunna! Eg havi vent mær til Tín, havi slept mínum egna vilja og mínum ynskjum, so at Tín heilagi vilji og Tín fragd kunnu ráða í mær og stýra mær í samsvari við tað, ið pennur Tíns æviga boðs hevur ætlað mær. Hesin tænari, O Harri, vendur sær í sínum hjálparsloysi til Himnahválv Tínar meginnar, skundar sær í sínari eyðmýking til Degning Dýrdarinnar, brellast í sínum tørvi eftir Havi Tínar Náðinnar. Eg bøni Teg við Tínum tokka og gávumildi, send hann ikki burtur.

Tú ert sanniliga hin Almáttugi, hin Náðandi, hin Samkennandi.

Bahá'u'lláh

Lovaður ert Tú, O Harri mín Guð! Eg veiti Tær takk fyri at Tú hevur skapað meg á Tínum døgum og birt í mær Tín kærleika og Tín kunnleika. Eg bøni Teg við Tínum navni, við hvørjum tær prýðiligu perlur Tíns vísdóms og Tínar talunnar vórðu bornar fram úr skattkømrunum í hjørtunum á slíkum av Tínum tænarum, ið eru Tær nær og við hvørjum Morgunstjørna Títt navns, hin Samkennandi, hevur kastað ljóma sín á øll tey, sum eru í Tínum himli og á Tínari jørð, um at veita mær, við Tínum hásinni og gávumildi, Tínar undursomu og loyndu gávur.

Hesir eru ungdómsdagarnir í mínum lívi, O mín Guð, ið Tú hevur knýtt at Tínum egnu døgum. Nú, tá ið Tú hevur veitt mær so stóran heiður, sýt mær tá ikki tað, ið Tú hevur fyriskipað Tínum útvaldu.

Eg eri, O mín Guð, einans eitt evarska lítið fræ, ið Tú hevur sáað í jørð Tíns kærleiks og hevur fingið til at spíra við hondum Tíns gávumildis. Hesum fræi leingist tískil, í innastu veru sínari, eftir vøtnum Tínar miskunnar og livandi keldu Tínar náðinnar. Send niður á tað, úr himli Tínar gávumildu góðvildar, tað, ið fer at gera tað ført fyri at blóma undir Tínum skugga og innanfyri mørk Tíns hovs. Tú ert Tann sum vatnar hjørtuni á øllum teimum, ið hava kent Teg aftur á Tínum ríviliga streymi og á kelduni til Tíni livandi vøtn.

Hálovaður veri Guð, Harri heimanna.

Bahá’u’lláh

Veit mær, O mín Guð, tað fulla mátið av Tínum kærleika og Tínari góðu fragd og við atdráttum Títt skæra ljóssins hugfanga okkara hjørtu, O Tú sum ert hin Størsti Vitnisburður og hin Al-Heiðraði. Send niður á meg, sum eitt tekin um Tína náði, Tíni lívkveikjandi lot, allan dagin og alla nátt, O Harri gávumildis.

Onga gerð havi eg gjørt, O mín Guð, at eg eigi uppiborið at síggja Títt andlit og eg veit við vissu, at um eg skuldi liva so leingi sum heimurin varir, so hevði eg ikki megnað at avrikað nakra gerð, ið var hendan tokka uppibornan, við tað, at stigið hjá einum tænara ongantíð fer at vera nóg mikið til at náa Tíni heilugu eginøki, uttan so, at títt gávumildi náddi meg og Tín eyma miskunn fylti meg og Tín elskandi blídleiki umfevndi meg.

Øll lovprísan veri Tær, O Tú umframt Hvønn tað er eingin annar Guð. Náðiliga ger meg føran fyri at rísa upp til Tín, at verða givin heiðurin at búgva í Tínum nærleika og at hava samband við Teg einsamallan. Eingin Guð er uttan Tú.

Av sonnum, um Tú ynskti at veita einum tænara vælsigning, so hevði Tú slettað úr hansara hjartaríki hvørja umrøðu ella lyndi uttan Tína Egnu umrøðu; og um Tú hevði fyriskipað einum tænara ilt vegna tað, ið hansara hendur órættvíst hava framt fyri Tínum andliti, so hevði Tú roynt hann við fyrimunum hendan heims og hins næsta, so at hann kundi gjørst upptikin av teimum og gloymt minningina um Teg.

Báb

O Guð! Endurnýggja og gleð mín anda. Reinska mítt hjarta. Upplýs mínar kreftir. Eg leggi øll míni mál í Tínar hendur. Tú ert mín Leiðbeinari og mítt Skjól. Eg vil ikki longur vera sorgarbundin og niðurboygdur, eg vil vera eydnusælur og fróur. O Guð! Eg vil ikki longur vera fullur av ampa, ei heldur vil eg lata trupulleikar plága meg. Eg vil ikki dvølja á lívsins óhugaligu lutum.

O Guð! Tú ert betri vinur við meg enn eg eri við meg sjálvan. Eg vígi meg Tær, O Harri.

‘Abdu’l-Bahá

O mín Guð! O mín Guð! Dýrd veri Tær fyri tað at Tú hevur staðfest meg til at játta Tín einleika, drigið meg at orði Tíns stakleiks, tendrað meg við eldi Tíns kærleiks og gjørt meg upptiknan av Tínari umrøðu og av tænastuni av Tínum vinum og ternum.

O Harri, hjálp mær at vera spaklyntur og lítillátin, og styrk meg í at loysa meg frá øllum lutum og at halda í seyminum í klæði Tínar dýrdar, so at mítt hjarta kann verða fylt við Tínum kærleika og ikki lata nakað rúm vera eftir til kærleika fyri heiminum og binding at hansara góðskum.

O Guð! Halga meg frá øllum øðrum uttan Tær, reinsa meg fyri rusl syndarinnar og brotsins, og fá meg til at eiga eitt andaligt hjarta og eina andaliga samvitsku.

Sanniliga, Tú ert miskunnsamur og, sanniliga, Tú ert hin Mest Hásinnaði, Hvørs hjálp øll sóknast eftir.

‘Abdu’l-Bahá

O mín Harri! O mín Harri! Hetta er ein lampa, ið er tendrað við eldi Tíns kærleiks og glógvar við loganum, ið er kyndur í træ Tínar miskunnar. O mín Harri! Ger størri hansara kveiking, hita og loga við tí eldi, ið er kyndur á Sinai Tínar Manifestasjónar. Sanniliga, Tú ert Staðfestarin, Styðjarin, hin Máttmikli, hin Hásinnaði, hin Elskandi.

‘Abdu’l-Bahá

O mín Guð! O mín Guð! Hesin Tín tænari hevur tikið seg fram ímóti Tær, reikar ovurhugaður um í oyðimørk Tíns kærleiks, gongur eftir gøtu Tínar tænastunnar, ímeðan hann væntar sær Tín tokka, vónar sær Títt gávumildi, lítur á Títt kongsríki og er drukkin

av víni Tínar gávunnar. O mín Guð! Ger størri hitan í hansara alski fyri Tær, støðugleikan í hansara lovprísan av Tær og eldhugan í hansara kærleika fyri Tær.

Sanniliga, Tú ert hin Mest Hásinnaði, Harrin av ovurstórari ( abounding ) náði. Tað er eingin annar Guð uttan Tú, hin Fyrigevandi, hin Miskunnsam

‘Abdu’l-Bahá

O Guð, mín Guð! Hetta er Tín ljómandi tænari, Tín andaligi trælur, ið hevur nærkast tær og er komin nær at Tínari hjáveru. Hann hevur vent sínum andliti ímóti Tínum, viðurkent Tín einleika, játtað Tín stakleika og hann hevur rópt í Tínum navni millum tjóðirnar og ført fólkið til tey streymandi vøtn Tínar miskunnar, O Tú mest hásinnaði Harri! Teimum, ið hava biðið um tað, hevur hann givið at drekka av bikari leiðbeiningar, ið flýtur yvir við víni Tínar óendaligu náðinnar.

O Harri, hjálp honum undir øllum umstøðum, fá hann til at læra seg Tínar vælvardu loyndardómar og lat regna niður á hann Tínar loyndu perlur. Ger hann til eitt merki, ið veitrar frá borgartindum í vindum Tínar himmalsku hjálpar, ger hann til eina keldu av krystalklárum vøtnum.

O mín fyrigevandi Harri! Lýs upp hjørtuni við geislunum frá einari lampu, ið kastar frá sær víða um sínar strálir og avdúkar fyri teimum av Tínum fólki, ið Tú hevur so ríviliga givið framíhjárættindi, veruleikarnar hjá øllum lutum.

Sanniliga, Tú ert hin Mæti, hin Máttmikli, Verjin, hin Sterki, hin Góðgerandi! Sanniliga, Tú ert Harri alra miskunna!

‘Abdu’l-Bahá

O Guð, mín Guð! Hesir eru Tínir veiku tænarar; teir eru Tínir trúføstu trælir og Tínar ternur, ið hava boygt seg niður frammanfyri Tínari upphevjaðu Talu og eyðmýkt seg sjálvi við Tína Gátt av ljósi, og borið vitnisburð um Tín einleika, sum Sólin er fingin at skína í middagsljóma við. Tey hava lurtað eftir teimum stevnuboðum, ið Tú hevur givið úr Tínum loynda Ríki, og við hjørtum, ið skelva av kærleika og eldhuga, hava tey svarað Tínum kalli.

O Harri, oys tey undir í øllum úthellingunum av Tínari miskunn, lat regna niður á tey øll vøtnini av Tínari náði. Fá tey at vaksa eins og vakrar plantur í urtagarði himmalsins og úr teimum fullu og stúgvaðu skýggjum Tínar veitingar og úr teimum djúpu hyljum Tínar ovurstóru ( abounding ) náðinnar fá Tú hendan urtagarð til at blóma og lat hann altíð verða verandi grønan og ljómandi, altíð frískan og glitrandi og vakran.

Tú ert, sanniliga, hin Mæti, hin Upphevjaði, hin Máttmikli, Hann sum einsamallur, í himlunum og á jørð, verður verandi óbroyttur. Tað er eingin annar Guð uttan Tú, Harrin av týðiligum prógvum og teknum.

'Abdu'l-Bahá

Hann er Guð!

O Guð, mín Guð! Hesir eru tænarar, sum á Tínum døgum eru drignir at angunum av Tínum heilagleika, eru kveiktir av loganum, sum brennur í Tínum heilaga træi, svara aftur Tínari rødd, framsiga Tína lovprísan, eru vaktir av Tínum loti, kvaklaðir av Tínum søtu angum, teir skoða Tíni tekin, skilja Tíni vers, lurta eftir Tínum orðum, trúgva á Tína Opinbering og eru vissaðir um Tína elskandi góðvild. Teirra eygu, O Harri, eru fest á Títt kongsríki av strálandi dýrd og teirra andlit vend ímóti Tínum yvirræði í tí høga, teirra hjørtu banka av kærleikanum fyri Tínum geislandi og dýrdarliga fagurleika, teirra sálir tærdar av loga Tíns kærleiks, O Harri av hesum heimi og tí komandi heimi, teirra lív kókar av hitanum í teirra longsli eftir tær og teirra tár streyma niður fyri Tína skuld.

Líva teimum í skansa Tínar verjunnar og Tínar trygdar, varðveit teir í Tínari eftiransnu umsorgan, lít at teimum við eygum Tínar forsjónar og miskunnar, ger teir til tekin Tínar guddómligu eindar, sum eru opinber um allar leiðir, merki Tíns máttarins, ið veitra omanfyri Tínum borgum stórfingnis, tær skínandi lampur, ið brenna við olju Tíns vísdóms í kúpu Tínar leiðbeiningar, fuglar í urtagarði Tíns kunnleiks, ið syngja á teimum ovastu greinunum í Tínum skýlandi páradísi og drekar í Tínum havi gávumildis, ið kava við Tínari størst miskunn niður í tey botnleysu dýpuni.

O Harri, mín Guð! Eyðmjúkir eru hesir tænarir Tínir, upphevja teir í Tínum kongsríki í tí høga; veikir, styrk teir við Tínari strkastu megi; mannminkaðir, veit teimum Tína dýrd í Tínum allarhægsta ríki; fátækir, ríka teir í Tínum mikla yvirræði. Fyriskipa Tú teimum alt tað góða, ið Tú hevur ætlað í Tínum heimum, sjónligum og ósjónligum, gev teimum framgongd í hesum heimi í neðra, gleð teirra hjørtu við Tínum íblástri, O Harri yvir øllum verum! Upplýs teirra hjørtu við Tínum fróu tíðindum, ið verða breidd út frá Tínum al-dýrdarliga tignarstigi, ger føst teirra fet í Tínum Mest Mikla Sáttmála og styrk teirra lendar í Tínum fasta Testamenti við Tínum gávumildi og fyrijáttaðu náði, O Tú Náðiligi og Miskunnsami! Tú ert, sanniliga, hin Náðiligi, hin Al-Gávumildi.

'Abdu'l-Bahá

O Tú Uppihaldari! Tú hevur andað yvir vinirnar í Vesturi hin søta anga Heilaga Andans, og við ljósi guddómligu leiðbeiningar hevur Tú lýst upp himmalin vestanfyri. Tú hevur fingið tey, ið einaferð vóru fjar, til at nærkast Tær; Tú hevur gjørt fremmandafólk til kærar vinir; Tú hevur vakt tey, ið svóvu; Tú hevur gjørt tann líkasæla umhugsnan.

O Tú Uppihaldari! Hjálp Tú hesum gøvigu vinum at vinna Tín tokka og ger teir til vælvildarfólk mótvegis fremmandum og vinum í sama mun. Før teir inn í tann heimin, sum varir í ævir; gev teimum ein part av himmalskari náði; fá teir at gerast sannar Bahá'íar, ið eru veruliga av Guði; bjarga teimum frá útvortis kávalæti og grundfest teir væl í Tínum sannleika. Ger teir til tekin og prógv um Kongsríkið, lýsandi stjørnur

omanfyri havsbrúnni í hesum niðara lívi. Fá teir at gerast eina troyst og ein ugga fyri mannaættini og tænarar av friði heimsins. Gleð teir við víninum í Tínum ráðum og gev, at teir allir kunnu ganga gøtu Tíni boðs.

O Tú Uppihaldari! Tað kærasta ynskið hjá hesum tænara av Gátt Tínari er at síggja vinirnar í Eysturi og Vesturi í tættari fevning ( close embrace ); at síggja allar limir menniskjasamfelagsins savnaðar við kærleika í einari einstakari miklari samkomu, eins og stakir dropar av vatni savnaðir saman í einum mætum sjógvi; at síggja teir allar sum fuglar í einum urtagarði av rósum, sum perlur úr sama havi, sum bløð av sama træi, sum geislar frá somu sól.

Tú ert hin Mæti, hin Máttmikli, og Tú ert Guð styrkinnar, hin Alvaldandi, hin Al-Síggjandi.

‘Abdu’l-Bahá

## ANDALIG RÁÐ

*Nær sum helst tá ið tit fara inn í ráðshølið, biðið hesa bøn við einum hjarta, ið bankar av kærleika fyri Guði og við einari tungu, ið er reinsað frá øllum uttan Hansara minning, so at hin Al-Máttmikli náðiliga kann hjálpa tykkum at vinna avgerandi sigur.*

O Guð, mín Guð! Vit eru Tínir tænarar, ið hava vent sær við kærleika ímóti Tínum Heilaga Andliti, ið hava loyst seg frá øllum uttan Tær á hesum ljómandi Degi. Vit eru komin saman í hesum Andaliga Ráði, sameind í okkara sjónarmiðum og hugsanum, við okkara ætlanum í samljóði fyri at upphevja Títt Orð millum menniskjuni. O Harri, okkara Guð! Ger okkum til teknini um Tína Guddómligu Leiðbeining, Merkini fyri Tínari upphevjaðu Trúgv millum menniskju, tænarar av Tínum mæta Sáttmála, O Tú okkara Harri Mest Høgi, manifestasjónir av Tínari Guddómligu Eind í Tínum Abhá-Kongsríki og ljómandi stjørnur, ið skína á allar leiðir. Harri! Hjálp okkum at gerast høv, ið alda við bylgjum Tínar undursomu Náðinnar, streymar, ið renna frá Tínum al-heiðurligu Hæddum, góðar fruktir á Træi Tínar himmalsku Sakar, trø, ið alda við lotum Títs gávumildis í Tínum himmalska Víngarði. O Guð! Ger okkara sálir bundnar av Versum Tínar Guddómligu Eindar, okkara hjørtu fegin við úthellingunum av Tínari Náði, so at vit kunnu sameinast eins og bylgjurnar á einum havi og ganga saman eins og geislarnir frá Tínum strálandi Ljósi; so at okkara hugsanir, okkara sjónarmið, okkara kenslur kunnu gerast eins og ein veruleiki, ið manifesterar anda felagskapsins um allan heim. Tú ert hin Náðiligi, hin Gávumildi, Veitarin, hin Almáttugi, hin Miskunnsami, hin Samkennandi.

‘Abdu’l-Bahá

*Komið tit saman í reinari gleði og í byrjanini á fundinum lesið upp hesa bøn:*

O Tú Harri kongsríkisins! Hóast at okkara likam eru savnaði saman her, so hava okkara rúnabundnu hjørtu kortini mist seg sjálvi burtur ( been carried away ) í Tínum kærleika, og kortini eru vit hugfangaði av geislunum frá Tínum ljómandi andliti. Hóast at vit eru veik bíða vit kortini eftir opinberingunum av Tínum mátti og Tínari megi. Hóast vit eru fátøk, við hvørki góðsi ella fæi, so taka vit kortini ríkidømi úr dýrgripum Tíns Kongsríkis. Hóast at vit eru dropar, so draga vit kortini úr Tínum havdýpum. Hóast at vit eru rusk, so glampa vit kortini í dýrdini hjá Tínari stórfingnu Sól.

O Tú okkara Uppihaldari! Send niður Tína hjálp, so at hvør einstakur her kann gerast eitt tendrað ljós, hvør einstakur ein atdráttardepil, hvør einstakur ein kallari til Tíni himmalsku ríki, til at vit at enda gera hesa niðaru verð til spegilsmyndina av Tínum Páradísi.

‘Abdu’l-Bahá

*Bøn, ið skal sigast tá ið fundurin í tí Andaliga Ráðnum er endaður.*

O Guð! O Guð! Úr tí ósædda kongsríki Tíns einleiks síggj okkum savnaði á hesum andaliga fundi, ímeðan vit trúgva á Teg, eru vís í Tínum teknum, føst í Tínum Sáttmála og Testamenti, drigin at Tær, gløða av eldi Tíns kærleiks og sonn í Tínari Søk. Vit eru tænarar í Tínum víngarði, útbreiðarar av Tínari trúgv, trúfastir tilbiðjarar av Tínari ásjón, eyðmjúk mótvegis Tínum elskaðu, undirbrotlig frammanfyri Tínum durðum, og bøna Teg um at staðfesta okkum í at tæna Tínum útvaldu, at stuðla okkum við Tínum ósæddu herskarum, at styrkja okkara lendar í Tínari tænastu og at gera okkum til lýdnar og elskandi tegnar, ið samtala við Teg.

O okkara Harri! Vit eru veik og Tú ert hin Mæti, hin Máttmikli. Vit eru lívleys og Tú ert hin mikli lívgevandi Andin. Vit eru tørvandi og Tú ert Uppihaldarin, hin Máttmikli.

O okkara Harri! Vend okkara andlitum ímóti Tínari miskunnsomu ásjón, gev okkum at eta frá Tínum himmalska borði við Tínari ríkiligu náði, hjálp okkum við herskarunum av Tínum hægstu einglum og staðfest okkum við teimum heilugu í Abhá-Kongsríkinum.

Sanniliga, Tú ert hin hásinnaði, hin Miskunnsami. Tú ert Eigarin av miklum gávumildi og, sanniliga, Tú ert hin Mildi og hin Náðiligi.

‘Abdu’l-Bahá

# BØRN OG UNG

Prísaður veri Tú, O Harri mín Guð! Náðiliga gev, at hesin nýføðingur kann fáa at súgva av brósti Tínar mildu miskunnar og alsknu forsjónar og verða stimbrað við fruktini av

Tínum himmalsku trøum. Lat hann ikki koma í varðveitsluna hjá nøkrum uttan Tær, við tað at Tú Sjálvur, við máttinum í Tínum hægsta vilja og Tínari megi, skapti og kallaði hann fram til lívið. Tað er eingin annar Guð uttan Tú, hin Almáttugi, hin Alvitandi.

Lovaður ert Tú, O mín Hægst Elskaði, rek yvir hann teir søtu roykar av tínum gøvgaða gávumildi og angarnar av Tínum heilugu veitingum. Ger hann tá føran fyri at leita sær lívd undir skugganum av Tínum mest upphevjaða Navni, O Tú sum heldur í Tínum taki Kongsríki navnanna og eginleikanna. Sanniliga, Tú ert mentur at gera tað, ið Tú vilt og Tú ert vissuliga hin Mæti, hin Upphevjaði, hin Æviga-Fyrigevandi, hin Náðiligi, hin Gávumildi, hin Miskunnsami.

Bahá'u'lláh

O Tú makaleysi Harri! Lat hetta bróstabarn fáa at súgva úr brósti Tínar alsknu umsorganar, líva tað í vøggu Tínar trygdar og verjunnar og gev, at tað kann vaksa upp í ørmum Tíns eyma kærleiks

'Abdu'l-Bahá

O Guð! Al upp hetta lítla barn í fangi Tíns kærleiks og gev tí mjólk úr brósti Tínar Forsjónar. Dyrka hesa ungu plantu í rósugarði Tíns kærleiks og hjálp henni at vaksa við regnskúri Tíns gávumildis. Ger hetta til eitt barn av kongsríkinum og leið tað til Títt himmalska ríki. Tú ert máttmikil og góður og Tú ert Gevarin, hin Gávumildi, Harrin av framúrskarandi stórtøkni.

'Abdu'l-Bahá

O Guð! Lær upp hesi børn. Hesi børn eru planturnar í Tínum fruktgarði, blómurnar á Tínari ong, rósurnar í Tínum urtagarði. Lat Títt regn falla á tey; lat Veruleikans Sól skína á tey við Tínum kærleika. Lat Títt lot kveikja tey, so at tey kunnu verða uppvand, kunnu vaksa og mennast og sýnast í tí størsta vakurleikanum. Tú ert Gevarin. Tú ert hin Samkennandi.

'Abdu'l-Bahá

O Tú góði Harri! Hesi elskuligu børn eru handverkið hjá fingrum Tíns máttsins og undursomu tekin Tíns stórleiks. O Guð! Líva hesum børnum, hjálp teimum náðiliga at

verða upplærd og ger tey før fyri at veita heimi mannaættarinnar sína tænastu. O Guð! Hesi børn eru perlur, lat tey fostrast upp í skel Tíns kærleiks.

Tú ert hin Gávumildi, hin Al-Elskandi.

‘Abdu’l-Bahá

O Harri! Ger hesi børn til frálíkar plantur. Lat tey vaksa og mennast í Urtagarði Tíns Sáttmála og veit frískleika og vakurleika við úthellingunum úr skýggjum Abhá-Kongsríkisins.

O Tú góði Harri! Eg eri eitt lítið barn, upphevja meg við at geva mær atgongd inn í kongsríkið. Eg eri jørðiskur, ger meg himmalskan; eg eri av heiminum í neðra, lat meg hoyra heima í ríkinum omanfyri; dapur í huga, lat meg gerast geislandi; likamligur, ger meg andaligan og gev, at eg kann vísa Tínar óendaligu gávur.

Tú ert hin Máttmikli, hin Al-Elskandi.

‘Abdu’l-Bahá

# EIND

O mín Guð, O mín Guð! Sameina hjørtuni hjá Tínum tænarum og opinbera fyri teimum Títt mikla endamál. Máttu teir fylgt Tínum boðum og gjørt eftir Tínari lóg. Hjálp teimum, O Guð, í teirra stremban og gev teimum styrki til at tæna Tær. O Guð! Lat teir ikki til sín sjálvs, men leið teirra fótafet við ljósi Tíns kunnleiks og lívga teirra hjørtu við Tínum kærleika. Sanniliga, Tú ert teirra Hjálpari og teirra Harri.

Bahá’u’lláh

O mín Guð! O mín Guð! Sanniliga ákalli eg Teg og bøni frammanfyri Tínari gátt, ímeðan eg biði Teg um at allar Tínar miskunnir kunnu dala niður á hesar sálir. Ger tey serstøk til Tín tokka og Tín sannleika.

O Harri! Sameina og bind saman hjørtuni, fá allar sálirnar til at semjast og gleð andarnar við teknum Tíns heilagleiks og einleiks. O Harri! Ger hesi andlit strálandi við ljósi Tíns einleiks. Styrk lendarnar hjá Tínum tænarum í tænastuni av Tínum kongsríki.

O Harri, Tú, sum eigur óendaliga miskunn! O Harri fyrigevingar og náðingar! Fyrigev okkara syndir, ber yvir við okkara ófullkomleikum og fá okkum til at venda okkum til kongsríki Títt miskunnsemis, ímeðan vit ákalla kongsríki máttsins og meginnar, eyðmjúk við Tín halgidóm og eftirgevin frammanfyri dýrdini í Tínum prógvum.

O Harri Guð! Ger okkum eins og bylgjur á havinum, blómur í urtagarðinum, sameind, samd gjøgnum gávur Tíns kærleiks. O Harri! Spíla út barmarnar ( dilate the breasts ) við teknum Tíns einleiks og ger alla mannaættina eins og stjørnur, ið skína úr somu hædd dýrdarinnar, eins og fullkomnar fruktir, ið vaksa á Tínum træi lívsins.

Sanniliga, Tú ert hin Almáttugi, hin Sjálv-Uppihaldandi, Gevarin, hin Fyrigevandi, Náðarin, hin Alvitandi, hin Eini Skaparin.

'Abdu'l-Bahá

## FAMILJUR

Dýrd veri Tær, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg um at fyrigeva mær og teimum, ið stuðla Tínari Trúgv. Sanniliga, Tú ert hin ovasti Harrin, Fyrigevarin, hin Mest Gávumildi. O mín Guð! Ger teir tænarar Tínar, ið eru uttan kunnleika, førar fyri at sleppa inn í Søk Tína; tí at so skjótt sum teir vita av Tær fara teir at bera vitnisburð um sannleika Dómadagsins og fara ikki at ivast í opinberingunum av Tínum gávumildi. Send niður til teir teknini um Tína náði og gev teimum, hvar teir so enn eru, ein stórtøknan part av tí, sum Tú hevur fyriskipað teimum frómu av Tínum tænarum. Tú ert av sonnum hin Ovasti Valdsharrin, hin Al-Gávumildi, hin Mest Vælviljandi.

O mín Guð! Lat úthellingarnar av Tínum gávumildi og vælsignilsum dala niður á tey heim hvørs limir hava tikið við Tínari Trúgv, sum eitt tekin um Tína náði og eitt eyðkenni fyri miskunn frá Tínari hjáveru. Sanniliga, einskilaður ert Tú til at veita fyrigeving. Hevði Títt gávumildi verið hildið aftur frá nøkrum, hvussu kundi hann verið taldur millum fylgjarnar av Trúnni á Tínum Degi?

Vælsigna meg, O mín Guð, og tey, ið vilja trúgva á Tíni tekin á tí ásetta Degi, og slík, ið bera mín kærleika í teirra hjørtum – ein kærleika, sum Tú gróðursetur í tey. Sanniliga, Tú ert Harri rættlætisins, hin Mest Upphevjaði.

Báb

Eg biði um Tína fyrigeving, O mín Guð, og bøni um náði á tann hátt, ið Tú ynskir at Tínir tænarar skulu venda sær til Tín. Eg biði Teg um at vaska burtur okkara syndir soleiðis sum tað sømir seg Tínum ræði og, at fyrigeva mær, mínum foreldrum og teimum, sum eftir Tínari meting eru komin inn í bústað Tíns kærleiks á einn hátt, sum er verdur Títt gøvgaða yvirræði og væl sømir seg dýrdini hjá Tínari himmalsku megi.

O mín Guð! Tú hevur íblást mína sál til at bera fram sína inniligu bøn til Tín og um tað ikki var vegna Teg, so vildi eg ikki álla Teg. Lovaður og prísaður ert Tú; eg veiti Tær prís við tað, at Tú opinberaði Teg Sjálvan fyri mær og eg biði Teg um at fyrigeva mær, av tí at eg ikki havi lúkað mína skyldu at kenna Teg og ikki havi megnað at ganga eftir gøtu Tíns kærleiks.

Báb

O Harri! Í hesari Mest Miklu Trúarskipan góðtekur Tú forbønina hjá børnum vegna teirra foreldur. Hetta er ein av teimum serligu óendaligu veitingunum í hesari Trúarskipan. Góðtak tí, O Tú góði Harri, umbønina hjá hesum Tínum tænara við Gátt Tíns einleiks og søkk faðir hansara niður í hav Tínar náðinnar, av tí at hesin sonur hevur reist seg fyri at gera Tær tænastu og kýtir seg til allar tíðir á gøtu Tíns kærleiks. Sanniliga, Tú ert Gevarin, Fyrigevarin og hin Blíði!

‘Abdu’l-Bahá

O Guð, mín Guð! Hendan terna Tín kallar á Teg, hon lítur á Teg og vendir andliti sínum ímóti Tær ímeðan hon bønar Teg um, at veita henni Tínar himmalsku gávur og at avdúka fyri henni Tínar andaligu loyndardómar og at kasta á hana ljósini frá Tínum Guddómi.

O mín Harri! Fá eyguni hjá manni mínum at síggja. Gleð Tú hansara hjarta við ljósinum í kunnleikanum um Teg, drag Tú huga hansara til Tín lýsandi fagurleika, stimbra Tú hansara anda við at opinbera fyri honum Tínar kláru glampar.

O mín Harri! Lyft Tú slørið frá sjón hansara. Lat regna niður Tínar ríviligu gávur á hann, rúsa hann við tí víni, sum er kærleikin fyri Tær, ger hann til ein av Tínum einglum hvørs føtur ganga á hesari jørð ímeðan teirra sálir sveima gjøgnum teir høgu himlarnar. Fá hann at gerast ein ljómandi lampa, sum skínur við ljósi Tíns vísdóms mitt ímillum Títt fólk.

Sanniliga, Tú ert hin Dýrabari, hin Æviga-Veitandi, hin Leysi á Hondini.

‘Abdu’l-Bahá

Mín Harri! Mín Harri! Eg prísi Tær og eg takki Tær fyri tað, ið Tú hevur víst hesari eyðmjúku ternu Tín tokka við, Tínari trælkonu, ið bønar og biður Teg, av tí at Tú sanniliga hevur leitt hana til Títt eyðsýna Kongsríki og fingið hana til at hoyra Títt upphevjaða Kall í tí treytaða heiminum og til at síggja Tíni Tekin, ið prógva framkomuna av Tínum sigrandi ræði yvir øllum lutum.

O mín Harri, eg ogni Tær tað, ið er í mínari lívmóðir. Fá tað tá at gerast eitt prísvert barn í Tínum kongsríki og eitt eydnuríkt barn við Tínum tokka og Tínum gávumildi; at mennast og vaksa upp undir ábyrgd Tínar uppvenjingar. Anniliga, Tú ert hin Náðiligi! Sanniligi, Tú ert Harrin av Stórum Tokka!

‘Abdu’l-Bahá

## FYRI TEIMUM FARNU

( Bønin fyri teimum Farnu skal brúkast fyri Bahá’íar yvir fimtan ára aldur. “Hetta er tann einasta obligatoriska Bahá’í-bønin, ið skal sigast fram í samkomu; hon skal sigast fram av einum trúgvandi ímeðan øll tey hjástøddu standa uppi. Tað er einki krav um, at venda sær ímóti Qiblih, tá ið bønin verður sagd fram.” – *Samandráttur og Lógasavnan av Kitáb-i-Aqdas )*

O mín Guð! Hetta er Tín tænari og sonur Tíns tænara, ið hevur trúð á Teg og á Tíni tekin og vent andliti sínum mótvegis Tær, fullkomiliga leysur av øllum uttan Tær. Tú ert, sanniliga, av teimum, ið vísa miskunn, hin mest miskunnsami.

Ger við hann, O Tú sum fyrigevur syndirnar hjá menniskjum og fjalir teirra lýti, sum tað sømir seg himli Tíns gávumildis og havi Tínar náðinnar. Gev honum atgongu inná eginøki Tínar gøvgaðu miskunnar, ið var til áðrenn jørð og himmal vóru til. Tað er eingin Guð uttan Tú, hin Æviga-Fyrigevandi, hin Mest Gávumildi.

*Lat hann síðan endurtaka seks ferðir kvøðuna “Alláh-u-Abhá” og síðan endurtaka nítjan ferðir hvørt av teimum fylgjandi versum:*

Vit tilbiðja øll, sanniliga, Guð.
Vit boyggja okkum øll, sanniliga, fyri Guði.
Vit eru øll, sanniliga, trúgv ímóti Guði.
Vit geva øll, sanniliga, Guði prís.
Vit veita øll, sanniliga, Guði tøkk.
Vit eru øll, sanniliga, tolin í Guði.

*( Um tann deyði er eitt konufólk, lat hann siga: Hetta er Tín terna og dóttur Tína ternu, o.s.f.... )*

Bahá’u’lláh

Dýrd veri Tær, O Harri mín Guð! Eyðmýk ikki hann, ið Tú hevur upphevjað við megini í Tínum æviga yvirræði og tak hann ikki langt burtur frá Tær, ið Tú hevur fingið til at fara inn í tabernakul Tíns ævinleiks. Vilt Tú reka burtur hann, O mín Guð, ið Tú hevur yvirskuggað við Tínum valdi og vilt Tú venda burtur frá Tær hann, O mín Tráan, ið Tú hevur verið eitt skjól hjá? Kanst Tú lækka hann, ið Tú hevur lyft upp, ella gloyma hann, ið Tú hevur gjørt føran fyri at minnast Teg?

Hálovaður, ómetaliga hálovaður ert Tú! Tú ert Hann, sum úr ævigari tíð hevur verið Kongur yvir allari skapanini og Aðalkraft hennara og Tú fert í ævigar tíðir at verða verandi Harrin yvir øllum skaptum lutum og Fyriskipari teirra. Hálovaður ert Tú, O mín Guð! Um Tú heldur uppat við at vera miskunnsamur mótvegis Tínum tænarum, hvør skal so vísa teimum miskunn; og um Tú sýtur fyri at hjálpa Tínum elskaðu, hvør er so, ið kann hjálpa teimum?

Hálovaður, ómetaliga hálovaður ert Tú! Tú ert inniliga elskaður í Tínum sannleika og Teg tilbiðja vit, sanniliga, øll; og Tú ert eyðsýnur í Tínum rættvísi og um Teg vitna vit, sanniliga, øll. Tú ert, av sonnum, elskaður í Tínari náði. Eingin Guð er uttan Tú, Hjálpin í Neyðini, hin Sjálv-Uppihaldandi.

Bahá'u'lláh

Hann er Guð, upphevjaður er Hann, Harri miskunnar og gávumildis!

Dýrd veri Tær, Tú, O mín Guð, Alvaldandi Harri. Eg vitni um Títt alvald og Tín mátt, Títt yvirræði og Tína miskunn, Tína náði og Tína megi, einleika Tínar Verunnar og eind Tíns kjarnas, Tín heilagleika og Tína upphevjan yvir heimi verunnar og øllum, sum er í honum.

O mín Guð! Tú sært meg leysan av øllum uttan Tær, halda fast í Tær og venda mær ímóti havi Tíns gávumildis, himli Tíns tokkas, Morgunstjørnu Tínar náðinnar.

Harri! Eg vitni, at í Tínum tænara hevur Tú lagt Títt Álit, sum er tann Andin, sum Tú hevur givið heiminum lív við.

Eg biði Teg við glampanum av himinknøtti Tínar Opinberingar, um miskunnsamt at góðtaka frá honum tað, ið hann hevur útinnt á Tínum døgum. Gev tá, at hann kann verða búgvaður út við dýrd Tínar góðu fragdar og prýddur við Tínari viðurkenning.

O mín Harri! Eg sjálvur og allir skaptir lutir vitna um Tín mátt og eg biði Teg um ikki at vísa frá Tær hendan anda, ið er risin upp til Tín, til Títt himmalska stað, Títt upphevjaða Páradís og Tíni friðskjól nærleikans, O Tú sum ert Harri yvir øllum menniskjum!

Gev tá, O mín Guð, at Tínir tænarar kunnu koma saman við Tínum útvaldu, Tínum halgimennum og Tínum Boðberum í himmalskum støðum, ið pennur ikki kann bera boð um ella tunga greiða frá.

O mín Harri, tann fátæki hevur sanniliga skundað sær til Kongsríki Títt ríkidømis, tann fremmandi til sítt heim inni á Tínum eginøkjum, tann tysti til himmalsku á Tíns gávumildis. Lat hann ikki, O Harri, vera uttan sín part av veitsluborði Tínar náðinnar og tokka Tíns gávumildis. Tú ert av sonnum hin Almáttugi, hin Náðiligi, hin Al-Gávumildi.

O mín Guð, Títt Álit er vent aftur til Tín. Tað sømir seg Tínari náði og Tínum gávumildi, ið hava fevnt um Tíni ríki á jørð og í himli, at geva hesum nýliga vælkomna Tíns Tínar gávur og veitingar og fruktirnar av Tínum náðitræi! Máttmikil ert Tú til at gera sum Tú vilt, tað er eingin Guð uttan Tú, hin Náðiligi, hin Mest Gávumildi, hin Samkennandi, hin Veitandi, hin Fyrigevandi, hin Dýrabari, hin Alvitandi.

Eg vitni, O mín Harri, at Tú hevur álagt menniskjum at æra teirra gest, og hann, ið er risin upp til Tín er sanniliga komin fram til Tín og er náddur Tínari Hjáveru. Far tá við honum í samsvari við Tína náði og Títt gávumildi! Við Tínari dýrd, eg veit við vissu, at Tú fert ikki at sleppa Tær Sjálvum undan tí, ið Tú hevur kravt av Tínum tænarum, ei heldur fert Tú at lata hann vera við ongum, ið hevur krøkt seg í strong Títt gávumildis og er risin upp til Degning Títt ríkidømis.

Tað er eingin annar Guð uttan Tú, hin Eini, hin Staki, hin Máttmikli, hin Alvísi, hin Gávumildi.

Bahá'u'lláh

O mín Guð! O Tú fyrigevari av syndum, veitari av gávum, burturbeinari av líðingum!

Sanniliga bøni eg Teg um at fyrigeva syndir teirra, ið eru farin úr tí likamliga klædninginum og eru risin upp í tann andaliga heimin.

O mín Harri! Reinsa tey frá misbrotum, rek burtur teirra sorgir og umskapa teirra myrkur til ljós. Fá tey til at stíga inn í urtagarð eydnunnar, reinska tey við hinum reinasta vatni og gev, at tey kunnu skoða tíni glitur á hinum hægsta tindi

'Abdu'l-Bahá

O mín Guð! O mín Guð! Sanniliga, tænari Tín, eyðmjúkur frammanfyri hátign guddómliga Tíns yvirluta, lítillátin við dyr Tíns einleiks, hevur trúð á Teg og á Tíni vers, hevur vitnað um Títt orð, er vorðin kveiktur við eldi Tíns kærleiks, er vorðin søktur niður í dýpi Tíns kunnleikshavs, er vorðin drigin av Tínum lotum, hevur litið á Teg, hevur vent sínum andliti ímóti Tær, hevur biðið til Tín og er vorðin sannførdur um Tína náði og fyrigeving. Hann er farin frá hesum deyðiliga lívi og er flogin til kongsríki ódeyðiligleikans, langtandi eftir tí framíhjárættindi at møta Tær.

O Harri, heiðra hansara tignarstigi, lívga hann undir skýlinum í Tínari størstu náði, fá hann til at stíga inn í Títt dýrdarfulla páradís og varðveit í allar ævir hansara tilveru í Tínum upphevjaða rósugarði, so at hann kann kava niður í hav ljóssins í heimi loyndardómanna.

Sanniliga, Tú ert hin gávumildi, hin Máttmikli, Fyrigevarin og Veitarin.

'Abdu'l-Bahá

O Tú fyrigevandi Harri!

Hóast at summar sálir hava brúkt sínar lívsdagar í fákunnu og gjørdust fremmandar og ólýdnar, so verða kortini, við bara einari bylgju frá Tínum havi fyrigevingar, øll tey,

ið eru umringað av synd, gjørd fræls. Hvønn tann, sum Tú vilt, gert Tú til ein trúnaðarvin og hvør tann, sum ikki er útvaldur av Tær, er roknaður sum ein misgerðarmaður. Hevði Tú farið við okkum við Tínum rættvísi, so eru vit øll einki uttan syndarar og høvdu tað uppiborið at verði stongd úti frá Tær, hevði Tú havt miskunn, so hevði hvør einasti syndari verðið gjørdur reinur og hvør fremmandur gjørdur til ein vin. Veit tá Tína fyrigeving og náði og gev øllum Tína miskunn.

Tú ert Fyrigevarin, Ljósgevarin og hin Alvaldandi.

‘Abdu’l-Bahá

# FASTLEIKI Í SÁTTMÁLANUM

Dýrd veri Tær, O Kongur ævinleikans og Skaparin av tjóðum og Tilevnarin av hvørjum molnandi beini! Eg biði Teg, við Tínum Navni, við hvørjum Tú hevur kallað alla mannaættina til havsbrúgv Tínar hátignar og dýrdar og leitt Tínar tænarar til hov Tínar náðinnar og Tíns tokkas, um at telja meg millum teirra, ið hava loyst seg sjálvi frá øllum uttan Tær og hava vent sær ímóti Tær og hava ikki verið hildin aftur av teimum ólukkum, ið vóru fyriskipaðar av Tær, frá at venda sær mótvegis Tínum gávum.

Eg havi tikið fast, O mín Harri, í hald Tíns gávumildis og havi krøkt meg meg fast í seymin á skikkju Tíns tokkas. Send tá niður á meg, úr skýggjum Tíns gávumildis, tað, ið fer at reinsa úr mær minningina um nakran uttan Teg og gera meg føran fyri at venda mær til Hansara, sum er Miðið fyri tilbiðjanini hjá allari mannaættini, ímóti Hvørjum eru fylktir teir, ið eggja til uppreistur, ið hava brotið Tín sáttmála og ikki hava trúð á Teg og Tíni tekin.

Sýt mær ikki, O mín Harri, angarnar av Tínum klæði á Tínum døgum og lat meg ikki vera uttan andadráttirnar frá Tínari Opinbering tá ið ljósglamparnir frá Tínum andliti vísa seg. Máttmikil ert Tú til at gera tað, ið Tær lystir. Einki kann standa ímóti Tínum vilja ella mótvirka tí, sum Tú hevur ætlað við Tínari megi.

Eingin Guð er uttan Tú, hin Almáttugi, hin Alvísi.

Bahá’u’lláh

Hann er hin Mæti, Fyrigevarin, hin Samkennandi!

O Guð, mín Guð! Tú sært Tínar tænarar í avgrund glatanar og villunar; hvar er Títt ljós av guddómligari leiðbeining, O Tú heimsins Tráan? Tú kennur teirra hjálparsloysi og teirra veikleika; hvar er Tín megi, O Tú í Hvørs taki eru kreftir himmalsins og jarðarinnar?

Eg biði Teg, O Harri mín Guð, við glampanum av ljósum Tínar eymu góðvildar og við bylgjunum á havi Tíns kunnleiks og vísdóms og við Tínum Orði, ið Tú hevur stýrt ( swayed ) fólkinum í Tínum ríki við, um at loyva, at eg kann vera ein av teimum, ið

hava hildið Tíni boð í Tínari Bók. Og fyriskipa mær tað, ið Tú hevur fyriskipað Tínum álitnu, teimum, ið hava drukkið vín guddómliga íblástursins úr bikari Tíns gávumildis og hava skundað sær at fremja Tína gleði og at halda Tín Sáttmála og Títt Testamenti. Máttmikil ert Tú til at gera sum Tú vilt. Tað er eingin Guð uttan Tú, hin Alvitandi, hin Alvísi.

Fyriskipa mær, við Tínum gávumildi, O Harri, tað, ið fer at gagna mær í hesum heimi og aftaná og fer at draga meg nærri at Tær, O Tú, sum ert Harrin yvir øllum menniskjum. Tað er eingin Guð uttan Tú, hin Eini, hin Mæti, hin Lovprísaði.

Bahá'u'lláh

Ger okkara fótafet føst, O Harri, á Tínari gøtu og styrk okkara hjørtu í lýdni mótvegis Tær. Vend okkara andlitum ímóti fagurleika Tíns einleiks og gleð okkum í okkara barmum við teknum Tínar guddómligu eindar. Prýð okkara likam við búna Tíns gávumildis og tak burtur frá okkara eygum slør syndigaleikans og gev okkum bikarið við Tínari náði; so at kjarnin í øllum verum kann syngja Tær prís frammanfyri sjónini av Tínum stórfingni. Avdúka tá Teg Sjálvan, O Harri, við Tínari miskunnsomu talu og við loyndardóminum í Tínari guddómligu veru, so at tann heilaga ekstasa bønarinnar kann fylla okkara sálir – ein bøn, ið fer at rísa upp um orð og bókstavir og fer at fara út um mutlanina av stavilsum og ljóðum – so at allir lutir kunnu renna saman til einkisleika frammanfyri opinberingini av Tínum glampa.

Harri! Hesir eru tænarir, ið eru vorðnir verandi fastir og sterkir í Tínum Sáttmála og Tínum Testamenti, ið hava hildið fast í snóri støðugleikans í Tínari Søk og krøkt seg í seymin á búna Tíns stórfingnis. Hjálp teimum, O Harri, við Tínari náði, vátta teir við Tínari megi og styrk teirra lendar í lýdni mótvegis Tær.

Tú ert fyrigevarin, hin Náðiligi.

'Abdu'l-Bahá

O samkennandi Guð! Takk fái Tú fyri at Tú hevur vakt meg og gjørt meg tilvitandi. Tú hevur givið mær eitt síggjandi eyga og hevur ríkað meg við einum hoyrandi oyra, hevur ført meg til Títt Kongsríki og leitt meg til Tína gøtu. Tú hevur víst mær tann rætta vegin og fingið meg til at fara inn í ørk bjargingarinnar. O Guð! Lat meg verða verandi stinnur og ger meg fastan og óvikandi. Líva mær frá ógvusligum roynslum og varðveit og lívga mær í tí sterkt víðgirda skansa Tíns Sáttmálas og Testamentis. Tú ert hin Máttmikli. Tú ert hin Síggjandi, Tú ert hin Hoyrandi.

O Tú, hin Samkennandi Guð! Veit mær eitt hjarta, sum, eins og eitt glas, kann verða upplýst við ljósi Tíns kærleiks og gev mær tankar, ið kunnu broyta hendan heim til ein rósugarð við úthellingunum av Tínari himmalsku náði.

Tú ert hin Samkennandi, hin Miskunnsami. Tú ert hin Mikli, Góðgerandi Guð.

‘Abdu’l-Bahá

O mín Harri og mín Vón! Hjálp Tú Tínum elskaðu at vera stinn í Tínum mæta Sáttmála, at verða verandi trúgv ímóti Tínari greiðu Søk og at fremja tey boðini, ið Tú fyriskipaði teimum í Tínari Bók glampanna; so at tey kunnu gerast merki fyri leiðbeining og lampur vegna Skaran omanfyri, keldugos hins óendaliga vísdómsins og stjørnur, ið føra á røttu leið, tá ið tær skína niður úr tí guddómliga himmalinum.

Sanniliga ert Tú hin Óvinnandi, hin Almáttugi, hin Al-Máttmikli.

‘Abdu’l-Bahá

## FRÁLÆRA

Lovað veri Títt navn, O mín Guð, fyri at Tú hevur manifesterað Dagin, ið er Kongur Daganna, Dagurin, ið Tú kunngjørdi fyri Tínum útvaldu og Tínum Profetum í Tínum mest frálíku Talvum, Dagurin, tá ið Tú kastaði glampan av dýrd alra Tína navna á allar skaptar lutir. Stór er sæla hansara, ið hevur vent sær mótvegis Tær og er komin inn í Tína hjáveru og hevur fangað tónaløgini í Tínari rødd.

Eg bøni Teg, O mín Harri, við navni Hansara, ið Kongsríki Tína navnanna melur rundan um í tilbiðjan, um at Tú náðiliga vilt hjálpa teimum, ið eru Tær kær, at hálova Tínum orði millum Tínar tænarar og at breiða út Tína lovprísan millum Tínar skapningar, so at ovurgleðirnar í Tínari opinbering kunnu fylla sálirnar hjá øllum teimum, ið búgva á Tínari jørð.

Av tí at Tú hevur leitt tey, O mín Harri, til tey livandi vøtn Tínar náðinnar, gev við Tínum gávumildi, at tey ikki verða hildin aftur frá Tær; og av tí at Tú hevur biðið tey um at koma til bústað Tínar trónunnar, rek tey ikki úr Tínari hjáveru, við Tínari elskandi góðvild. Send niður á tey tað, ið fer at loysa tey fullkomiliga frá øllum uttan Tær og ger tey før fyri at flúgva høgt í atmosferu Tíns nærleiks í slíkan mun, at hvørki vald kúgarans ella eggjanir teirra, ið ikki hava trúð á Títt mest gøvgaða og mest mæta Sjálvi, skulu vera før fyri at halda teimum aftur frá Tær.

Bahá’u’lláh

Lovprísan veri Tær, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum Navni, ið eingin hevur viðurkent í hóskandi mun og hvørs týdning eingin sál hevur fatað; eg bøni Teg við Honum, ið er Uppruni Tínar Opinberingar og Degningur Tíni tekins, um at gera mítt hjarta til eina goymslu fyri Tín kærleika og fyri minningina um Teg. Knýt tað tá saman

við Títt mest mikla Hav, so at frá tí kunnu floyma út tey livandi vøtn Tíns vísdóms og krystalstreymir Tínar hálovanar og lovprísanar.

Limirnir á mínum likami vitna um Tína eind og hárið á mínum høvdi váttar megina í Tínum fullveldi og mátti. Eg havi staðið við Tínar náðidyr í treytaleysari sjálvsoyðing ( self effacement ) og fullkomnari sjálvsavnoktan og krøkt meg í seym Tíns gávumildis og fest míni eygu á havsbrúgv Tínar gávunnar.

Laga mær tað, O mín Guð, ið sømir seg stórleikanum í Tínari hátign og hjálp mær við Tínari styrkjandi náði, at læra frá mær Tína Søk soleiðis, at tey deyðu fara at skunda sær úr sínum gravum og turna ímóti tær, ímeðan tey seta alt teirra álit á Teg og festa teirra eygu á orientin í Tínari Søk og degningsstað Tínar Opinberingar.

Tú ert, sanniliga, hin Mest Máttmikli, hin Mest Høgi, hin Alvitandi, hin Alvísi.

Bahá'u'lláh

Dýrd veri Tær, O Harri alra heima og Tráan tjóðanna, O Tú sum ert vorðin manifesteraður í hinum Miklasta Navni, við hvørjum perlur vísdómsins og talunnar eru komnar til sjóndar úr skeljunum í hinum stóra havi Tíns kunnleiks, og himlar guddómligu opinberingar eru prýddir við ljósinum frá framkomuni av sól Tínar ásjónar.

Eg bøni Teg við tí Orði, við hvørjum Títt prógv varð fullgjørt millum Tínar skapningar og Tín vitnisburður varð fullgjørdur millum Tínar tænarar, um at styrkja Títt fólk í tí, sum andlit Sakarinnar fer at strála í Tínum ríki við, sum flaggsteyrar Tínar meginnar fara at verða festir í jørðina millum Tínar tænarar við og merki Tínar leiðbeiningar fara at verða hevjaði um øll Tíni ríki.

O mín Harri! Tú sært tey krøkja seg í band Tínar náðinnar og halda fast í skikkjuseymi Tínar góðgerðar. Fyriskipa teimum tað, ið kann fáa tey til at nærkast Tær og halda teimum frá øllum øðrum uttan Tær.

Eg bøni Teg, O Tú Kongur tilverunnar og Verji av tí sædda og tí ósædda, um at gera hvønn tann, ið reisist fyri at tæna Tínari Søk, eins og eitt hav, ið rørir seg eftir Tínum ynski, eins og ein, sum er í ljósum loga við eldinum í Tínum Heilaga Træi, ið skínur úr havsbrúnni í himli Tíns viljas. Sanniliga, Tú ert hin Mæti, sum hvørki megi allan heimsins ei heldur styrki alra tjóðanna kann veikja. Tað er eingin Guð uttan Tú, hin Eini, hin Ósamanberiligi, Verjin, hin Sjálv-Uppihaldandi.

Bahá'u'lláh

O Guð, sum ert Upphavið til allar Manifestasjónirnar, Keldan til allar Keldur, Upprunin til allar Opinberingar og Keldan til øll Ljós! Eg vitni, at við Tínum Navni eru himlar skiljanar prýddir og hav talunnar risið upp og trúarskipanir Tínar forsjónar kunngjørdar fylgjarunum hjá øllum trúgvum

Eg bøni Teg um at ríka meg í tann mun, at eg kann vera uttan alt uttan Tær og verða gjørdur leysur av øllum uttan Tær. Regna tá niður á meg úr skýggjum Túns gávumildis tað, ið fer at gagna mær í hvørjum heimi av Tínum heimum. Hjálp mær tá við Tínari styrkjandi náði at tæna Tínari Søk soleiðis millum Tínar tænarar, at eg kann vísa fram tað, ið fer at gera, at eg verði havdur í minninum so leingi sum títt egna kongsríki varir og Títt ríki verður til.

Hetta er Tín tænari, O mín Harri, sum við allari sínari veru hevur vent sær mótvegis havsbrúgv Túns gávumildis og havi Tínar náðinnar og himli Tínar gávunnar. Ger tá við meg sum tað sømir seg Tínari hátign og Tínari dýrd og Tínum stórtøkni og Tínari náði.

Tú ert, av sonnum, Guð styrkisins og meginnar, ið er sámiligur at svara teimum, ið biðja til Tín. Tað er eingin Guð uttan Tú, hin Alvitandi, hin Alvísi.

Bahá'u'lláh

O mín Guð, hjálp Tú Tínum tænara at upphevja Orðið og at mótprógva tað, ið er fáfongt og falskt, at prógva sannleikan, at breiða út tey heilugu vers, opinbera glamparnar og fáa morgunljósið til at lýsa í hjørtum teirra rættlætu.

Tú ert, sanniliga, hin Hásinnaði, hin Fyrigevandi.
'Abdu'l-Bahá

O Guð, mín Guð! Hjálp Tú Tínum álitnu tænarum at hava kærleiksfull og eym hjørtu. Hjálp teimum at breiða út millum allar tjóðir jarðarinnar ljós leiðbeiningarinnar, ið kemur frá herskaranum í tí høga. Sanniliga, Tú ert hin sterki, hin Máttmikli, hin Mæti, hin Al-Basandi, hin Æviga-Gevandi. Sanniliga, Tú ert hin Hásinnaði, hin Mildi, hin Eymi, hin Mest Gávumildi.

'Abdu'l-Bahá

Tú sært meg, O mín Guð, niðurboygdan í lítilleika ( lowliness ), ímeðan eg eyðmýki meg sjálvan frammanfyri Tínum boðum, gevi meg undir Títt yvirræði, skelvi fyri máttinum í Tínum valdi, flýggi undan tínari vreiði, bøni um Tína náði, seti mítt álit á Tína fyrigeving, ristist við ærufrykt fyri Tínari øði. Eg bøni Teg við einum dukandi hjarta, við floymandi tárum og einari longsulsfullari sál og í fullkomnum skilnaði frá øllum lutum, um at gera tey, sum elska Teg, eins og geislar av ljósi tvørtur ígjøgnum Tíni ríki og at hjálpa Tínum útvaldu tænarum at upphevja Títt Orð, so at teirra andlit kunnu gerast vøkur og skínandi við ljóma, at teirra hjørtu kunnu fyllast við loyndardómum og at hvør sál kann leggja frá sær sína syndabyrðu. Líva teimum tá frá atsøkjaranum, frá honum, ið er vorðin ein skammleysur og spottandi fremjari av órætti.

Sanniliga, tey sum elska Teg tysta, O mín Harri; leið tey til keldu Tíns gávumildis og Tínar náðinnar. Sanniliga, tey hungra; send niður til teirra Títt himmalska borð. Sanniliga, tey eru nakin; lat tey í klæði lærdómsins og kunnleikans.

Hetjur eru tey, O mín Harri, leið tey út á vígvøllin. Leiðbeinarar eru tey, fá tey til at tala bersøgin við argumentum og prógvum. Hjálpandi tænarar eru tey, fá tey til at senda runt bikarið, ið er á tremur við víni vissunnar. O mín Guð, fá tey at gerast ljómarar, ið lovsyngja í føgrum urtagørðum, ger tey til leyvur, ið liggja í skógarkjarrunum, hvalir, ið kava niður í tað ómetaliga dýpið.

Sanniliga, Tú ert Tann við ríkari náði. Tað er eingin annar Guð uttan Tú, hin Mæti, hin Máttmikli, hin Æviga-Veitandi.

‘Abdu’l-Bahá

# FRÍGERING

Loyv mær, O mín Guð, at nærkast Tær og at dvølja inni á eginøkjum Tíns hovs, tí at fjarleiki frá Tær hevur nærum tært meg burtur. Fá meg til at hvíla undir skugganum av veingjum Títt stórsinnis, tí at login í mínum skilnaði frá Tær hevur smeltað mítt hjarta. Drag meg nærri at ánni, ið er hitt sanna lívið, tí at mín sál brennur av tosta í sínari áhaldandi leitan eftir Tær. Míni suff, O mín Guð, vátta beiskleikan í mínari kvøl og tey tár, ið eg felli, vitna um mín kærleika til Tín.

Eg bøni Teg við tí lovprísan, ið Tú lovprísar Teg Sjálvan við og tí dýrd, ið Tú heiðrar Tínum egna Kjarna við, um at geva, at vit kunnu teljast ímillum tey, ið hava ásannað Teg og viðurkent Títt yvirvald á Tínum døgum. Hjálp okkum tá, O Guð mín, at drekka av fingrum miskunnar tey livandi vøtn, ið eru Tín eyma góðvild, so at vit fullkomiliga kunnu gloyma alt uttan Teg og bara hugsa um Teg. Máttmikil ert Tú til at gera tað, sum Tú vilt. Eingin Guð er uttan Tú, hin Sterki, Hjálpin í Neyðini, hin Sjálv-Uppihaldandi.

Lovað veri navn Títt, O Tú sum ert Kongur alra Konga!

Bahá’u’lláh

Heiðraður ert Tú, O mín Guð! Eg veiti Tær takk fyri at Tú hevur givið til kennar fyri mær Hann, sum er Degningur Tínar miskunnar og Lýsingarstað Tíns stórsinnis og Goymsla Tínar Sakar. Eg bøni Teg við Tínum Navni, við hvørjum andlit teirra, ið eru Tær nær eru vorðin hvít og hjørtuni á teimum, ið eru Tær trúføst, eru farin á flog ímóti Tær, um at geva, at eg, til allar tíðir og undir øllum umstøðum, kann hava fast tak í Tínum strongi og vera leysur av øllum tilknýti til nakran uttan Teg og kann halda míni eygu vend ímóti havsbrúgv Tínar Opinberingar og kann fremja tað, ið Tú hevur fyriskrivað mær í Tínum Talvum.

Klæð, O Harri mín, bæði mína innaru og uttaru veru í búna Tíns tokkas og Tínar eymu góðvildar. Varðveit meg tá í tryggleika fyri øllum tí, ið er Tær andstyggiligt og hjálp náðiliga mær og mínum skyldfólki at lýða eg og at skýggja alt, ið kann birta upp undir nakra ónda ella spilta tráan í mær.

Tú ert, sanniliga, Harrin av hesum heimi og tí næsta. Eingin Guð er uttan Tú, hin Alvitandi, hin Alvísi.

Bahá'u'lláh

Lovprísað veri navn Títt, O mín Guð! Eg bøni Teg við angunum av klæði Tínar náðinnar, sum eftir Tínum boði og í samsvari við Tínum ynski vórðu breiddir út um alla skapanina, og við morgunstjørnu Tíns vilja, ið hevur skinið bjart, við mátinum í Tínari megi og Tínum yvirvaldi, omanfyri havsbrúgv Tínar miskunnar, um at sletta av mínum hjarta allar innantómar áhugar og fáfongdar heilaspunar, so at eg við øllum mínum alski kann venda mær til Tín, O Tú Harri alra mannaættarinnar!

Eg eri Tín tænari og sonur Tín tænara, O mín Guð! Eg havi tikið í hald Tínar náðinnar og krøkt meg fast í strong Tínar eymu miskunnar. Fyriskipa mær tað góða, ið er hjá Tær og gev mær at eta av tí Borði, ið Tú sendi niður úr skýggjum Tíns gávumildis og himli Tínar góðvildar.

Tú ert, av sonnum, Harri heimanna og Guð alra teirra, sum eru í himli og alra teirra, sum eru á jørð.

Bahá'u'lláh

Mangt eitt kalt hjarta, O mín Guð, er sett í ljósan loga við eldinum í Tínari Søk og mangur ein durvandi er blivin vaktur av søtleikanum í Tínari rødd. Hvørt nógv eru tey fremmandu, ið hava leitað sær skjól undir skugganum av træi Tíns einleiks og hvørt fjølment tey tystu, ið hava stunað eftir keldugosinum hjá Tínum livandi vøtnum á Tínum døgum!

Sælur er tann, sum hevur vent sær mótvegis Tær og hevur skundað sær at náa Degningin fyri ljósinum av Tínum andliti. Sælur er tann, sum av øllum sínum alski hevur vent sær til Lýsingarstað Tínar Opinberingar og Lind Tíns Íblásturs. Sælur er tann, ið hevur brúkt á Tínari gøtu tað, ið Tú hevði veitt honum við Tínum gávumildi og tokka. Sælur er tann, sum, í sínum sára longsli eftir Tær, hevur kastað burtur alt uttan Teg. Sælur er tann, sum hevur loyst seg frá øllum tilknýti til nakran uttan Teg.

Eg bøni Teg, O mín Harri, við Honum, sum er Títt Navn, sum við megini í Tínum yvirræði og mátti, er risin upp um havsbrúnna í Sínum fangahúsi, um at fyriskipa øllum tað, ið hóskar til Tín og sømir seg fyri Tínari upphevjan.

Tín máttur er, av sonnum, førur fyri øllum ( equal to all things ).

Bahá’u’lláh

Eg veit ikki, O mín Guð, hvat tað er fyri ein Eldur, ið Tú hevur kynt í Tínum landi. Jørð kann ongantíð skugga fyri ljóma hansara, ei heldur vatn sløkkja hansara loga. Øll fólk heimsins eru ikki før fyri at standa ímóti megi hansara. Stór er sæla hansara, ið hevur nærkast honum og hoyrt hansara brakan.

Summi, O mín Guð, gjørdi Tú, við Tínari styrkjandi náði, før fyri at nærkast honum, ímeðan øðrum helt Tú aftur vegna tað, ið teirra hendur hava framt á Tínum døgum. Hvør tann, ið hevur skundað sær ímóti honum og er náddur honum, hevur, í sínum ídni eftir at skoða Tín fagurleika, givið sítt lív á Tínari gøtu og er stigin upp til Tín, fullkomiliga leysur av øllum uttan Tær.

Eg bøni Teg, O mín Harri, við hesum Eldi, ið logar og herjar í heimi skapanar, um at skræða sundur tey slør, ið hava forðað mær í at koma fram fyri trónu Tínar hátignar, og í at standa við dyrnar í Tínum portri. Fyriskipa Tú mær, O mín Harri, alt tað góða, ið Tú sendi niður í Tínari Bók, og lat meg ikki verða burturbeindan fjart frá skjóli Tínar miskunnar.

Máttmikil ert Tú til at gera sum Tú vilt. Tú ert, sanniliga, hin Al-Máttmikli, hin Mest Gávumildi.

Bahá’u’lláh

Lovprísan veri Tær, O mín Guð! Eg eri ein av Tínum tænarum, ið hevur trúð á Teg og á Tíni tekin. Tú sært hvussu eg havi vent mær sjálvum ímóti dyrnum til Tína miskunn og snúgvað mínum andliti mótvegis Tínari elskandi góðvild. Eg bøni Teg við Tínum mest framúrskarandi heitum og Tínum mest upphevjaðu eginleikum, um at lata upp fyri mínum andliti portursdyrnar til Tínar veitingar. Hjálp mær tá at gera tað, ið er gott, O Tú sum ert Eigarin av øllum nøvnum og eginleikum!

Eg eri fátækur, O mín Harri, og Tú ert hin Ríki. Eg havi vent mínum andliti ímóti Tær og havi loyst meg frá øllum uttan Tær. Sýt mær ikki, bøni eg Teg, lotini frá Tínari eymu miskunn og halt ikki frá mær tað, ið Tú hevur fyriskipað teimum útvaldu av Tínum tænarum.

Tak burtur slørið frá mínum eygum, O mín Harri, so at eg kann komast við tað, ið Tú hevur ynskt Tínum skapningum, og varnast, í øllum manifestasjónunum av Tínum handverki, opinberingarnar av Tínum alvalda mátti. Hugfanga mína sál, O mín Harri, við Tínum mest máttmiklu teknum og drag meg upp úr dýpunum í mínum spiltu og óndu tráanum. Skriva tá niður fyri mær tað góða av hesum heimi og av hinum komandi heimi. Máttmikil ert Tú til at gera tað, ið Tú vilt. Eingin Guð er uttan Tú, hin Al-Dýrdarligi, Hvørs hjálp øll menniskju sóknast eftir.

Eg veiti Tær takk, O mín Harri, fyri at Tú hevur vakt meg úr mínum svøvni og birt upp undir meg og skapt í mær ynskið um at sannkenna tað, ið teir flestu av Tínum tænarum ikki hava megnað at fata. Ger meg tá føran fyri, O mín Harri, at varnast, av kærleika fyri Tær og fyri sakir Tínar fragdar, alt tað, sum Tú hevur ynskt. Tú ert Tann, um máttin í Hvørs megi og yvirræði allir lutir vitna.

Tað er eingin Guð uttan Tú, hin Alvaldi, hin Góðgerandi.

Bahá'u'lláh

Í Navni Tíns Harra, Skaparin, hin Hægsti, hin Alt-Nøktandi, hin Mest Upphevjaði, Hann Hvørs hjálp øll menniskju bøna um.

Sig: O mín Guð! O Tú sum ert Skaparin av himlunum og jørðini, O Harri Kongsríkisins! Tú kennur væl loyndarmálini í mínum hjarta, ímeðan Tín Vera er órannsakilig fyri øllum uttan Tær. Tú sært alt, ið er av mær, ímeðan eingin annar kann gera tað uttan Tú. Gev mær, við Tínari náði, tað, ið fer at gera meg føran fyri at kunna vera uttan alt uttan Teg og ráða fyri mær tað, ið fer at gera meg leysan av øllum uttan Tær. Gev at eg kann heysta fyrimunirnar av mínum lívi í hesum heimi og í tí næsta. Lat upp fyri mínum andliti Tínar náðidyr og náðiliga luta mær Tína eymu miskunn og Tínar veitingar.

O Tú sum ert Harrin av ríkari ( abounding ) náði! Lat Tína himmalsku hjálp vera rundanum tey, ið elska Teg og veit okkum tær gávur og teir framar, ið Tú eigur. Ver Tú okkum nøktandi av øllum lutum, fyrigev okkum syndir okkara og hav miskunn við okkum. Tú ert okkara Harri og Harrin yvir øllum skaptum lutum. Ongan annan ákalla vit uttan Teg og einki biðja vit um uttan Tín tokka. Tú ert Harrin av gávumildi og náði, óyvirvinniligur í Tínari megi og hin mest køni í Tínum ætlanum. Eingin Guð er uttan Tú, hin Alt-Eigandi, hin Mest Upphevjaði.

Veit, O mín Harri, Boðberunum, teimum heilugu og teimum rættvísu Tíni vælsignilsir. Sanniliga, ú ert Guð, hin Makaleysi, hin Alt-Tvingandi.

Báb

O Harri! Til Tín leiti eg mær fyri at finna skjól og ímóti øllum Tínum teknum vendi eg mínum hjarta.

O Harri!Um eg eri á ferð ella heima, í mínum yrki ella mínum arbeiði, so seti eg alt mítt álit á Teg.

Gev mær tá Tína nøktandi hjálp fyri at gera meg óheftan av øllum lutum, O Tú sum ert einastandandi í Tínari miskunn!

Veit mær mín part, O Harri, sum Tær lystir og fá meg at vera nøgdan við tað, ið Tú hevur fyriskipað mær.

Tín er hin fullkomni myndugleikin til at geva boð.

Báb

O Guð, mín Guð! Tú ert mín Vón og mín Elskaði, mítt hægsta mál og ynski! Við stórum eyðmjúkleika og fullkomnum alski biði eg Teg um at gera meg til eina minaret fyri Tín kærleika í Tínum landi, eina lampu av Tínum kunnleika millum Tínar skapningar og eitt merki fyri guddómligum gávumildi í Tínum yvirvaldi.

Tel meg ímillum slíkar av Tínum tænarum, sum hava loyst seg sjálvar frá øllum uttan Tær, hava halgað seg frá stokkuttu lutum heimsins og hava fríað seg sjálvar frá eggjanunum frá røddum teirra innantómu heilaspunanna.

Lat mítt hjarta tambast av gleði við anda váttannar frá Tínum kongsríki og lat míni eygu klárna við at skoða herskararnar av guddómligum stuðuli stíga niður til mín hvør eftir annan úr Kongsríki Tínar alvaldu dýrdar.

Tú ert, av sonnum, hin Almáttugi, hin Al-Dýrdarligi, hin Al-Máttmikli.

‘Abdu’l-Bahá

O Guð, mín Guð! Fyll mær tað bikar, ið er frígering frá øllum lutum og í samkomu Tína glampanna og veitinganna, gleð meg við tí víni, sum er at elska Teg. Fría meg frá álopunum frá ovurhuga og tráan, brót av mær leinkjur hendan niðara heims, drag meg við eldhuga( with rapture ) inn í Títt yvirjarðliga ríki og stimbra meg ímillum Tínar ternur við fleyrum Tíns heilagleiks.

O Harri, ger mítt andlit bjart við ljósum Tínar veitinganna, lýs upp míni eygu við at skoða tekin Tíns alt-basandi máttsins; frø mítt hjarta við dýrd Tíns kunnleiks, ið fevnir um alt, gleð Tú mína sál við Tínum sálar-endurlívgandi tíðindum um stóra gleði, O Tú Kongur yvir hesum heimi og Kongsríkinum omanfyri, O Tú Harri av yvirvaldi og mátti, so at eg kann breiða út Tíni tekin og merki og kunngera Tína Søk og fremja Tínar Lærur og tæna Tínari Lóg og upphevja Títt Orð.

Tú ert, sanniliga, hin Máttmikli, hin Æviga-Gevandi, hin Dugandi, hin Alvaldi.

‘Abdu’l-Bahá

# FUNDIR

Hálovaður veri Tú, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við rusandi vindum Tínar náðinnar og við teimum, ið eru Degningar Tínar ætlanar og Lýsingarstøð Tíns íblásturs, um at senda niður til mín og til øll, ið hava sóknast eftir Tínum andliti, tað, ið sømir seg Tínum hásinni og gávumildu náði og er vert Tínar veitingar og Tín tokka. Fátækur og einsamallur eri eg, O mín Harri! Søkk meg niður í hav Títt ríkidømis; tystur, lat meg drekka av livandi vøtnum Tínar elskandi góðvildar.

Eg bøni Teg við Tínum egna Sjálvi og við Honum, sum Tú hevur útnevnt til Manifestasjónina av Tínari egnu Veru og Títt sundurgreinandi Orð fyri øll, sum eru í himli og á jørð, um at savna saman Tínar tænarar undir skugganum av Træi Tínar náðiligu forsjónar. Hjálp teimum tá, at fáa sær av tess fruktum, at lurta eftir skróvanini av tess bløðum og eftir søtleikanum í røddini á Fuglinum, ið syngur á tess greinum. Tú ert, sanniliga, Hjálpin í Neyðini, hin Óatkomiligi, hin Almáttugi, hin Mest Gávumildi.

Bahá'u'lláh

O Tú miskunnsami Guð! O Tú sum ert mætur og máttmikil! O Tú mest blíði Faðir! Hesir tænarir eru komnir saman, venda sær til Tín, bøna inniliga Tína gátt, tráa eftir Tínum endaleysu náðigávum frá Tínari stóru vissu. Teir Teir hava einki endamál uttan Tína góðu fragd. Teir hava onga ætlan uttan at tæna heimi mannaættarinnar.

O Guð! Ger hesa samkomu ljómandi. Ger hjørtuni miskunnsom. Veit náðigávur Heilaga Andans. Ger teir út við einari megi av himli. Vælsigna teir við himmalskum hugum. Ger teirra inniligleika ( sincerity ) størri, so at teir, í berum eyðmjúkleika og í iðran, kunnu venda sær til Títt kongsríki og vera upptiknir av at tæna heimi mannaættarinnar. Gævi at hvør teirra gjørdist til eitt ljómandi ljós. Gævi at hvør teirra gjørdist til eina glógvandi stjørnu. Gævi at hvør teirra gjørdist vakur í liti og yndisliga angandi í kongsríki Guðs.

O blíði Faðir! Veit Tínar vælsigningar. Lít ikki at okkara ófullkomleikum. Varða okkum undir Tínari verju. Minst ikki okkara syndir. Grøð okkum við Tínari miskunn. Vit eru veik; Tú ert mætur. Vit eru fátøk; Tú ert ríkur. Vit eru sjúk; Tú ert Læknin. Vit eru tørvandi; Tú ert hin mest gávumildi.

O Guð! Ger okkum út við Tínari forsjón. Tú ert hin Máttmikli. Tú ert Gevarin. Tú ert hin Góðgerandi.

'Abdu'l-Bahá

O Tú blíði Harri! Hesir eru Tínir tænarar, ið eru savnaðir á hesum fundi, hava vent sær ímóti Tínum kongsríki og hava tørv á Tínari veiting og vælsigning. O Tú Guð! Ger sjónlig og greið tekin Tíns einleiks, ið eru løgd niður í allar lívsins veruleikar. Avdúka og breið út tær dygdir, ið Tú hevur gjørt bundnar og fjaldar í hesum menniskjaligu veruleikum.

O Guð! Vit eru eins og plantur og Títt gávumildi er eins og regnið; leska hesum plantum og fá tær til at vaksa við Tínari veiting. Vit eru Tínir tænarar; fría okkum úr leinkjum teirru likamligu tilverunnar. Vit eru óvitandi; ger okkum vís. Vit eru deyð; ger okkum livandi. Vit eru likamlig; ger okkum út við anda. Vit eru ávantandi; ger okkum til trúnaðarvinir Tína loyndardóma. Vit eru tørvandi; ríka og vælsigna okkum úr Tínum markleysa skattkamari. O Guð! Fá okkum til lívs aftur; gev okkum sjón; gev okkum

hoyrn; ger okkum kend við lívsins loyndardómar, so at dulsmál Títt kongsríkis kunnu verða avdúkaði fyri okkum í hesum heimi tilverunnar og vit kunnu játta Tín einleika. Ein og hvør veiting stavar frá Tær; ein og hvør vælsigning er Tín.

Tú ert Mætur. Tú ert Máttmikil. Tú ert Gevarin, og Tú ert hin Æviga-Gávumildi.

‘Abdu’l-Bahá

O mín Guð! O mín Guð! Sanniliga, hesir tænarir venda sær til Tín, við inniligari bøn til Títt kongsríki miskunnar. Sanniliga, teir eru atdrignir Tínum heilagleika og gjørdir gløðandi við eldi Tíns kærleiks, sóknast eftir staðfesting frá Tínum undurfulla kongsríki og vóna at náa Títt himmalska ríki. Sanniliga, teimum leingist eftir, at Tín gáva stígur niður og tráa eftir upplýsing frá Sól Veruleikans. O Harri! Ger teir til geislandi lampur, miskunnsom tekin, fruktagóð trø og skínandi stjørnur. Stígi teir fram í Tínari tænastu og veri teir knýttir at Tær við snørum og bondum Tíns kærleiks, í longsli eftir ljósi Tínar vælvildar. O Harri! Ger teir til tekin leiðbeiningar, flaggsteyrar Títt ódeyðiliga kongsríkis, bylgjur á havi Tínar miskunnar, spegl av ljósi Tínar hátignar. Sanniliga, Tú ert hin Miskunnsami! Sanniliga, Tú ert hin Dýrabari, hin Elskaði.

‘Abdu’l-Bahá

O Tú fyrigevandi Guð! Hesir tænarar venda sær til Títt kongsríki og sóknast eftir Tínari náði og Tínum gávumildi. O Guð! Ger teirra hjørtu góð og rein, so at teir kunnu gerast verdir Tín kærleika. Reinska og halga andarnar, so at ljósið frá Sól Veruleikans kann skína á teir. Reinska og halga eyguni, so at tey kunnu síggja Títt ljós. Reinska og halga oyruni, so at tey kunnu hoyra kallið frá Tínum kongsríki.

O Harri! Sanniliga, Vit eru veik, men Tú ert mætur. Sanniliga, vit eru fátøk, men Tú ert ríkur. Vit eru tey sum leita og Tú ert hin Eftirleitaði. O Harri! Hav samkenslu við okkum og fyrigev okkum; veit okkum slíkan førleika og slíkt næmi, at vit kunnu gerast verd Tín tokka og verða drigin at Tínum kongsríki, at vit kunnu drekka djúpt av vatni lívsins, kunnu verða kveikt av eldi Tíns kærleiks, og verða fingin til lívs aftur við fleyrum Heilaga Andans í hesari ljómandi øld.

O Guð, mín Guð! Kveit at hesari samkomu við Tínari elskandi góðvild. Varðveit hvønn einstakan í Tínari umsjón og undir Tínari verju. Send niður til hesar sálir Tínar himmalsku vælsigningar. Søkk tær niður í hav Tínar miskunnar og ger tær livandi við fleyrum Heilaga Andans.

O Harri! Veit hesari rættvísu stjórn Tína náðiligu hjálp og váttan. Hetta land liggur undir livandi skugga Tínar verjunnar og hetta fólk er í Tínari tænastu. O Harri! Gev teimum Tína himmalsku gávu og ger úthellingarnar av Tínari náði og Tínum tokka ríkiligar og yvirfløðandi. Lat hesa hávirdu tjóð verða æraða og ger hana føra fyri at sleppa inn í Títt kongsríki.

Tú ert hin Máttmikli, hin Alvaldi, hin Miskunnsami, og Tú ert hin Hásinnaði, hin Góðgerandi, Harrin av ríkari ( abounding ) náði.

‘Abdu’l-Bahá

O Guddómliga Forsjón! Hendan samkoma er sett saman av Tínum vinum, ið eru drignir at Tínum fagurleika og eru settir í ljósan loga av eldi Tíns kærleiks. Ger hesar sálir til himmalskar einglar, fá tær til lívs aftur við andadráttum Heilaga Anda Tíns, gev teimum væltalandi tungur og støðuføst hjørtu, veit teimum himmalska megi og miskunnsamt kenslusemi, fá tær at gerast fráboðarnir um einleika mannaættarinnar og orsøk til kærleika og sátt í heimi menniskjunnar, so at tað hættisliga myrkur teirri óvitandi fordómars kann hvørva við ljósinum frá Sól Sannleikans, at hesin dapri heimur kann verða upplýstur, at hetta tilfarsliga ríki kann súgva til sín geislarnar úr heimi andans, at hesir ymisku litir kunnu renna saman í ein lit og at songlag lovprísanar kann rísa upp til kongsríki Tíns heilagleiks.

Sanniliga, Tú ert hin Alvaldi og hin Almáttugi!

‘Abdu’l-Bahá

# FYRIGEVING

Lovaður veri Tú, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum Útvaldu og við Berarunum av Tínum Áliti og við Honum, sum Tú hevur fyriskipað at vera Innsigli Tína Profetanna og Tína Boðberanna, um at lata minningina um Teg vera mín felaga, og Tín kærleika mítt mið og Títt andlit mítt mál og Títt navn mína lampu og Títt ynski mína tráan og Tína fragd mína gleði.

Eg eri ein syndari, O mín Harri, og Tú ert hin Æviga-Fyrigevandi. So skjótt sum at eg ásannaði Teg skundaði eg mær fyri at náa tað upphevjaða hov Tínar elskandi góðvildar. Fyrigev mær, O mín Harri, mínar syndir, ið hava forðað mær í at ganga eftir vegi Tínar fragdar og í at náa strendurnar við hav Tíns einleiks.

Tað er eingin, O mín Harri, ið kann hava gávumilt við meg at gera, ið eg kann venda mínum andliti ímóti og eingin, ið kann hava samkenslu við mær, so at mær kann leingjast eftir hansara miskunn. Kasta meg ikki, tað bøni eg Teg, út úr hjáveru Tínar náðinnar, halt Tú ei heldur frá mær úthellingarnar av Tínum hásinni og gávumildi. Fyriskipa mær, O mín Harri, tað, ið Tú hevur fyriskipað teimum, ið elska Teg og skriva niður fyri mær tað, ið Tú hevur skrivað niður fyri Tínum útvaldu. Mítt eygnabragd hevur til allar tíðir verið vent ímóti horisontinum í Tínari náðiligu forsjón og míni eygu fest við hov Tínar eymu miskunnar. Ger við meg sum tað sømir seg Tær. Eingin Guð er uttan Tú, Guð meginnar, Guð dýrdarinnar, Hvørs hjálp øll menniskju inniliga biðja um.

Bahá’u’lláh

Eg eri tann, O mín Harri, sum hevur vent sínum andliti ímóti Tær og sett sína vón á undur Tínar náðinnar og opinberingarnar av Tínum gávumildi. Eg bøni Teg um, at Tú ikki fert at lata meg venda mær vónsviknan burtur frá Tínum durðum miskunnar, ei heldur lata meg yvir til slíkar av Tínum skapningum, ið hava avnoktað Tína Søk.

Eg eri, O mín Guð, Tín tænari og sonur tænara Tín. Eg havi ásannað Tín sannleika á Tínum døgum og havi stýrt mínum fótafetum mótvegis strondum Tíns einleiks, ímeðan eg havi játtað Tín stakleika, viðurkent Tína eind og vónað um Tína fyrigeving og Títt avlát. Máttmikil ert Tú til at gera tað, ið Tú vilt; eingin Guð er uttan Tú, hin Dýrdarligi, hin Æviga-Fyrigevandi.

Bahá’u’lláh

Tú sært meg, O mín Harri, við mínum andliti vendum ímóti himli Tíns gávumildis og havi Tíns tokkas, afturtikin frá øllum uttan Tær. Eg biði Teg við glampunum frá Sólini í Tínari opinbering á Sinai og ljómunum frá Himnahválvi tínar náðinnar, ið skínur úr horisonti Tíns Navns, hin Æviga-Fyrigevandi, um at geva mær Títt avlát og at hava miskunn við mær. Skriva tá niður fyri mær við Tínum dýrdarpenni tað, ið fer at upphevja meg gjøgnum Títt Navn í heimi skapanar. Hjálp mær, O mín Harri, at venda mær mótvegis Tær og at lurta eftir røddini hjá Tínum elskaðu, sum heimsins maktir ikki hava megnað at veikt og ræði tjóðanna ikki hevur verið ført fyri at halda burtur frá Tær og, sum. Ímeðan tey hava gingið fram ímóti Tær, hava sagt: “Guð er okkara Harri, Harrin hjá øllum, sum eru í himli og øllum, sum eru á jørð!”

Bahá’u’lláh

Lovaður veri Tú, O Harri mín Guð! Hvørja ferð eg hætti mær at nevna Teg, verði eg hildin aftur av mínum stóru syndum og álvarsligu misbrotum ímóti Tær og eg haldi meg vera púra fyri uttan Tína náði og fullkomiliga máttleysan til at feira ( celebrate ) Tín Prís. Mítt stóra álit á Títt gávumildi endurnýggjar kortini mína vón til Tín og mín vissa um, at Tú fert at fara við mær við gávumildi, gevur mær mót til at lovsyngja Teg og at biðja Teg um tað, ið Tú eigur.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við Tínari miskunn, ið er farin fram um allar skaptar lutir og sum øll, ið eru søkt tniður í høv Tína navna, vitna um, um ikki at lata ( abandon ) meg til mín sjálvs, tí at mítt hjarta hevur lyndi til tað ónda. Ansa tá eftir mær inni í skansa Tínar verjunar og skýli Tínar umsorganar. Eg eri tann, O mín Guð, hvørs einasta ynski er tað, ið Tú hevur avgjørt við megi Tíns styrkis. Tað einasta, ið eg havi valt fyri

meg sjálvan, ar at verða styðjaður av Tínum náðiligu ásetingum og avgerðini hjá Tínum vilja og at verða hjálptur av teknunum um Tína fyriskipan og Tín dóm.

Eg bøni Teg, O Tú sum ert hin Elskaði hjá teimum hjørtum, ið leingjast eftir Tær, við manifestasjónunum av Tínari Søk og Degningum Tíns íblásturs og Umboðunum fyri Tínari hátign og Skattkømrum Tíns kunnleiks, um ikki at lata meg vera uttan Tín heilaga Bústað, Títt Merki og Títt Tabernakul. Hjálp mær, O mín Harri, at náa Hansara halgaða hov og at mala rundan um Hansara persón og at standa eyðmjúkliga við Hansara dyr.

Tú ert Tann Hvørs megi er úr ævinleika til ævinleika. Einki sleppur undan Tínum kunnleika. Tú ert, sanniliga, Guð meginnar, Guð dýrdarinnar og vísdómsins.

Prísaður veri Guð, Harri heimanna!

Bahá'u'lláh

Lovað veri Títt navn, O mín Guð og Guð alra luta, mín Dýrd og Dýrd alra luta, mín Tráan og Tráan alra luta, mín Styrki og Styrki alra luta, mín Kongur og Kongur alra luta, mín Eigari og Eigarin av øllum lutum, mítt Mál og Mál alra luta, mín Ávirkari og Ávirkari alra luta! Lat meg ikki, tað bøni eg Teg, verða hildin aftur frá havi Tínar eymu miskunnar, ei heldur langt burtur frá teimum strondum, ið eru nærleiki til Tín.

Einki annað enn Tú, O mín Harri, gagnar mær og nær atgongd ( near access ) til nakran uttan Teg nyttar mær einki. Eg bøni Teg við yvirflóð Tíns ríkidømis, vegna hvørt Tú kundi vera fyri uttan alt annað enn teg Sjálvan, um at telja meg millum teirra, ið hava vent sínum andlitum mótvegis Tær og reist seg fyri at tæna Tær.

Fyrigev tá, O mín Harri, Tínum tænarum og Tínum ternum. Tú ert, av sonnum, hin Æviga-Fyrigevandi, hin Mest Samkennandi.

Bahá'u'lláh

O Guð okkara Harri! Líva okkum við Tínari náði ímóti øllum tí, sum kann vera Tær andstyggiligt og veit okkum tað, ið væl sømir seg Tær. Gev okkum meira av Tínum gávumildi og vælsigna okkum. Avlat okkum tað, ið vit hava gjørt og vaska burtur okkara syndir, og fyrigev okkum við Tínari náðiligu fyrigeving. Sanniliga, Tú ert hin Mest Upphevjaði, hin Sjálv-Uppihaldandi.

Tín elskandi forsjón hevur fevnt um allar skaptar lutir í himlunum og á jørð, og Tín fyrigeving er farin fram um alla skapanina. Títt er yvirvaldið; í Tínari hond eru Kongsríki Skapanar og Opinberingar; í Tínari høgru hond heldur Tú øllum skaptum lutum og í Tínum taki eru tey ásettu málini av fyrigeving. Tú fyrigevur hvørjum sum helst av Tínum tænarum sum Tær lystir. Sanniliga, Tú ert hin Æviga-Fyrigevandi, hin Al-Elskandi. Als einki sleppur undan Tínum kunnleika og einki er til, ið er fjalt fyri Tær.

O Guð okkara Harri! Líva okkum við megini í Tínum mátti, ger okkum før fyri at koma inn á Títt undursama, aldandi hav og gev okkum tað, ið væl sømir seg Tær.
Tú ert hin Ovasti Valdsharrin, hin Mæti Fremjarin, hin Upphevjaði, hin Al-Elskandi.

Báb

Prís veri Tær, O Harri. Fyrigev okkum okkara syndir, hav miskunn við okkum og ger okkum før fyri at venda aftur til Tín. Lat okkum ikki líta á nakað annað enn Teg og veit okkum, við Tínum gávumildi, tað ið Tú elskar og ynskir og sum væl sømir seg Tær. Upphevja stig teirra, ið hava trúð av sonnum og fyrigev teimum við Tínari náðiligu fyrigeving. Sanniliga ert Tú Hjálpin í Neyðini, hin Sjálv-Uppihaldandi.

Báb

Eg bøni Teg um at fyrigeva mær, O mín Harri, hvørja umrøðu uttan umrøðuna av Tær, og hvørja lovprísan uttan lovprísanina av Tær, og hvørja gleði uttan gleðina í Tínum nærleika, og hvørja fragd uttan fragdina í samveruni við Teg, og hvørja frøi uttan frøi Tíns kærleiks og Tínar fragdar, og alt tað, ið hoyrir mær til, ið ikki hevur samband við Teg, O Tú sum ert Harri alra harra, Hann sum útvegar ráðini og læsir upp dyrnar.

Báb

Dýrd veri Tær, O Guð. Hvussu kann eg nevna Teg, tá ið Tú ert halgaður frá lovprísanini hjá allari mannaættini? Lovprísað veri Títt Navn, O Guð, Tú ert Kongurin, hin Ævigi Sannleikin; Tú veitst hvat er í himlunum og á jørðini og til Tín mugu øll venda aftur. Tú hevur sent niður Tína guddómliga fyriskipaðu Opinbering í samsvari við eitt týðiligt mát. Prísaður ert Tú, O Harri! Eftir Tínum boðum gert Tú hvønn sum helst sigrandi, ið Tú vilt, við herskarum himmalsins og jarðarinnar og tess, ið er har ímillum. Tú ert hin Ovasti, hin Ævigi Sannleikin, Harrin av ósigrandi styrki.
Hálovaður ert Tú, O Harri, Tú fyrigevur til allar tíðir syndirnar hjá slíkum av Tínum tænarum, ið bøna um Títt avlát. Vaska burtur mínar syndir og syndir teirra, sum sóknast eftir Tínari fyrigeving í lýsingini, sum biðja til Tín um dagin og á náttartíð, sum ikki tráleingjast eftir nøkrum uttan Guði, sum ofra alt tað, ið Guð náðiliga hevur veitt teimum, sum feira ( celebrate ) Tín prís á morni og á kvøldi og, sum ikki eru vanrøkin í teirra skyldum.

Báb

O Tú fyrigevandi Harri! Tú ert skýlið hjá øllum hesum Tínum tænarum. Tú kennur loyndarmálini og ert vitandi um alt. Vit eru øll hjálparsleys og Tú ert hin Mæti, hin Alvaldandi. Vit eru øll syndarir og Tú ert Fyrigevarin av syndum, hin Miskunnsami, hin Samkennandi. O Harri! Lít ikki at okkara ófullkomleikum. Far við okkum í samsvari við Tína náði og Títt gávumildi. Okkara ófullkomleikar eru nógvir, men hav Tínar fyrigevingar er markleyst. Okkara veikleiki er álvarsligur, men prógvini um Tína hjálp og Tín stuðul eru týðilig. Staðfest og styrk okkum tískil. Ger okkum før fyri at gera tað, ið eigur Tína heilugu Gátt uppiborna. Upplýs okkara hjørtu, gev okkum síggjandi eygu og ansin oyru. Fá tey deyðu aftur til lívs og grøð tey sjúku. Veit teimum fátøku ríkidømi og gev teimum óttafullu frið og trygd. Tak ímóti okkum í Tínum kongsríki og upplýs okkum við ljósi leiðbeiningar. Tú ert hin Máttmikli og hin Alvaldi. Tú ert hin Gávumildi. Tú ert hin Miskunnsami. Tú ert hin Blíði.

‘Abdu’l-Bahá

## GRUNNURIN

*Allir vinir Guðs….eiga at geva í tann min sum til ber, sama ger hvussu lítil teirra gáva mátti veri. Guð leggur ikki størri byrðu á eina sál enn hon megnar at bera. Slíkar veitingar mugu koma frá øllum miðstøðum og øllum trúgvandi….O vinir Guðs! Verið tit vissaðir um, at ístaðin fyri hesar veitingar fara tykkara landbúnaður, tykkara ídnaður og tykkara handil at verða vælsignaði við fleirfaldaðum vøkstri, við góðum gávum og veitingum. Hann, ið kemur við einari góðari gerð, fer at fáa eina tíggjufaldaða afturløning. Tað er eingin ivi, at hin livandi Harrin fer ríkiliga at styrkja tey, ið brúka sítt ríkidømi á Hansara vegi.*

O Guð, mín Guð! Upplýs enni teirra, ið veruliga elska Teg og stuðla teimum við einglaligum herskarum av vissuligum stórsigri. Set teirra føtur fastar á Tín beina veg og úr Tínum fyrndargamla gávumildi lat upp fyri teimum portursdyr Tína vælsigninganna; tí at tey brúka tað á Tínum vegi, ið Tú hevur veitt teimum, verja Tína Trúgv, seta sítt álit á minningina um Teg, bera fram síni hjørtu av kærleika fyri Tær og halda ikki tí aftur, ið tey eiga, í tilbiðjan av Tínum fagurleika og í teirra leitan eftir hvussu at frøa Teg.

O mín Harri! Fyriskipa teimum ein ríkiligan skamt, eina avgjørda afturløning og eina dygga samsýning.

Sanniliga, Tú ert Uppihaldarin, Hjálparin, hin Gávumildi, hin Stórtøkni, hin Æviga-Veitandi.

‘Abdu’l-Bahá

# GRØÐING

O Guð, mín Guð! Eg bøni Teg við havi Tínar grøðingar og við glampunum frá Morgunstjørnu Tínar náðinnar og við Tínum Navni, sum Tú legði Tínar tænarar undir Teg við, og við tí gjøgnumseyrandi megini í Tínum mest upphevjaða Orði og styrkini hjá Tínum mest gøvgaða Penni, og við Tínari miskunn, ið var til áðrenn skapanin av øllum, sum eru í himli og á jørð, um at reinsa meg við vøtnum Tíns stórtøknis fyri hvørja plágu og hvørt ólag, og fyri allan veikleika og alt máttloysi.

Tú sært, O mín Harri, hendan biðjandi bíða við dyr Títt stórtøknis og tann, ið hevur sett sínar vónir á Teg, krøkja seg í strong Títt gávumildis. Sýt honum ikki, tað bøni eg teg, tað, ið hann sóknast eftir úr havi Tínar náðinnar og frá Morgunstjørnu Tínar elskandi góðvildar.

Máttmikil ert Tú til at gera tað, ið Tær lystir. Tað er eingin Guð uttan Tú, hin Æviga-Fyrigevandi, hin Mest Gávumildi.

Bahá'u'lláh

Navn Títt er mín grøðing, O mín Guð, og at minnast Teg er mín heilivágur. Nærleiki at Tær er mín vón og kærleiki fyri Tær er mín felagi. Tín miskunn ímóti mær er mín grøðing og mín hjálp í bæði hesum heimi og í hinum komandi heimi. Tú ert, sanniliga, hin Al-Stórtøkni, hin Alvitandi, hin Alvísi.

Bahá'u'lláh

Dýrd veri Tær, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum Navni, sum Tú hevur lyft upp merki Tínar leiðbeiningar við, og kastaði frá Tær ljóma Tínar elskandi góðvildar, og opinberaði yvirvaldið í Tínum Ræði; gjøgnum hvørt lampa Tína navna er komin fram á rók Tína eginleikanna, og Hann, sum er Tabernakul Tínar eindar og Manifestasjónin av frígering er skinin fram; gjøgnum hvørt vegir Tína leiðbeininganna vórðu gjørdir kendir og gøtur Tínar fragdar vórðu merktar; gjøgnum hvørt grundarløgini undir villu eru fingin at skelva og tekin óreinleikans eru avtikin; gjøgnum hvørt keldur vísdómsins eru spríktar fram, og tað himmalska borðið sent niður; gjøgnum hvørt Tú varðveitti Tínar tænarar og veitti Tína grøðing; gjøgnum hvørt Tú vísti Tína eymu miskunn mótvegis Tínum tænarum og avdúkaði Tína fyrigeving millum Tínar skapningar – eg bøni Teg um at varðveita hann, ið hevur hildið fast í Tær og er vendur aftur til Tín og hevur krøkt seg í Tína miskunn og tikið í seym Tínar elskandi forsjónar. Send tá niður á hann Tína

grøðing og ger hann heilan og ger hann út við einum støðugleika, ið er frá Tær og eina ró, ið er veitt honum av Tínari hátign.

Tú ert, sanniliga, Grøðarin, Varðveitarin, Hjálparin, hin Almáttugi, hin Máttmikli, hin Al-Dýrdarligi, hin Alvitandi.

Bahá'u'lláh

Prísaður veri Tú, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum Mest Mikla Navni, ið Tú hevur birt upp undir Tínar tænarar og bygt Tínar býir við, og við Tínum mest frálíku heitum og Tínum mest gøvgaðu eginleikum, um at hjálpa Tínum fólki at venda sær mótvegis Tínum margfaldu gávum og at festa síni andlit á Tabernakul Tíns vísdóms. Grøð Tú tær sjúkur, ið hava søkt at sálunum úr øllum ættum og hava rætt tær frá at festa síni eygu á Páradísið, sum liggur í verndini av Tínum fyriskuggandi Navni, ið Tú hevur fyriskipað at vera Kongur alra navna hjá øllum, sum eru í himli og øllum, sum eru á jørð. Máttugur ert Tú til at gera sum Tær lystir. Í Tínum hondum er stórveldi alra navnanna. Tað er eingin Guð uttan Tú, hin Mæti, hin Vísi.

Eg eri bert ein fátækur skapningur, O mín Harri; eg havi krøkt meg í klædnaseym Tíns ríkidømis. Eg eri svárt sjúkur; eg havi hildið fast í strongi Tínar grøðingar. Bjarga mær frá teimum líðingum, ið hava umgirt meg og vaska mær gjølla við vøtnum Tíns blídleiks og Tínar miskunnar, og lat meg í búna heilsunnar við Tínari fyrigeving og Tínum stórtøkni. Fest tá míni eygu á Teg og fría meg frá øllum bindingum uttan til Tín. Hjálp mær at gera tað, ið Tú ynskir og at fremja tað, ið er Tær til vildar.

Tú ert vissuliga Harrin yvir hesum lívi og tí næsta. Tú ert, av sonnum, hin Æviga-fyrigevandi, hin Mest Miskunnsami.

Bahá'u'lláh

Prísaður veri Tú, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum Mest Mikla Navni, sum Hann, ið er Tín Fagurleiki, er grundfestur á trónu Tínar Sakar við, og við Tínum Navni, við hvørjum Tú broytir allar lutir og savnar saman allar lutir og krevur til svars allar lutir og samsýnir øllum lutum og varðveitir allar lutir og uppiheldur øllum lutum – eg biði Teg inniliga um at verja hesa ternu, ið er flýdd fyri at fáa friðskjól hjá Tær og hevur leitað sær til skýli Hansara, í Hvørjum Tú Sjálvur ert opinberur, og hevur sett alt sítt álit á Teg.

Hon er sjúk, O mín Guð, og er farin inn undir skuggan av Træi Tínar grøðingar; nívd og er flýdd til Bý Tínar verjunnar; heilsuveik og hevur leitað sær til eldu Tíns tokkas; ampafull og hevur skundað sær fyri at náa Keldugos Tíns friðsins; tyngd av synd og hevur fest sítt andlit á hov Tínar fyrigevingar.

Lat hana, við Tínum yvirræði og Tínari elskandi góðvild, O mín Guð og mín Elskaði, í búna Tíns balsams og Tínar grøðingar og fá hana at drekka av steypi Tínar miskunnar

og Tíns tokkas. Líva hana harumframt ímóti hvørjari plágu og líðing, frá allari pínu og sjúku og frá øllum tí, sum er Tær andstyggiligt.

Tú ert, av sonnum, ómetaliga upphevjaður yvir alt annað enn Teg Sjálvan. Tú ert, sanniliga, Grøðarin, hin Al-Nøktandi, Varðveitarin, hin Æviga-Fyrigevandi, hin Mest Miskunnsami.

Bahá'u'lláh

Hann er Grøðarin, Nøktarin, Hjálparin, hin Al-Fyrigevandi, hin Al-Miskunnsami.

Eg ákalli Teg, O Upphevjaði, O Trúfasti, O Ljómandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Drottin, O Uppreisari, O Dómari! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Makaleysi, O Ævigi, O Staki! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Mest Prísaði, O Heilagi, O Hjálpandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Alvísi, O Mest Vísi, O Mest Mikli! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Mildi, O Hátignarligi, O Fyriskipandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Elskaði, O Høgt Virðismetti, O Eydnusæli! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Mætasti, O Uppihaldandi, O Megnandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Ráðandi, O Sjálv-Uppihaldandi, O Alvitandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Andi, O Ljós, O Mest Opinberi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Tú tíðum Tilleitaði av øllum, O Tú Kendi av øllum, O Tú Loyndi fyri øllum! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Duldi, O Stórsigrandi, O Veitandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Almáttugi, O Hjálpandi, O Dyljandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Tilevnari, O Uppfyllari, O Fyribeinari! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Rísandi, O Savnandi, O Upphevjandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Fullgerandi, O Ótarnaði, O Stórtøkni! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Góðgerandi, O Afturhaldandi, O Skapandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Mest Stórbæri, O Fagri, O Gávumildi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Rættvísi, O Náðiligi, O Hásinnaði! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Alt-Tvingandi, O Æviga-Verandi, O Mest Vitandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Frálíki, O Fyrndargamli av Døgum, O Gøvigi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Væl-Varðaði, O Harri Frøinnar, O Eftirlangtaði! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Tú Góði við øll, O Tú Samkennandi, O Mest Vælviljandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Hvíldarstaður hjá øllum, O Skýli fyri øll, O Al-Varðveitandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Tú Hjálpari hjá øllum, O Tú Ákallaði av øllum, O Lívgevandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Útbreiðari, O Herjari, O Mest Mildi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Tú mín Sál, O Tú mín Elskaði, O Tú mín Trúgv! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Sløkkjari av Tosta, O Dularfulli Harri, O Mest Dýrabæri! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Størsta Minning, O Stórbærasta Navn, O Mest Fyrndargamli Vegur! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Mest Lovaði, O Mest Heilagi, O Halgaði! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Loysari, O Ráðgevi, O Bjargari! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Vinur, O Lækni, O Bergtakandi! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Dýrd, O Fagurleiki, O Stórtøkni! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Mest Álitni, O hin Besti Elskari, O Harri Degningsins! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Kveikjari, O Upplívari, O Veitari av Gleði! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Harri Gávumildis, O Mest Samkennandi, O Mest Miskunnsami! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Áhaldandi, O Lívgevandi, O Upphav til alla Veru! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Tú sum gjøgnumgatar alt, O Alt-Síggjandi Guð, O Harri Talunnar! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Opinberur tó Loyndur, O Ósæddur tó Víðagitin, O Áskoðari sum øll sóknast eftir! Tú hin Nøktandi, Tú hin Grøðandi, Tú hin Verandi, O Tú Verandi!

Eg ákalli Teg, O Tú sum slært í hel Elskarnar, O Guð av Náði ímóti teimum óreinu!
O Nøktari, eg ákalli Teg, O Nøktari!
O Grøðari, eg ákalli Teg, O Grøðari!
O Verandi, eg ákalli Teg, O Verandi!
Tú hin Æviga-Verandi, O Tú Verandi!

Halgaður ert Tú, O mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum hásinni, við hvørjum portursdyr Tíns stórtøknis og Tínar náðinnar vórðu latnar upp á víðan vegg, við hvørjum Tempul Tíns Heilagleiks varð grundað á trónu ævinleikans; og við Tína miskunn, við hvørjari Tú bjóðaði øllum skaptum til borð Tína gávanna og veitinganna; og við Tína náði, við hvørjari Tú svaraði, í Tínum egna Sjálvi, við Tínum orði "Ja" vegna øllum í himli og á jørð í tí tíma, tá ið Títt yvirræði og Tín stórleiki stóðu avdúkaði í tí lýsingastund, tá ið mátturin í Tínum ræði varð gjørdur opinberur. Og aftur bøni eg Teg við hesum mest vonu nøvnum, við hesum mest hábornu og gøvigu eginleikum, og við Tínari mest upphevjaðu minning, og við Tínum reina og lýtaleysa Fagurleika, og við Tínum loynda Ljósi í tí mest loynda skála, og við Tínum Navni, ílatið klæði líðinga hvønn morgun og hvørt kvøld, um at verja beraran av hesari Talvu og hvønn tann, sum lesur hana og hvønn tann, sum kemur fram á hana og hvønn tann, sum fer framvið tí húsi har hon er í. Røð Tú tá við henni hvønn ein sjúkan, ússaligan og fátækan frá hvørjari roynslu og neyð, frá hvørjari andstyggiligari líðing og sorg, og leið Tú við henni hvønn tann, ið ynskir at koma inn á gøtur Tínar leiðbeiningar og vegir Tínar fyrigevingar og náðinnar.

Tú ert sanniliga hin Máttmikli, hin Al-Nøktandi, hin Grøðandi, Verjin, hin Gevandi, hin Samkennandi, hin Al-Gávumildi, hin Al-Miskunnsami.

Bahá'u'lláh

# HJÁLP OG STUÐUL

O Tú Hvørs andlit er málið fyri mínari tilbiðjan, Hvørs fagurleiki er mín halgidómur, Hvørs bústaður er mítt mið, Hvørs lovprísan er mín vón, Hvørs forsjón er mín felagi, Hvørs kærleiki er orsøkin til mína tilveru, Hvørs umrøða er mín troyst, Hvør nærleiki er mín tráan, Hvørs hjávera er mítt kærasta ynski og mín størsta stundan, eg biði Teg inniliga um ikki at halda aftur frá mær tað, ið Tú fyriskrivaði teimum útvaldu av Tínum tænarum. Veit mær tí tað góða av hesum heimi og av tí næsta.

Tú ert, av sonnum, Kongur alra navna. Tað er eingin annar Guð enn Tú, hin Æviga-Fyrigevandi, hin Mest Gávumildi.

Bahá'u'lláh

Mín Guð, mín Tilbidni, mín Kongur, mín Tráan! Hvør tunga kann bera fram mína takk til Tín? Eg var líkasælur, Tú vakti meg. Eg hevði vent mær burtur frá Tær, Tú hjálpti mær náðiliga at venda mær ímóti Tær. Eg var eins og ein deyður, Tú upplívgaði meg við

lívsins vatni. Eg var visnaður, Tú endurnýggjaði meg við tí himmalska streymi Tínar talunnar, ið er floymdur fram frá Penni hins Al-Miskunnsama.

O Guddómliga Forsjón! Øll skapanin er gitin av tínari náði; sýt henni ikki vøtn Tíns gávumildis, halt henni ei heldur frá havi Tínar miskunnar. Eg bøni Teg um at hjálpa og styðla mær til allar tíðir og undir øllum umstøðum og eg søki frá himli Tíns stórsinnis Tín fyrndargamla tokka. Tú ert, av sonnum, Harri gávumildis og hin Ráðandi yvir kongsríki ævinleikans.

Bahá'u'lláh

Lovað veri Títt Navn, O Harri, Guð okkara! Tú ert av sonnum hin Vitandi um tað ósædda. Fyriskipa okkum slíkt gott, sum Tín alt-umfevnandi kunnleiki kann máta. Tú ert hin ovasti Harrin, hin Almáttugi, hin Hægst-Elskaði.

Øll lovprísan veri Tær, O Harri! Vit skulu leita til Tína náði á tí ásetta Degi og skulu seta alt okkara álit á Teg, sum ert okkara Harri. Hálovaður ert Tú, O Guð! Gev okkum tað, ið er gott og sømiligt, so at vit kunnu vera øllum uttan Tær fyri uttan. Sanniliga ert Tú Harri alra heima.

O Guð! Afturløna teimum, sum tolin halda út á Tínum døgum og styrk teirra hjørtu í at ganga ófrávíkjandi eftir Sannleikans gøtu. Gev tá, O Harri, slíkar góðar gávur, ið fara at gera tey før fyri at fáa atgongd inn í Títt eydnusæla Páradís. Upphevjaður ert Tú, O Harri Guð. Lat Tínar himmalsku vælsigningar dala niður tey heim hvørs íbúgvar hava trúð á Teg. Sanniliga, eingin er betur enn Tú til at senda niður guddómligar vælsigningar. Send út, O Guð, slíkar herskarar, ið skulu gera Tínar trúføstu tænarar sigursælar. Tú tilevnar alt tað skapta við megini í Tínum boði sum Tær lystir. Tú ert av sonnum hin Ovasti, Skaparin, hin Alvísi.

Sig: Guð er veruliga Framleiðarin av øllum lutum. Hann gevur føðslu í yvirflóð til hvønn sum helst sum Hann vil. Hann er Skaparin, Upphavið til allar verur, Tilevnarin, hin Almáttugi, Framleiðarin, hin Alvísi. Hann er Berarin av teimum mest frálíku heitunum um allar himlarnar og jørðina og um alt tað, ið er har ímillum. Øll gera eftir Hansara boðum og allir íbúgvar jarðarinnar og himmalsins hátíðarhalda Hansara lovprísan, og til Hansara skulu øll venda aftur.

Báb

O mín Guð, mín Harri og mín Meistari! Eg havi loyst meg frá mínum skyldfólki og havi gjøgnum Teg roynt at gerast óbundin av øllum, sum búgva á jørð, og altíð til reiðar at taka ímóti tí, sum er prísvert í Tínum eygum. Veit mær slíkt gott, ið fer at gera meg

leysan av øllum uttan Tær og gev mær ein størri skamt av Tínum endaleysa tokka. Sanniliga, Tú ert Harrin av ríkari ( abounding ) náði.

Báb

Harri! Neyðarslig eru vit, gev okkum Tína vælvild; fátøk, veit okkum ein part av havi Tíns ríkidømis; tørvandi, nøkta Tú okkum; eyðmýkt, gev okkum Tína dýrd. Fuglarnir í luftini og dýrini á markini fáa hvønn dag teirra kjøt frá Tær og allar verur fáa lut í Tínari umsorgan og miskunn.

Lat ikki hendan veika vera uttan Tína undursomu náði og veit við Tínum mátti hesari hjálparsleysu sál Títt gávumildi.

Gev okkum okkara dagliga breyð og játta Tína øking av lívsins áneyðum, so at vit kunnu gerast óbundin av øllum uttan Tær, kunnu vera fullkomiliga eitt við Teg, kunnu ganga Tínar vegir og kunngera Tínar loyndardómar. Tú ert hin Almáttugi og hin Elskandi og Uppihaldarin hjá allari mannaættini.

‘Abdu’l-Bahá

O Tú góði Harri! Vit eru tænarar av Tínari Gátt, ið leita sær skýli við Tínar heilugu Dyr. Vit sóknast ikki eftir nøkrum skjóli uttan hesari sterku súlu, venda okkum ikki til nakað hvíldarstað uttan Tína varðveitslu. Líva okkum, vælsigna okkum, stuðla okkum, ger okkum soleiðis, at vit bara skulu elska Tín góða tokka, bara hava fyri munni Tína lovprísan, bara fylgja sannleikans gøtu, so at vit kunnu gerast nóg rík til at vera fyri uttan alt uttan Teg og fáa okkara gávur úr Tínum góðgerðarhavi, at vit altíð kunnu stremba eftir at upphevja Tína Søk og breiða út Tínar søtu angar vítt og breitt, at vit kunnu gloyma okkum sjálvi og bara takast við Teg og avnokta alt annað og verða fangaði í Tær.

O Tú Uppihaldari, O Tú Fyrigevari! Gev okkum Tína náði og miskunn, Tínar gávur og Tínar veitingar og styðja okkum, so at vit kunnu náa okkara máli. Tú ert hin Máttmikli, hin Megnandi, hin Vitandi, hin Síggjandi og sanniliga, Tú ert hin Gávumildi og sanniliga, Tú ert hin Al-Miskunnsami og sanniliga, Tú ert hin Æviga-Fyrigevandi, Hann, ið vit eiga at angra fyri, Hann, ið fyrigevur sjálvt tær álvarsligastu syndir.

‘Abdu’l-Bahá

Tak ikki burtur, O Harri, tað veitsluborð, ið er reitt í Tínum Navni og sløkk ikki tann brennandi logan, ið er kyndur av Tínum økovandi eldi. Halt ikki aftur floyminum av

hasum livandi vatni Tínum, ið tutlar songlag Tìnar dýrdar og minningar og lat ikki Tínar tænarar vera uttan angan frá Tínum søta dámi, ið andar av sær Títt kærleiksluktilsi.

Harri! Broyt teir nívandi ekkar hjá Tínum heilugu til hvíld, teirra trongd til vælveru, teirra eyðmýking til dýrd, teirra sorg til sæla gleði, O Tú, sum hevur í Tínum taki teymar mannaættarinnar!

Tú ert, sanniliga, hin Eini, hin Staki, hin Mæti, hin Alvitandi, hin Alvísi.

‘Abdu’l-Bahá

## HJÚNABAND

*“Bahá’í-hjúnaband er sameining og hjartaligur alskur millum teir báðar partarnar. Tey mugu tó sýna allarstørsta ansni og gerast kunnug við lyndið hjá hvørjum øðrum. Hetta æviga band eigur at verða tryggjað við einum føstum sáttmála og ætlanin eigur at vera, at fostra samljóð, felagskap og eind og at fáa ævigt lív.” ‘Abdu’l-Bahá*

Hjúnabandslyftið, tað versið, ið skal sigast fram av brúður og brúðgómi hvør sær í hjáveruni av í minsta lagi tveimum vitnum, ið kunnu góðtakast av tí Andaliga Ráðnum, er, sum ásett í Kitáb-i-Aqdas ( Hin Mest Heilaga Bókin ):

*“Vit vilja øll, sanniliga, gera eftir Vilja Guðs”.*

Hann er Veitarin, hin Gávumildi!

Prís veri Guði, hinum Fyrndargamla, hinum Æviga-Verandi, hinum Óbroytandi, hinum Æviga! Hann, sum hevur vitnað í Sínari Egnu Veru, at Hann sanniliga er hin Eini, hin Staki, hin Ótarnaði, hin Upphevjaði. Vit bera vitnisburð um, at tað sanniliga ikki er nakar Guð uttan Hann, ímeðan vit ásanna Hansara einleika, játta Hansara stakleika. Hann hevur altíð búð í óatkomiligum hæddum, á tindum Síns háleiks, halgaður frá umrøðuni hjá nøkrum uttan Sær Sjálvum, fríur frá lýsingini hjá nøkrum uttan Sær.

Og tá ið Hann ynskti at sýna menniskjunum náði og góðgerð og at fáa heimin í rættlag, opinberaði Hann fyriskipanir og skapti lógir; harímillum setti Hann í gyldi lógina um hjúnaband, gjørdi hana til ein skansa fyri vælveru og bjarging og álegði okkum hana í tí, ið varð sent niður av himli halganar í Hansara mest Heilugu Bók. Hann sigur; stór er Hansara dýrd: “Giftist, O fólk, so at undan tykkum kann koma tann, ið fer at minnast Meg millum Mínar tænarar; hetta er eitt av Mínum boðum til tykkara; aktið tað sum eina hjálp til tykkum sjálvi.”

Bahá’u’lláh

Hann er Guð!

O makaleysi Harri! Í Tínum almáttuga vísdómi hevur Tú álagt fólkunum hjúnaband, so at ættarlið av menniskjum kunnu koma eftir hvørjum øðrum í hesum tilvildarliga heimi, og so at tey, so leingi sum heimurin varir, kunnu vera virkin við Gátt Tíns einleiks við trældómi ( servitude ) og tilbiðjan, við heiðranarkvøðu, alski og lovprísan. "Eg havi ikki skapað andar og menniskju, uttan til at tey skulu tilbiðja Meg" 1). Sameina Tú tí, í himli Tínar miskunnar, hesar báðar fuglar í reiðri Tíns kærleiks og ger at teir kunnu draga at sær áhaldandi náði; so at frá sameiningini av hesum báðum kærleikssjógvum ein alda av eymleika kann rísa upp og kasta perlur av reinum og góðum úrsliti uppá strond lívsins. "Hann hevur slept leysar teir báðar sjógvar, so at teir kunnu møta hvørjum øðrum: Millum teirra er eitt mark, ið teir ikki fara yvir um. Hvørja av gávum Harra tykkara vilja tit tá avsanna? Frá báðum alir Hann størri og smærri perlur"2).

O Tú góði Harri! Ger Tú at hetta hjúnaband kann ala korallir og perlur. Tú ert sanniliga hin Máttmikli, hin Mest Mikli, hin Æviga-Fyrigevandi.

'Abdu'l-Bahá

1) Koranin 51:56
2) Koranin 55:19 – 22

Dýrd veri Tær, O mín Guð! Sanniliga, hesin tænari Tín og hendan terna Tín eru komin saman undir skugganum av Tínari miskunn og tey eru sameind við Tínum tokka og hásinni. O Harri! Hjálp teimum í hesum Tínum heimi og Tínum kongsríki og fyriætla teimum alt tað góða við Tínum gávumildi og Tínari náði. O Harri! Staðfest tey í Tínum trældómi ( servitude ) og hjálp teimum í Tínari tænastu. Lat tey gerast tekin um Títt Navn í Tínum heimi og líva teimum við tínum veitingum, ið eru ótømandi í hesum heimi og hinum komandi heimi. O Harri! Tey biðja til kongsríki Tíns miskunnsemis og ákalla ríki Tíns stakleiks. Sanniliga, tey eru vígd í lýdni mótvegis Tínum boði. Fá tey til at gerast tekin um samljóð og eind líka til tíðarinnar enda. Sanniliga, Tú ert hin Alvaldi, hin Æviga-Hjástaddi og hin Almáttugi!

'Abdu'l-Bahá

O mín Harri, O mín Harri! Hesi bæði bjørtu himnahválv eru vígd í Tínum kærleika, samanbundin í trældómi ( servitude ) fyri Tína Heilugu Gátt, sameind í at tæna tínari Søk. Ger Tú, at hetta hjúnaband kann verða eins og at draga uppá tráð ljósini av Tínari ríku náði, O mín Harri, hin Al-Miskunnsami, og lýsandi geislar av Tínum veitingum, O

Tú hin Góðgerandi, hin Æviga-Gevandi, so at tað fara at greinast av hesum stóra træi kvistar, ið fara at vaksa seg grønar og blómandi við teimum gávum, ið regna niður úr Tínum skýggjum náðinnar.

Sanniliga, Tú ert hin Hásinnaði. Sanniliga, Tú ert hin Almáttugi. Sanniliga, Tú ert hin samkennandi, hin Al-Miskunnsami.

'Abdu'l-Bahá

# KVØLD

O mín Guð, mín Meistari, Málið fyri mínari tráan! Hesin tænari Tín sóknast eftir at sova í skýli Tínar miskunnar og at hvíla seg undir trónuhimli tínar náðinnar, ímeðan hann bønar um Tína umsorgan og tína verju.

Eg biði Teg, O mín Harri, við Tínum eyga, ið ikki svevur, um at verja míni eygu frá at skoða nakað uttan Teg. Styrk tá teirra sjón, so at tey kunnu síggja Tíni tekin og skoða havsbrúnna í tínari Opinbering. Tú ert Tann, sum, frammanfyri opinberingunum av Hvørs alvaldi, kjarni meginnar hevur skulvið.

Eingin Guð er uttan Tú, hin Almáttugi, hin Alt-Basandi, hin Ótreytaði.

Bahá'u'lláh

Hvussu kann eg velja at sova, O Guð, mín Guð, tá ið eygu teirra, ið leingjast eftir tær, vakja vegna teirra skilnaði frá Tær; og hvussu kann eg leggja meg niður at hvíla ímeðan sálirnar hjá teimum, ið elska Teg, eru hart plágaðar í teirra fjarleika frá Tínari hjáveru?

Eg havi, O Harri mín, lagt mín anda og alla mína veru í høgru hond tíns máttars og Tínar verjunnar og eg leggi mítt høvd niður á koddan við Tínari megi og lyfti tað upp eftir Tínum vilja og Tínari góðu fragd. Tú er, av sonnum, Varðveitarin, Vørðurin, hin Almáttugi, hin Mest Máttmikli.

Við Tínum mátti! Eg biði ikki, hvørki sovandi ella vakin, um annað enn tað, ið Tú ynskir. Eg eri Tín tænari og í Tínum hondum. Hjálp Tú mær náðiliga at gera tað, ið fer at geva frá sær angan av Tínari fragd. Hetta er, vissuliga, mín vón og vón teirra, ið eru Tær nær. Prísaður veri Tú, O Harri heimanna!

Bahá'u'lláh

*O søkjandi eftir Sannleika! Um tú ynskir, at Guð skal lata tíni eygu upp, so mást tú ákalla Guð inniliga, biðja til og samrøða við Hann á midnátt og siga:*

O Harri, eg havi vent mínum andliti ímóti Tínum kongsríki einleikans og eri søktur niður í Títt náðihav. O Harri, upplýs mína sjón við at skoða Tíni ljós í hesari myrku nátt og ger meg glaðan við víni Tíns kærleiks í hesari undursomu tíð. O Harri, fá meg til at hoyra Títt kall og lat upp fyri mínum andliti dyrnar til Tín himmal, so at eg kann síggja ljósið frá Tínari dýrd og gerast drigin at Tínum fagurleika.

Sanniliga, Tú ert Gevarin, hin Gávumildi, hin Miskunnsami, hin Fyrigevandi.

‘Abdu’l-Bahá

# LOVPRÍSAN OG TAKKSEMI

Øll lovprísan, O mín Guð, veri Tær sum ert Keldan til allan heiður og alla hátign, til stórleika og æru, til fullveldi og yvirvald, til háleika og náði, til ærufrykt og megi. Hvønn sum helst Tú vilt fært Tú til at nærkast tí Mest Stóra Havi og hvørjum sum helst Tú ynskir gevur Tú heiðurin at viðurkenna Títt Mest Fyrndargamla Navn. Av øllum, sum eru í himli og á jørð, kann eingin standa ímóti virksemi Tíns máttmikla Vilja. Í allar ævir hevur Tú stýrt allari skapanini og Tú fert at halda áfram til allar tíðir at útinna Títt yvirvald yvir øllum skaptum lutum. Tað er eingin annar Guð uttan Tú, hin Almáttugi, hin Mest Upphevjaði, hin Al-Máttmikli, hin Alvísi.

Upplýs, O Harri, andlitini hjá Tínum tænarum, so at teir kunnu skoða Teg; og reinska teirra hjørtu, so at teir kunnu venda sær til hov Tíns himmalska tokkas og viðurkenna Hann, sum er Manifestasjónin av Tínum Sjálvi og Degningur Tíns Kjarnas. Sanniliga, Tú ert Harri alra heima, Tað er eingin Guð uttan Tú, hin Ótvingaði, hin Alt-Basandi.

Bahá’u’lláh

Í Guðs Navni, hin Mest Høgi! Lovaður og heiðraður ert Tú, Harri, Alvaldi Guð! Tú frammanfyri Hvørs vísdómi hin vísi er við undirlutan og miseydnast, frammanfyri Hvørs kunnleika hin lærdi játtar sína fávitsku, frammanfyri Hvørs mátti hin sterki gerst veikur, frammanfyri Hvørs ríkidømi hin ríki vitnar um sína fátækt, frammanfyri Hvørs ljósi hin upplýsti er vilstur í myrkri, ímóti Hvørs kunnleiks halgidómi kjarnin í allari fatan vendur sær og melur rundan um Hvørs hjáveru allar sálir mala.

Hvussu kann eg tá syngja og fortelja um Tín kjarna, sum vísdómurin hjá teimum vísu og lærdómurin hjá teimum lærdu ikki hava megnað at fata, av tí at eingin kann syngja tað, ið hann ikki skilur, ei heldur siga frá tí, ið hann ikki kann náa, ímeðan Tú úr ævigum tíðum hevur verið hin Óatkomandi, hin Órannsakiligi. Máttleysur sum eg eri til at rísa upp til himlar Tíns heiðurs og til at sveima í ríkum Tíns kunnleiks, kann eg bara siga frá um Tíni tekin, ið geva boð um Títt stórfingna handverk.

Við Tínum Heiðuri! O Elskaði av øllum hjørtum, Tú, sum einsamallur kanst linna stingirnar í longslinum eftir Tær! Um so allir íbúgvar himmalsins og jarðarinnar sameinast til at heiðra tað minsta av Tínum teknum, í hvørjum og við hvørjum Tú hevur opinberað Teg Sjálvan, so høvdu teir kortini miseydnast, hvussu nógv meira um teir høvdu lovprísað Tínum heilaga Orði, skaparan av øllum Tínum teknum.

Øll lovprísan og allur heiður veri Tær, O Tú sum allir lutir hava vitnað um, at Tú ert Ein og at tað er eingin annar Guð enn Tú, sum úr ævigum tíðum hevur verið upphevjaður yvir allan javnlíka og líkskap og sum í allar ævir fer at verða verandi tann sami. Allir kongar eru bara Tínir tænarar og allar verur, sjónligar sum ósjónligar, sum einki frammanfyri Tær. Tað er eingin annar Guð uttan Tú, hin Náðiligi, hin Máttmikli, hin Mest Høgi.

Bahá'u'lláh

Lovað veri Títt navn, O Harri mín Guð! Tú ert Tann sum allir lutir tilbiðja og sum ongan tilbiður, sum er Harri alra luta og er undirsátti hjá ongum, sum kennur allar lutir og er kendur av ongum. Tú ynskti at gera Teg Sjálvan kendan av menniskjum; tískil fekst Tú, við einum orði av Tínum munni, skapanina at blíva til og tilevnaði alheimin. Tað er eingin annar Guð uttan Tú, Tilevnarin, Skaparin, hin Almáttugi, hin Mest Máttmikli.

Eg bøni Teg, við hesum sama orði, ið er skinið fram yvir havsbrúgv Títns vilja, um at gera meg føran fyri at drekka djúpt av teimum livandi vøtnum, ið Tú hevur vakt hjørtuni hjá Tínum útvaldu til lívs við og eggjað sálir teirra, ið elska Teg, so at eg kann, til allar tíðir og undir øllum umstøðum venda mínum andliti til fulnar ímóti Tær.

Tú ert Guð meginnar, heiðursins og gávumildis. Eingin Guð er uttan Tú, hin Hægsti Stjórnarin, hin Al-Heiðurligi, hin Alvísi.

Bahá'u'lláh

Heiðraður ert Tú, O Harri mín Guð! Eg veiti Tær takk fyri at hava gjørt meg føran fyri at viðurkenna Manifestasjónina av Tær Sjálvum og fyri at hava slitið meg frá mínum fíggindum og avdúkað fyri mínum eygum teirra misgerðir og óndu gerningar á Tínum døgum og fyri at hava fríað meg frá øllum sambandi við teir og fingið meg til at venda mær fult og heilt mótvegis Tínari náði og Tínum gávumilda tokka. Eg gevi Tær eisini takk fyri at hava sent tað niður til mín, úr skýggjum Títns vilja, ið hevur halgað meg frá tilsipingum heidniganna og ábendingum teirra vantrúgvandi í slíkan mun, at eg havi fest mítt hjarta fast á Teg og eri flýddur undan slíkum, ið hava avnoktað ljósið frá Tínari ásjón. Aftur takki eg Tær fyri at hava givið mær megina til at vera stinnur í Tínum kærleika og til at bera fram Tína lovprísan og at hevja til skýggja Tínar dygdir og fyri at

hava givið mær at drekka av bikari Tínar miskunnar, ið ber av øllum lutum, sjónligum og ósjónligum.

Tú ert hin Almáttugi, hin Mest Upphevjaði, hin Al-Dýrdarligi, hin Al-Elskandi.

Bahá’u’lláh

Prísaður veri Tú, O Harri mín Guð! Hvørja ferð eg royni at nevna Teg verði eg forðaður av dýrdini í Tínum tignarstigi og av tí avmannandi stórleikanum í Tínum mátti. Tí um eg so prísaði Tær so langt sum Títt yvirvald røkkur og Títt fullveldi varir, so hevði eg varnast, at mín prísan av Tær hóskar seg bara fyri tey, ið eru lík mær, ið sjálvi eru Tínir skapningar og, sum eru skapt við megini í Tínum boði og tilevnaði við styrkini í Tínum vilja. Og nær sum helst mín pennur kannar ( ascribeth ) nøkrum av Tínum Nøvnum heiður haldi eg meg hoyra rødd klagu hansara í hansara fjarleika frá Tær og kann hóma grát hansara vegna hansara skilnað frá Tínum Sjálvi. Eg vitni, at alt uttan Tú bara er Tín skapan og er í Tínum valdi. At hava góðtikið nakra gerð ella lovprísan frá Tínum skapningum er bert eitt prógv um undrini í Tínari náði og Tínum gávumilda tokka og ein manifestasjón av Tínum hásinni og Tínari forsjón.

Eg bøni Teg, O mín Harri, við Tínum Mest Mikla Navni, ið Tú hevur skilt ljósi frá eldi við, og sannleika frá noktan, um at senda niður til mín og til tey av mínum kæru, sum eru saman við mær, tað góða av hesum heimi og av tí næsta. Veit okkum tá tínar undursomu gávur, ið eru fjaldar frá eygum menniskjunnar. Tú ert, sanniliga, Tilevnarin av allari skapanini. Eingin Guð er uttan Tú, hin Almáttugi, hin Al-Dýrdarligi, hin Mest Høgi!

Bahá’u’lláh

Øll hátign og dýrd, O mín Guð, og alt yvirvald og ljós og stórfingni og allur ljómi veri Tær. Tú veitir hvørjum Tú vilt fullveldi og heldur tí aftur frá hvørjum Tú ynskir. Eingin Guð er uttan Tú, hin Al-Eigandi, hin Mest Upphevjaði. Tú ert Tann, ið skapar úr ongum alheimin og alt tað, sum er í honum. Tað er einki sum eigur teg uppibornan uttan Tú Sjálvur, ímeðan alt annað uttan Tú er eins og heimleist í Tínari heilugu hjáveru og er eins og einki, tá ið tað verður samanborið við tign Tínar Egnu Verunnar.

Langt veri tað seg frá mær, at lovsyngja Tínum dygdum uttan við tí, ið Tú hevur lovsungið Tær Sjálvum við í Tínari sannførandi Bók, har Tú sigur: “Eingin sjón fevnir um Hann, men Hann fevnir um alla sjón. Hann er hin ( Subtile ), hin Al-Fatandi” 1). Heiður veri Tær, O mín Guð, av sonnum kann eingin hugi ella sjón, hvussu gløgg ella skynsom tey so eru, nakrantíð skilja náttúruna hjá tí mest ótýðandi av Tínum teknum. Sanniliga, Tú ert Guð, eingin Guð er uttan Tú. Eg vitni, at Tú Sjálvur einsamallur ert tað

einasta útlátið ( expression ) fyri Tínar eginleikar, at lovprísanin hjá ongum uttan Tær kann nakrantíð náa Títt heilaga hov, ei heldur kunnu Tínir eginleikar nakrantíð verða fataðir av nøkrum uttan Tær Sjálvum.

Heiður vri Tær, Tú ert hevjaður yvir lýsingina hjá nøkrum uttan Tær Sjálvum, við tað, at tað er omanfyri menniskjaliga fatan, at lova Tínum dygdum á hóskandi hátt ella at skilja tann innasta veruleikan í Tínum Kjarna. Langt veri tað seg frá Tínum heiðuri, at Tínir skapningar skulu lýsa Teg ella at nakar uttan Tú skuldi nakrantíð kent Teg. Eg havi kent Teg, O mín Guð, av tí at Tú hevur gjørt Teg Sjálvan kendan fyri mær, tí at um Tú ikki hevði havt opinberað Teg Sjálvan fyri mær, so hevði eg ikki kent Teg. Eg tilbiði Teg tí at Tú hevur kalla meg til Tín, tí at um tað ikki var fyri Tínari kallan, so hevði eg ikki havt tilbiðið Teg.

Báb

1) Koranin: 6:103

# MANNAÆTTIN

Mín Guð, sum eg tilbiði og elski inniliga! Eg vitni um Tína eind og Tín einleika og viðurkenni Tínar gávur, bæði í fortíðini og nú. Tú ert hin Al-Gávumildi, Hvørs miskunnar yvirfloymandi skúrar hava regnað niður á høg og lág í sama mun, og Hvørs náðiglampar eru kastaðir á bæði tey lýdnu og tey uppreistrarhugaðu.

O Guð miskunnar, frammanfyri Hvørs dyr kjarni miskunnar hevur boygt seg niður, og rundan um halgidóm Hvørs Sakar kærleikin, í sínum innasta anda, hevur malið, vit bøna Teg, biðja inniliga um Tína fyrndargomlu náði og sóknast eftir Tínum hjáverandi tokka, um at Tú fert at hava miskunn við øllum, ið eru manifestasjónir av heimi verunnar, og ikki fert at sýta teimum úthellingarnar av Tínari náði á Tínum døgum.

Øll eru bara fátøk og neyðstødd og Tú, sanniliga, ert hin Al-Eigandi, hin Alt-Basandi, hin Al-Máttmikli.

Bahá'u'lláh

O Tú samkennandi Harri, Tú sum ert hásinnaður og dugandi! Vit eru Tínir tænarar, vardir undir Tínari forsjón. Kasta eygnabragd Tínar vælvildar á okkum. Gev ljós til okkara eygu, hoyrn til okkara oyru og skil og kærleika til okkara hjørtu. Ger okkara sálir glaðar og eydnusælar við Tínum fróu tíðindum. O Harri! Vís okkum á gøtu Tíns kongsríkis og fá okkum til lívs aftur við andadráttum Heilaga Andans. Veit okkum ævigt lív og gev okkum støðugan heiður. Sameina mannaættina og upplýs heim menniskjunna. Gævi vit øll fylgdu Tínari gøtu, longdust eftir Tínari fragd og sóknaðust

eftir loyndardómum Tíns kongsríkis. O Guð! Sameina okkum og bind saman okkara hjørtu við Tínum óupploysiliga bandi. Saniliga, Tú ert Gevarin, Tú ert hin Vinaligi og Tú ert hin Almáttugi.

‘Abdu’l-Bahá

O Tú blíði Harri! O Tú sum ert hásinnaður og miskunnsamur! Vit eru tænarar Tínar gáttar og eru savnaði undir lívandi skugga Tínar guddómligu eindar. Sól Tínar miskunnar skínir á okkum øll. Tínar gávur fevna um øll, Tín elskandi forsjón heldur øllum uppi, Tín verja yvirskuggar øll og eygnabrøgd Tíns tokka eru kastaði á øll. O Harri! Gev Tínar óendaligu veitingar og lat ljós Tínar leiðbeiningar skína. Upplýs eyguni, gleð hjørtuni við varandi frøi. Gev øllum fólkum ein nýggjan anda og veit teimum ævigt lív. Læs upp portur teirru sonnu fatanar og lat ljós trúarinnar skína bjart. Savna saman øll fólk undir skugga Tíns gávumildis og fá tey til at fylkjast í samljóði, so at tey kunnu gerast eins og geislarnir frá einari sól, bylgjurnar á einum havi, og fruktirnar á einum træi. Máttu tey drukki av somu keldu. Máttu tey verði svalaði av sama loti. Máttu tey fingi upplýsing frá somu ljóskeldu. Tú ert Gevarin, hin Miskunnsami, hin Alvaldi.

‘Abdu’l-Bahá

O Tú blíði Harri! Tú hevur skapað alla mannaættina úr sama buli. Tú hevur fyriskipað, at øll skulu hoyra til sama húsarhald. Í Tínari Heilugu Hjáveru eru tey øll Tínir tænarar og øll mannaættin er vard undir Tínum Tabernakli; øll eru komin saman við Títt Borð Gávumildis; øll eru upplýst við ljósi Tínar Forsjónar.

O Guð! Tú ert vinaligur við øll, Tú hevur sæð til øll, gevur lívd til øll, veitur øllum lív, Tú hevur gjørt hvønn einstakan út við gávum og førleikum og øll eru søkt niður í Hav Tínar Miskunnar.

O Tú blíði Harri! Sameina øll. Lat trúgvirnar semjast og ger tjóðirnar til eitt, so at tær kunnu síggja hvørja aðra sum eina familju og alla jørðina sum eitt heim. Máttu tær allar liva saman í fullkomnum samljóði.

O Guð! Lyft høgt upp merkið fyri einleika mannaættarinnar.

O Guð! Stovna hin Mest Mikla Friðin.

Knýt Tú, O Guð, hjørtuni fast saman.

O Tú blíði Faðir, Guð! Gleð okkara hjørtu við anga Tíns kærleiks. Ger okkara eygu gløggari við Ljósi Tínar Leiðbeiningar. Frø okkara oyru við songlagi Títt Orðs, og gev okkum øllum lívd í Skansa Tínar Forsjónar.

Tú ert hin Mæti og Máttmikli, Tú ert hin Fyrigevandi og Tú ert Tann, sum ber yvir við ófullkomleikunum hjá øllum menniskjum.

‘Abdu’l-Bahá

## MORGUN

O mín Guð og mín Meistari! Eg eri Tín tænari og sonur Tín tænara. Eg havi reist meg úr mínari legu í hesari morgunstund, tá ið Morgunstjørna Tíns einleiks hevur skinið úr Degningi Tíns vilja og hevur kastað sín ljóma á allan heimin í samsvari við tað, ið var fyriskipað í Bókum Tínar Avgerðar.

Prís veri Tær, O mín Guð, at vit eru vaknaði til glamparnar av ljósi Tíns kunnleiks. Send tá niður á okkum tað, O mín Harri, ið fer at gera okkum før fyri at vera uttan nakran uttan Teg og fer at fría okkum frá øllum tilknýti til nakað uttan Teg. Skriva harumframt niður fyri mær og fyri teimum, ið eru mær kær, og fyri mínum skyldfólki, bæði monnum og kvinnum, tað góða av hesum heimi og hinum komandi heimi. Varðveit okkum tá við Tínari ósvitaligu verju, O Tú hin Elskaði av allari skapanini og Tráanin hjá øllum alheiminum, frá teimum, ið Tú hevur fingið til at vera manifestasjónirnar av tí Ónda Teskara, sum teskar í bróstum menniskjanna. Máttugur ert Tú til at fremja Tína fragd. Tú ert, sanniliga, hin Almáttugi, Hjálpin í Neyðini, hin Sjálv-Uppihaldandi.

Vælsigna Tú, O Harri mín Guð, Hann, sum Tú hevur sett yvir Tíni mest frálíku Heiti, og við Hvørjum Tú hevur gjørt skilnað millum tey gudsóttandi og tey óreinu, og hjálp okkum náðiliga at gera tað, ið Tú elskar og ynskir. Vælsigna Tú harumframt, O mín Guð, tey, ið eru Tíni Orð og Tínir Bókstavir, og tey, ið hava vent sínum andlitum mótvegis Tær og lurtað eftir Tínum Kalli.

Tú ert, vissuliga, Harrin og Kongurin yvir øllum menniskjum og ert máttugur yvir allar lutir.

Bahá’u’lláh

Eg eri vaknaður í Tínum skýli, O mín Guð, og tað sømir seg honum, ið søkir tað skýlii, at dvølja í Halgidómi Tínar lívdar og Skansa Tínar verjunnar. Upplýs mína innaru veru, O mín Harri, við glampunum frá Degningi Tínar Opinberingar, eins og Tú upplýsti mína ytru veru við morgunljósi Tíns tokka.

Bahá’u’lláh

Eg havi reist meg hendan morgun við Tínari náði, O mín Guð, og eri farin frá mínum heimi ímeðan eg líti fullkomiliga á Teg og lati meg sjálvan í Tína varðbveitslu. Send tá niður á meg úr himli Tínar miskunnar, eina vælsigning frá Tær og ger meg føran fyri at

venda trygt heimaftur, eins og Tú gjørdi meg føran fyri at fara avstað undir Tínari verju við mínum tonkum óvikandi festum á Tær.

Tað er eingin annar Guð uttan Tú, hin Eini, hin Ósamanberiligi, hin Alvitandi, hin Alvísi.

Bahá'u'lláh

Eg gevi Tær prís, O mín Guð, fyri at Tú hevur vakt meg úr mínum svøvni og fingið meg aftur í ljósmála aftaná mína hvørving og lyft meg upp úr mínum blundi. Eg eri vaknaður hendan morgunin við mínum andliti vendum ímóti glampunum frá Morgunstjørnu Tínar Opinberingar, sum himlar Tínar meginnar og Tínar hátignar eru upplýstir við, ímeðan eg viðurkenni Tíni tekin, trúgvi á Tína Bók og haldi fast í Tín Strong.

Eg bøni Teg, við mátti Tíns vilja og tvingandi megi Tínar ætlanar, um at gera úr tí, ið Tú opinberaði fyri mær í mínum svøvni, til tað tryggasta grundarlagið undir borgum Tíns kærleiks, sum eru í hjørtunum á Tínum elskaðu, og tað besta tólið fyri opinberingina av teknum Tínar náðinnar og Tínar elskandi góðvildar.

Fyriskipa Tú mær við Tínum mest upphevjaða Penni, O mín Harri, tað góða av hesum heimi og tí næsta. Eg vitni, at í Tínum taki heldur Tú í teymunum hjá øllum lutum. Tú broytir teir sum Tær lystir. Eingin Guð er uttan Tú, hin Sterki, hin Trúfasti.

Tú ert Tann, sum við Sínum boðum broytir mannminkan til heiður og veikleika til styrki og máttloysi til megi og ótta til rógv og iva til vissu. Eingin Guð er uttan Tú, hin Mæti, hin Góðgerandi.

Tú vónsvíkur ongan, ið hevur leitað sær til tín, ei heldur heldur Tú nøkrum aftur frá Tær, ið hevur tráað eftir Tær. Fyriskipað Tú mær tað, ið sømir seg himli Tíns hásinnis og havi Tíns gávumildis. Tú ert, sanniliga, hin Almáttugi, hin Mest Máttmikli.

Bahá'u'lláh

# ROYNSLUR OG TRUPULLEIKAR

Fá mína sorg til at hvørva við Tínum gávumildi og hásinni, O Guð mín Guð, og rek burtur mína hvøl við Tínum yvirvaldi og Tínum mátti. Tú sært meg, O mín Guð, við mínum andliti vendum mótvegis Tær í einari stund, tá ið sorgir hava ringt seg um meg á øllum síðum. Eg bøni Teg, O tú, sum ert Harri yvir øllum, ið er til, og yvirskýggjar bæði tað sjónliga og tað ósjónliga, við Tínum Navni, sum Tú hevur sigrað á hjørtum og sálum menniskjanna við, og við bylgjunum á Tínum miskunnarhavi og glampunum frá Morgunstjørnu ínar náðinnar, um at telja meg millum tey, ið einki hevur rætt frá at venda sínum andlitum mótvegis Tær, O Tú Harri alra navna og Skapari himlanna!

Tú sært, O mín Harri, alt tað, ið hent mær á Tínum døgum. Eg biði Teg inniliga við Honum sum er Degningurin fyri Tínum nøvnum og Lýsingarstaðið fyri Tínum

eginleikum, um at fyriskipa mær tað, ið fer at gera meg føran fyri at reisast til at tæna Tær og at lovsyngja Tínar dygdir. Tú ert, sanniliga, hin Almáttugi, hin Mest Máttmikli, sum er vanur at svara bønunum hjá øllum menniskjum!

Og, at enda, bøni eg Teg við ljósinum frá Tínum andlitsbragdi, um at vælsigna tað, sum eg takist við, og innloysa mínar skuldir og nøkta mínar tørvar. Tú ert Tann Hvørs megi og vald hvør tunga hevur vitnað um og Hvørs hátign og yvirvald hvørt fatandi hjarta hevur ásannað. Eingin Guð er uttan Tú, sum hoyrir og er til reiðar at svara.

Bahá’u’lláh

Lovaður og prísaður veri Tú, O mín Guð! Eg bøni Teg við suffunum frá teimum, ið elska Teg og við tárunum hjá teimum, ið leingjast eftir at skoða Teg, um ikki at halda aftur frá mær Tína blíðu miskunn á Tínum Degi, ei heldur at lata meg vera uttan songløgini hjá tí Dúgvu, ið lovsyngur Tínum einleika frammanfyri ljósinum, ið skínur av Tínum andliti. Eg eri tann, sum er í ólukku, O Guð! Síggj meg halda fast í Tínum Navni, hin Alt-Eigandi. Eg eri tann, sum við vissu fer at doyggja; síggj meg krøkja meg í Títt Navn, hin Óforgeingiligi. Eg bøni Teg tí við Tær Sjálvum, hin Upphevjaði, hin Hægsti, um ikki at lata meg upp í hendurnar á mær sjálvum og á tráanunum hjá einum spiltum lyndi. Halt í mínari hond við hond Tínar meginnar og bjarga mær úr dýpunum í mínum heilaspunum og innantómu tilhugsanum og reinsa meg fyri alt, ið er andstyggiligt fyri Tær.

Fá meg, síðan, at venda mær heilt ímóti Tær, at seta alt mítt álit á Teg, at leita upp Teg sum mítt skjól og at flýggja til Títt andlit. Tú ert, sanniliga, Tann, sum við megini í Sínum mátti ger tað, sum Honum lystir og gevur boð, við styrki Síns vilja, um tað, ið Hann velur. Eingin kann standa ímóti virksemi Tínar avgerðar; eingin kann broyta gongdina hjá Tínari áseting. Tú ert, vissuliga, hin Almáttugi, hin Al-Dýrdarligi, hin Mest Gávumildi.

Bahá’u’lláh

O Tú Hvørs roynslur eru ein grøðandi heilivágur fyri tey, ið eru Tær nær, Hvørs svørð er tann brennandi tráanin hjá øllum teimum, ið elska teg, Hvørs spjót er tað kærasta ynskið hjá teimum hjørtum, ið leingjast eftir Tær, Hvørs boð er tann einasta vónin hjá teimum, ið hava viðurkent Tín sannleika! Eg bøni Teg við Tínum guddómliga søtleika og við dýrdarglampunum frá Tínum andliti, um at senda niður til okkara úr Tínum friðskjóli í tí høga tað, ið fer at gera okkum før fyri at nærkast Tær. Set tá okkara føtur fast niðurá, O mín Guð, í Tínari Søk og upplýs okkara hjørtu við ljóma Tíns kunnleiks og varpa ljós á okkara bróst við bjartleika Tína navnanna.

Bahá’u’lláh

Dýrd veri Tær, O mín Guð! Um tað ikki var fyri teir mótburðir, ið eru toldir á Tínari gøtu, hvussu kundu Tínir sonnu elskarar verði ásannaðir; og um tað ikki var fyri tær roynslur, ið verða bornar av kærleika fyri Tær, hvussu kundi tignarstig teirra, ið tráleingjast eftir Tær, verið opinberað? Felagarnir hjá øllum teimum, ið tilbiðja Teg, eru tey tár, ið tey fella og troystarnir hjá teimum, ið sóknast eftir Tær, eru tey suffini, ið tey geva frá sær, og føðin hjá teimum, ið skunda sær at møta Tær, eru pettini av teirra soraðu hjørtum.

Hvørt søtur eftir mínum smakki er beiskleiki deyðans, ið er liðin á Tínari gøtu og hvørt dýrabær eftir mínari meting eru spjótini hjá Tínum fíggindum, tá ið tey verða møtt fyri upphevjanini av Tínum orði! Lat meg drekka í Tínari Søk, O mín Guð, hvat sum helst, ið Tú ynskir og send niður til mín í Tínum kærleika alt tað, ið Tú fyriskipaði. Við Tínari dýrd! Eg ynski bara tað, ið Tú ynskir og verji bara um tað, ið Tú verjir um. Á Teg havi eg, til allar tíðir, sett alt mítt álit og treysti.

Reis upp, tað bøni eg Teg, O mín Guð, sum hjálparar hjá hesari Opinbering slík, ið skulu verða mett verd Títt navn og Títt fullveldi, so at tey kunnu minnast meg millum Tínar skapningar og heysa fløgg Tíns sigurs í Tínum landi.

Máttugur ert Tú til at gera tað, ið Tær lystir. Eingin Guð er uttan Tú, Hjálpin í Neyðini, hin Sjálv-Uppihaldandi.

Bahá’u’lláh

Lovaður ert Tú, O Harri mín Guð! Hvørt menniskja við innliti játtar Títt fullveldi og Títt yvirvald og hvørt skynsamt eyga sær stórleikan í Tínari hátign og tí tvingandi megina í Tínum mátti. Roynsluvindarnir eru máttleysir at halda aftur teimum, ið hava næra atgongd til Tín, frá at venda sínum andlitum mótvegis havsbrúgv Tínar dýrdar og royndarstormarnir fara ikki at megna at draga burtur og forða teimum, ið eru fullkomiliga trúgv mótvegis Tínum vilja, í at nærkast Tínum hovi.

Mær tykist, at lampa Tíns kærleiks brennur í teirra hjørtum og ljós Tíns eymleiks er tendrað í teirra bróstum. Mótburðir eru ikki førir fyri at styggja tey frá Tínari Søk og umskifti lagnunnar kunnu ongantíð fáa tey at villa seg burtur frá Tínari fragd.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við Teimum og við suffunum, ið teirra hjørtu geva frá sær í teirra skilnaði frá Tær, um at varðveita tey frá ónáðunum hjá Tínum fíggindum og at føða teirra sálir við tí, ið Tú hevur fyriskipað Tínum elskaðu, ið eingin ótti skal koma á og sum ikki skulu fáast at syrgja.

Bahá’u’lláh

Er tað nakar Burturbeinari av trupulleikum uttan Guð? Sig: Prísaður veri Guð! Hann er Guð! Øll eru Hansara tænarar og øll gera eftir Hansara boðum!

Báb

Sig: Guð er nøktandi fyri øllum fram um alt annað og einki í himlunum ella á jørð er nøktandi uttan Guð. Sanniliga, Hann er í Sær Sjálvum hin Vitandi, hin Uppihaldandi, hin Alvaldi.

Báb

Eg biði Teg við Tínari megi, O mín Guð! Lat einki ilt kringseta meg í roynslunnar stundum og í teimum løtum, tá ið eg eri gáloysin, stýr mínum fótafetum á rætta leið við Tínum íblástri. Tú ert Guð, mentur ert Tú til at gera sum Tær lystir. Eingin kann standa ímóti Tínum vilja ella tálma Tínari Ætlan.

Báb

O Harri! Tú ert Burturbeinarin av hvørjari kvøl og Útrekarin av hvørjari plágu. Tú ert Tann, sum fær at hvørva hvørja sorg og fríar hvønn ein træl, Bjargarin av hvørjari sál. O Harri! Veit mær endurloysn við Tínari miskunn og tel meg millum teir av Tínum tænarum, ið hava vunnið bjarging.

Báb

Tú veitst fullvæl, O mín Guð, at sorgir eru oystar á meg úr øllum ættum og at eingin kann burturbeina ella broyta tær uttan Tú. Eg veit við vissu, av mínum kærleika fyri Tær, at Tú ongantíð fert at fáa sorgir at raka nakra sál uttan so at Tú ynskir at upphevja hennara tignarstig í Tínum himmalska Páradísi og at stíva av hennara hjarta í hesum jørðiska lívi við verjugarði Tínar alt-tvingandi meginnar, so at tað ikki fer at hella seg ímóti fáfongdum hendan heims. Tú ert av sonnum væl vitandi um at eg undir øllum umstøðum vildi vart nógv meira um minningina um Teg enn um ognarrættin til alt tað, sum er í himlunum og á jørðini.

Styrk mítt hjarta, O mín Guð, í Tínum lýdni og í Tínum kærleika og gev, at eg kann vera fríur fyri øllum skaranum av Tínum mótstøðufólkum. Sanniliga, eg svørji við Tínari dýrd, at mær ikki tráleingist eftir nøkrum uttan Tær, ei heldur ynski eg mær nakað uttan Tína miskunn, ei heldur eri eg bangin fyri nøkrum uttan Tínum rættvísi. Eg

bøni Teg um at fyrigeva mær og eisini teimum, ið Tú ert góður við, á tann hátt sum Tær lystir. Sanniliga, Tú ert hin Almáttugi, hin Gávumildi.

Ómetaliga upphevjaður ert Tú, O Harri himlanna og jarðarinnar, yvir lovprísanina hjá øllum menniskjum og mátti friður veri við Tínum trúføstu tænarum og dýrd veri Guði, Harri alra heimanna.

Báb

O Harri, mín Guð og mín Havn í mínari neyð! Mín Vernd og mín Lívd í mínari vei! Mín Griðstaður og mítt Skjól í trongdarstund og mín Felagi í mínum einsemi! Mín uggi í mínari kvøl og í mínum skilnaði ein hollur vinur! Burturbeinarin av mínum sorgarstingum og Fyrigevarin av mínum syndum!

Eg vendi mær fullkomiliga til Tín og bøni Teg inniliga av øllum mínum hjarta, mínum huga og mínari tungu um at verja meg frá øllum tí, sum gongur ímóti Tínum vilja í hesari ringrásini av Tínari guddómligu eind og, at reinska meg fyri allari dálkan, ið fer at forða mær í at leita upp, blettaleysur og ódálkaður, skuggan av træi Tínar náðinnar.

Hav miskunn, O Harri, við tí veika, ger tann sjúka heilan og sløkk tann brennandi tostan.

Ger glaðan tann barm, sum eldur Títs kærleiks ríkur í og fá hann at gløða við loganum av Tínum himmalska kærleika og anda.

Lat tabernakul teirru guddómligu eindar í klæði heilagleikans og set á mítt høvd krúnu Títs tokka.

Upplýs mítt andlit við ljómanum frá himinknøtti Títt gávumildis og náðiliga hjálp mær at tæna við Tína heilugu gátt.

Fá mítt hjarta at flóta yvir av kærleika fyri Tínum skapningum og gev, at eg kann gerast teknið um Tína miskunn, merkið fyri Tínari náði, fremjarin av samljóði millum Tíni elskaðum trúgvur ímóti Tær, havandi á munni Tína minning og gloymskur um meg sjálvan, men altíð ansin um tað, ið er Títt.

O Guð, mín Guð! Halt ikki aftur frá mær teir mildu vindar Tínar fyrigevingar og náðinnar og lat meg ikki vera uttan keldu Tínar hjálpar og Títs tokkans.

Undir skugganum av Tínum verjandi veingjum lat meg liggja fjálgur og hveit at mær við Tínum al-verjandi eyga.

Loys mína tungu til at lova Tínum navni millum Títt fólk, so at mín rødd kann verða hevjað í stórum samkomum og, at av mínum varrum kann streyma flóðin av Tínari lovprísan.

Tú ert, av sonnum, hin Náðiligi, hin Hálovaði, hin Mæti, hin Alvaldi.

'Abdu'l-Bahá

Hann er hin Samkennandi, hin Al-Gávumildi! O Guð, mín Guð! Tú sært meg, Tú kennur meg; Tú ert mín Havn og mítt Skjól. Ongan havi eg at sóknast eftir, ei heldur fari eg at sóknast eftir nøkrum uttan Tær; onga gøtu havi eg gingið, ei heldur fari eg at ganga nakra uttan gøtu Tíns kærleiks. Í tí myrku nátt vónloysis vendur mítt eyga sær væntandi og fult av vón til morgun Tíns endaleysa tokka og í degningsløtuni verður mín burturfánaða sál endurnýggjað og styrkt í minningini um Tín fagurleika og fullkomileika. Hann, ið náði Tínar miskunnar hjálpir, hóast um hann bara er ein dropi, skal gerast eitt markleyst hav, og tað berasta atomið, ið úthellingin av Tínum kærleika stuðlar, skal skína sum ein geislandi stjørna.

Lívga undir verju Tínari, O Tú Andi reinleikans, Tú sum ert hin Al-Gávumildi Uppihaldarin, hendan bergtikna, kveikta tænara Tín. Hjálp honum í hesum heimi verunnar at verða verandi stinnur og fastur í Tínum kærleika og gev, at hesin vongbrotni fuglur kann fáa skjól og lívd í Tínum guddómliga reiðri, ið er uppi á tí himmalska træi.

'Abdu'l-Bahá

O mín Harri, mín Elskaði, mín Tráan! Ver hjá mær í mínum einsemi og fylg mær í mínari útlegd. Tak burtur mína sorg. Fá meg til at halga meg Tínum fagurleika. Tak meg burtur frá øllum uttan Tær. Drag meg við Tínum angum av heilagleika. Fá meg í Tínum Kongsríki at verða sameinda við tey, sum eru slitin leys frá øllum uttan Tær, ið leingjast eftir at tæna Tínari heilugu gátt og, sum arbeiða stinn í Tínari Søk. Ger meg føran fyri at vera ein av Tínum ternum, ið eru náddar Tínum góða tokka. Sanniliga, Tú ert hin Náðiligi, hin Gávumildi.

'Abdu'l-Bahá

# STÓRSIGUR SAKARINNAR

Lovað veri Títt navn, O Harri mín Guð! Myrkur er komið yvir øll londini og kreftir ónáðinnar hava ringt seg um allar tjóðirnar. Ígjøgnum tær síggi eg kortini glampar Tíns vísdóms og hómi bjartleikan av ljósi Tínar forsjónar.

Tey, ið eru stongd úti frá Tær sum av einum sløri, hava hugsað sær, at tey hava megina til at sløkkja Títt ljós og at køva Tín eld og at stilla vindar Tínar náðinnar. Nei, og um hetta ber Tín máttur mær vitnisburð! Um ikki hvør sorg hevði verið gjørd til at vera berari av Tínum vísdómi og hvør roynsla at vera miðil fyri Tínari forsjón, so hevði eingin torað at sett seg upp ímóti okkum, sjálvt um maktir jarðarinnar og himmalsins sameindust ímóti okkum. Um eg hevði greitt teir undursomu loyndardómar tíns vísdóms, ið eru opinberir frammanfyri mær, so høvdu teymarnir hjá Tínum fíggindum verið kvettir sundur.

Lovprísaður veri Tú tá, O mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum Mest Mikla Navni, um at savna tey, ið elska Teg, um tí Lóg, ið floymir frá góðu fragd tíns vilja, og at senda niður til tey tað, ið fer at vissa teirra hjørtu.

Máttugur ert Tú til at gera tað, ið Tær lystir. Tú ert, sanniliga, Hjálpin í Neyðini, hin Sjálv-Uppihaldandi.

Bahá'u'lláh

Dýrd veri Tær, O Harri, Tú sum hevur gjørt, at allir skaptir lutir eru blivnir til við megini í Tínum boði.

O Harri! Hjálp teimum, ið hava avkannað sær alt annað enn Teg og gev teimum ein stóran sigur. Send niður til tey, O Harri, herskarar av einglunum í himli og á jørð og allastaðni harímillum, fyri at standa við liðina hjá Tínum tænarum, at hjálpa teimum og at styrkja teir, at gera teir førar fyri at fáa viðgang, at styðja teimum, at umgyrða tey við dýrd, at veita teimum æru og upphevjan, at ríka tey og gera tey sigursæl við einum undursomum stórsigri.

Tú ert teirra Harri, Harri himlanna og jarðarinnar, Harri alra heimanna. Styrk hesa Trúgv, O Harri, við megini hjá hesum tænarum og fá teir at at sigra á øllum fólkasløgum heimsins; tí at tey, av sonnum, eru Tínir tænarar, ið hava loyst seg frá øllum øðrum enn Tær og Tú ert, sanniliga, verjin av sonnum trúgvandi.

Gev Tú, O Harri, at teirra hjørtu, við trúskapi ímóti hesari, Tínari ósvitandi Trúgv, kunnu gerast sterkari enn nakað annað í himlunum og á jørðini og hvar sum helst harímillum; og styrk, O Harri, teirra hendur við teknum Tínar undursomu meginnar, so at tey kunnu manifestera Tína megi fyri eygunum hjá allari mannaættini.

Báb

O Harri! Fá Træ Tínar guddómligu Eindar til at vaksa skjótt; vatna tað tá, O Harri, við floymandi vøtnum Tínar góðu fragdar og fá tað, frammanfyri opinberingunum av Tínari guddómligu vissu, til at geva frá sær slíkar fruktir, ið Tú ynskir til Tína hálovan og upphevjan, Tín prís og Tína takkagerð, og til at lovprísa Tínum Navni, at lova einleika Tíns Kjarna og at bera fram tilbiðjan til Tín, við tað at alt hetta liggur í lógvatakinum hjá Tær og hjá ongum øðrum.

Mikil er sæla teirra hvørs blóð Tú hevur valt at vatna Træ Tínar váttanar við og soleiðis at upphevja Títt heilaga og óbroytiliga Orð.

Báb

O Harri! Ger Tínar tolnu tænarar sigrandi á Tínum døgum við at geva teimum ein hóskandi sigur við tað, at teir hava sóknast eftir pínslarváttan á Tínari gøtu. Send niður til teir tað, ið fer at geva teirra hugum troyst, fer at gleða teirra innaru verur, fer at geva vissu til teirra hjørtu og ró til teirra likam og fer at gera teirra sálir førar fyri at rísa upp til hjáveru Guðs, hin Mest Upphevjaða, og at náa hitt hægsta Páradísið og tey friðskjól av dýrd, ið Tú hevur ætlað menniskjum av sonnum kunnleika og sannari dygd. Sanniliga, Tú kennur allar lutir ímeðan vit einans eru Tínir tænarar, Tínir trælir, Tíni fjøtursfólk og Tíni fátøku. Ongan Harra uttan Teg ákalla vit, O Guð okkara Harri, ei heldur biðja vit um vælsigning ella náði frá nøkrum uttan Tær, O Tú sum ert Guð miskunnar fyri hesum heimi og hinum næsta. Vit eru einans einans holdgeringar fátøkunar, einkisleikans, hjálparsloysisins og glatanar, ímeðan øll Tìn Vera ber boð um ríkidømi, sjálvbjargni, dýrd, hátign og markleysa náði.

Ger okkara afturløning, O Harri, til tað, ið væl sømir seg Tær av tí góða av hesum heimi og av tí næsta, og av teimum margfaldu gávum, ið røkka úr erva og niður á jørðina niðriundir.

Sanniliga, Tú ert okkara Harri og Hari alra luta. Í Tínar hendur leggja vit okkum sjálvi, ímeðan okkum tráleingist eftir tí, ið er av Tær.

Báb

O Harri! Ger øll fólkasløg jarðarinnar før fyri at fáa atgongd inn í Páradís Tínar Trúar, so at eingin skapt vera fer at vera eftir uttanfyri mørk Tínar góðu fragdar.

Frá fyrndartíð av hevur Tú verið máttugur til at gera tað, ið Tær lystir og háleittur yvir hvørjum sum helst, ið Tær ynskir.

Báb

O Guð, mín Guð! Prís veri Tær fyri at hava tendrað eld guddómliga kærleikans í tí Heilaga Træi á tindinum á tí hægsta fjalli: tí Træi, sum er “hvørki av Eysturi ella Vesturi” 1), tann eldin, ið østi seg upp inntil logi hansara reis høgt upp ímóti Herskaranum í tí høga, og frá honum fingu hasir veruleikar ljós leiðbeiningarinnar og róptu hart: “Sanniliga hava vit sæð ein eld í brekkuni á Sinai-fjalli” 2).

O Guð, mín Guð! Ger Tú hendan eld størri fyri hvønn dag sum gongur inntil gjósturin frá honum fær alla jørðina í rørslu. O Tú, mín Harri! Tendra ljós Tíns kærleiks í hvørjum hjarta, blás inn í sálir menniskjunnar anda Tíns kunnleiks, gleð teirra bróst við versum Tíns einleiks. Ger Tú tey livandi, ið dvøljast í sínum gravum, ávara Tú tey erpnu, skapa gleði um allan heim, send niður Tíni krystalkláru vøtn og í samkomuni av týðiligum glampum send runt tað bikar, ið er “hert við kamfurkelduna”3).

Sanniliga ert Tú hin Gevandi, hin Fyrigevandi, hin Æviga-Veitandi. Sanniliga ert Tú hin Miskunnsami, hin Samkennandi.

‘Abdu’l-Bahá

1) Koranin 24:35
2) Koranin 28:29
3) Koranin 76:5

Hann er Guð!

O Harri, mín Guð, mín Høgt-Elskaði! Hesir eru Tínir tænarar, ið hava hoyrt Tína Rødd, lurtað eftir Tínum Orði og lýtt á Tína Kallan. Tey hava trúð á Teg, sæð Tíni undur, viðurkent Títt prógv og vitnað um Tíni tekin. Tey hava gingið Tínar vegir, fylgt Tínari leiðbeining, varnast Tínar loyndardómar, fatað dulsmálini í Tínari Bók, versini í Tínum Skriftum og tíðindini í Tínum Brøvum og Talvum. Tey hava krøkt seg í seymin á Tínum klæði og hildið fast í skikkju Tíns ljóssins og stórfingnis. Teirra fótafet eru styrkt í Tínum Sáttmála og teirra hjørtu gjørd føst í Tínum Testamenti. Harri! Tendra Tú í teirra hjørtum logan av Tínum guddómliga atdrátti og gev, at fuglur kærleikans og skiljanar kann syngja í teirra hjørtum. Gev, at tey kunnu vera eins sannførandi tekin, ljómandi fánar og fullkomin og Títt Orð. Upphevja við teimumTína Søk, breið út Tíni merki og boða frá vítt og breitt Tíni undur. Ger við teimum Títt Orð sigrandi og styrk lendarnar hjá Tínum elskaðu. Loys teirra tungur fyri at lova Tínum Navni og gev teimum íblástur til at fremja Tín heilaga vilja og Tína fragd. Upplýs teirra andlit í Tínum Kongsríki heilagleikans og ger teirra frøi fullkomna við at hjálpa teimum at reisa seg fyri stórsigri Tínar Sakar.

Harri! Veik eru vit, styrk okkum í at breiða út angar Tíns Heilagleiks; fátøk, ríka okkum av dýrgripum Tínar Guddómligu Eindar; nakin, lat okkum í skikkju Tíns gávumildis; syndafull, fyrigev okkum okkara syndir við Tínari náði, Tínum tokka og Tínum avláti. Tú ert, sanniliga, Styðjarin, Hjálparin, hin Náðiligi, hin Mæti, hin Máttmikli.

Dýrd dýrdanna hvíli á teimum, ið eru varandi og føst.

‘Abdu’l-Bahá

# STØÐUFESTI

Lovað veri Títt navn, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Tínari megi, ið Tú hevur fevnt um allar skaptar lutir og við og við Tínum fullveldi, ið er farið út um alla skapnanina, g

við Tínum Orði, ið varð fjalt í Tínum vísdómi og sum Tú skapti Tín himmal og Tína jørð við, um bæði at gera okkum før fyri at vera støðuføst í okkara kærleika fyri Tær og í okkara lýdni mótvegis Tínari fragd og um at festa okkara eygu á Títt andlit og at feira ( celebrate ) Tína dýrd. Styrk okkum tá, O mín Guð, til at breiða víða út Tíni tekin millum Tínar skapningar og at verja Tína Trúgv í Tínum ríki. Tú hevur altíð verið til uttan at vera tengdur at umrøðuni hjá nøkrum av Tínum skapningum og fert at verða verandi sum Tú hevur verið í allar ævir.

Á Teg havi eg sett alt mítt álit, ímóti Tær havi eg vent mínum andliti, í snór Tínar alsknu forsjónar havi eg krøkt meg og mótvegis skugga Tínar miskunnar havi eg skundað mær. Rek meg ikki sum ein vónsviknan burtur frá Tínum durðum, O mín Guð, og halt ikki frá mær tína náði, tí at bara Tær sóknist eg eftir. Eingin Guð er uttan Tú, hin Æviga-Fyrigevandi, hin Mest Gávumildi.

Lovprísan veri Tær, O Tú sum ert hin Elskaði av teimum, ið hava kent Teg!

Bahá'u'lláh

O Tú Hvørs nærleiki er mítt ynski, Hvørs hjávera er mín vón, Hvørs minning er mín tráan, Hvørs dýrdarhov er mítt mál, Hvørs bústaður er mítt mið, Hvørs navn er mín grøðing, Hvørs kærleiki er ljómi míns hjartas, Hvørs tænasta er mín størsta stundan! Eg bøni Teg við Tínum Navni, við vørjum Tú hevur fingið tey, ið hava viðurkent Teg til at sveima upp til tær stórbærastu hæddirnar av kunnleikanum um Teg og givið teimum, ið inniliga tilbiðja Teg, evni til at atíga upp í eginøki hovs Tíns heilaga tokka, um at hjálpa mær at venda andliti mínum mótvegis Tínum andliti, at festa míni eygu á Teg og at tosa um Tína dýrd.

Eg eri tann, O mín Harri, ið hevur gloymt alt uttan Teg og hevur vent sær mótvegis Degningi Tínar náðinnar, ið hevur forsakað alt uttan Teg í vónini um at nærkast Tínum hovi. Síggj meg tá við mínum eygum lyftum upp ímóti tí Sæti, ið skínur við glampunum frá ljósi Tíns Andlits. Send tískil niður til mín, O mín Elskaði, tað, ið fer at gera meg støðufastan í Tínari Søk, so at ivi teirra vantrúgvandi ikki kann forða mær í at venda mær til Tín.

Tú ert, sanniliga, Guð meginnar, Hjálpin í Neyðini, hin Al-Dýrdarligi, hin Alvaldi.

Bahá'u'lláh

O Guð, min Guð! Eg havi vent mær í iðran til Tín og Tú ert sanniliga hin Avlatandi, hin Samkennandi.

O Guð, mín Guð! Eg eri vendur aftur til Tín og Tú ert sanniliga hin Æviga-Fyrigevandi, hin Náðiligi.

O Guð, mín Guð! Eg havi krøkt meg í snór Tíns gávumildis og hjá Tær er goymsluhúsið til alt, ið er í himli og á jørð.

O Guð, mín Guð! Eg havi skundað mær mótvegis Tær og Tú ert sanniliga Fyrigevarin, Harrin av ríkari ( abounding ) náði.

O Guð, mín Guð! Eg tysti eftir himmalska víni Tínar náðinnar og Tú ert sanniliga Gevarin, hin Gávumildi, hin Náðiligi, hin Almáttugi.

O Guð, mín Guð! Eg vitni, at Tú hevur opinberað Tína Søk, hildið Títt lyfti og sent niður úr himli Tínar náðinnar tað, ið hevur drigið at Tær hjørtuni hjá Tínum framumtiknu. Væl er statt hjá honum, ið hevur hildið fast í Tínum sterka snóri og krøkt seg í seymin á Tínari glæsiligu skikkju!

Eg biði Teg, O Harri yvir allari veru og Kongur tess sædda og tess ósædda, við Tínari megi, Tínari hátign og Tínum fullveldi, um at geva, at mítt navn kann verða skrivað niður við Tínum dýrdarpenni millum Tíni trúføstu, teimum, sum skriftirnar hjá teimum syndafullu ikki forðaðu í at venda sær til ljósið av Tínari ásjón, O bønahoyrandi, bønasvarandi Guð!

Bahá’u’lláh

Lovaður ert Tú, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Honum sum er Títt Mest Mikla Navn, sum er vorðin illa plágaður av slíkum av Tínum skapningum, ið hava avnoktað Tín sannleika og sum er vorðin umgyrdur av sorgini, ið eingin tunga megnar at greiða frá, um at geva, at eg kann minnast Teg og feira Tína lovprísan á hesum døgum, tá ið øll hava vent sær burtur frá tínum fagurleika, hava stríðst ímóti Tær og vent sær vanvirðandi burtur frá Honum, sum er Opinberarin av Tínari Søk. Tað er eingin, O mín Harri, ið kann hjálpa Tær uttan Tú Sjálvur og eingin megi at veita Tær stuðul uttan Tín egna megi.

Eg biði Teg inniliga um at gera meg føran fyri at halda dyggiliga fast við Tín kærleika og Tína minning. Hetta er sanniliga hvat eg eri mentur og Tú ert Tann, ið kennur alt tað, sum er í mær. Tú ert, av sonnum, vitandi, kunnaður um alt. Sýt mær ikki, O mín Harri, glamparnar frá ljósi Títt andlits, hvørs bjartleiki hevur upplýst allan heimin. Eingin Guð er uttan Tú, hin Mest Máttmikli, hin Al-Dýrdarligi, hin Æviga-Fyrigevandi.

Bahá’u’lláh

Lovprísaður veri Tú, O Harri, mín Hægst Elskaði! Ger meg støðufastan í Tínari Søk og gev, at eg kann verða roknaður millum tey, ið ikki hava vanhalgað Tín Sáttmála, ei heldur fylgt gudum teirru innantómu heilaspuna. Ger meg tá føran fyri at fáa ein sannleikans sess í Tínari hjáveru, veit mær eitt tekin um Tína miskunn og lat meg fylkjast við teimum av Tínum tænarum, ið ikki fara at óttast ei heldur fáast at syrgja. Lat meg ikki til mín sjálvs ( abandon me not to myself ), O mín Harri, lat meg heldur ikki vera uttan at viðurkenna Hann sum er Manifestasjónin av Tínum Egna Sjálvi, rokna

meg heldur ikki sum ein av teimum, ið hava vent sær burtur frá Tínari heilugu hjáveru. Tel meg, O mín Guð, uppí tey, ið hava framíhjárættin at festa síni eygu á Tín Fagurleika og sum frøast so nógv í tí at tey ikki vildu býtt eina einastu løtu av tí um við fullveldi kongsríkis himmalsins og jarðarinnar ella við alt ríki skapannar. Hav miskunn við mær, O Harri, á hesum døgum, tá ið fólkasløg Tínar jarðarinnar eru farin álvarsliga skeiv; ger meg tá út, O mín Guð, við tí, sum er gott og sømiligt eftir Tínari meting. Tú ert, sanniliga, hin Al-Máttmikli, hin Náðiligi, hin Gávumildi, hin Æviga-Fyrigevandi.

Gev, O mín Guð, at eg ikki verði roknaður roknaður millum tey hvørs oyru eru deyv, hvørs eygu eru blind, hvørs tungur eru málleysar og hvørs hjørtu ikki hava megnað at fata. Bjarga mær, O harri, úr eldi fávitskunnar og sjálvsøknu tráanar, lat meg fáa atgongd inn á eginøki Tínar gøvgaðu miskunnar og send niður til mín tað, ið Tú hevur fyriskipað Tínum útvaldu. Máttugur ert Tú til at gera tað, ið Tú vilt. Sanniliga, Tú ert Hjálpin í Neyðini, hin Sjálv-Uppihaldandi.

Báb

Lovprísaður og heiðraður ert Tú, O Guð! Gev, at tann dagur , tá ið vit skulu náa Tína heilugu hjáveru, kann nærkast skjótt. Gleð okkara hjørtu við styrkini í Tínum kærleika og góðu fragd og veit okkum støðufesti so at vit fús kunnu geva okkum undir Tín Vilja og Títt Boð. Sanniliga, Tín kunnleiki fevnir um alt tað, ið Tú hevur skapað ella fert at skapa, og Tín himmalski máttur er yvir øllum, ið Tú hevur skapað ella fert at skapa. Tað er eingin at verða tilbiðin uttan Tú, tað er eingin at verða tráaður eftir uttan Tú, tað er eingin at verða elskaður ( adored ) uttan Tú og tað er einki at verða elskað uttan Tín góða fragd ( good pleasure ).

Sanniliga, Tú ert hin ovasti Valdsharrin, hin hægsti Sannleikin, Hjálpin í Neyðini, hin Sjálv-Uppihaldandi.

Báb

O Harri mín Guð! Hjálp Tínum elskaðu at vera føst í Tínari Trúgv, at ganga Tínar vegir, at vera støðuføst í Tínari Søk. Gev teimum Tína náði til at standa ímóti grimdaratsøknum sjálvsins og litinskapsins, at fylgja ljósi guddómligu leiðbeiningar. Tú ert hin Máttmikli, hin Náðiligi, hin Sjálv-Uppihaldandi, Veitarin, hin Samkennandi, hin Almáttugi, hin Al-Gávumildi.

‘Abdu’l-Bahá

O Tú, mín Guð, sum leiður tann søkjandi til tí gøtu, ið førir tann rætta vegin, sum bjargar tí vilstu og blindaðu sál úr oyðimørkum glatanar, Tú sum veitur tí reinmeinta ( sincere ) miklar gávur og vælvildir, sum verjur tann rædda í Tínum ótakandi ( impregnable ) skjóli, sum svarar, úr Tínari allarhægstu havsbrúgv, rópið frá teimum, ið rópa á Teg. Lovprísaður veri Tú, O mín Harri! Tú hevur leitt tann ørkymlaða úr deyða vantrúarinnar og hevur fingið tey, ið nærkast Tær, til ferðinnar mál, og hevur glett teir vissaðu av Tínum tænarum við at eftirlíka teimum teirra inniligastu ynski, og hevur, úr Tínum Kongsríki fagurleikans, latið upp frammanfyri andlitum teirra, ið tráa eftir Tær, portur sameininganna, og hevur bjargað teimum frá eldi frátøkunnar og missins – so at teir skundaðu sær til Tín og náddu Tína hjáveru og komu til Tínar víðopnu dyr ( welcoming door ), og fingu av gávum ein ríkiligan lut.

O mín Harri, teir tystaðu, Tú lyfti upp til teirra svidnu varrar vøtn sameiningarinnar. O Eymi, Veitandi, Tú linnaði teirra pínu við balsami Tíns gávumildis og Tínar náðinnar, og grøddi teirra líðingar við tí frálíka heilivági Tínar samkenslunnar. O Harri, ger føst teirra fótafet á Tínari beini gøtu, ger vítt fyri teimum nálareygað og fá teir, ílatnar kongligar búnar, at ganga við dýrd í allar ævir.

Sanniliga ert Tú hin Hásinnaði, hin Æviga-Gevandi, hin Dýrabæri, hin Mest Gávumildi, Tað er eingin annar Guð uttan Tú, hin Mæti, hin Máttmikli, hin Upphevjaði, hin Sigrandi.

‘Abdu’l-Bahá

# VERND

Prís veri Tær, O Harri mín Guð! Tú sært og veitst, at eg havi heitt á Tínar tænarar um ikki at venda sær nakrastaðni uttan mótvegis Tínum veitingum og havi biðið teir um ikki at halda nakað uttan tað, ið Tú hevur fyriskrivað í Tínari Greiðu Bók, tann Bókin, ið er send niður í samsvari við Títt órannsakiliga boð og Tína óvikandi ætlan.

Eg kann ikki hava nakað orð á munni, O mín Guð, uttan so at eg fái loyvi frá Tær og kann ikki flyta meg nakran veg fyrr enn eg fái Títt samtykki. Tað er Tú, O mín Guð, sum hevur skapað meg við megini í Tínum mátti og hevur gjørt meg út við Tínari náði til at manifestera Tína Søk. Tískil eri eg komin undir slíkar vanlukkur, so at mín tunga er forðað í at lovsyngja Tær og at lova Tínum heiðuri.

Øll prís veri Tær, O mín Guð, fyri tað, ið Tú fyriskipaði mær við Tínum boði og við megi Tíns fullveldis. Eg bøni Teg, at Tú vilt víðgirða bæði meg sjálvan og tey, ið eru góð við meg í okkara kærleika fyri Tær og fert at lata okkum vera føst í Tínari Søk. Eg svørji við Tínum mátti! O mín Guð! Skommin hjá Tínum tænara er at verða stongdur út, sum av einum sløri, frá Tær, og hansara heiður er at kenna Teg. Vápnaður við megi Títt navns kann einki nakrantíð gera mær nakað og við Tínum kærleika í mínum hjarta kunnu allar heimsins plágur á ongan hátt ræða meg.

Send tá niður, O mín Harri, til mín og til míni kæru tað, ið fer at verja okkum ímóti ónáðum teirra, ið hava víst aftur Tínum sannleika og ikki trúð á Tíni tekin.

Tú ert, sanniliga, hin Al-Heiðurligi, hin Mest Gávumildi.

Bahá'u'lláh

Lovprísaður veri Tú, O Harri mín Guð! Hetta er Tín tænari, ið hevur drukkið av Tínum náðihondum vín Tínar eymu miskunnar og roynt smakkin av Tínum kærleika á Tínum døgum. Eg bøni Teg við holdgerilsunum ( embodiments ) av Tínum nøvnum, sum eingin sorg kann forða í at gleðast í Tínum kærleika ella í at stara at ( gaze at ) Tínum andliti, og sum allir herskarar teirra líkasælu eru máttleysir til at fáa at venda sær burtur frá gøtu Tínar fragdar, um at veita honum alt tað góðam ið Tú eigur, og at lyfta hann upp til slíkar hæddir, at hann fer at síggja heimin eins og ein skugga, ið hvørvur skjótari enn eitt eyga blunkar.

Varðveit hann eisini, O mín Guð, við megi Tínar ómetaligu hátignar, frá øllum tí, ið Tú hevur andstygd fyri. Tú ert, sanniliga, hansara Harri og Harri alra heima.

Bahá'u'lláh

Lovað veri Títt navn, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum Navni við hvørjum Tímin er upprunnin og Uppreisnin hendi og ótti og bivan kom á øll, sum eru í himli og øll, sum eru á jørð, um at lata regna niður úr himli Tínar miskunnar og skýggjum Tínar eymu várkunnar tað, ið fer at gleða hjørtuni hjá Tínum tænarum, ið hava vent sær mótvegis Tær og hjálpt Tínari Søk.

Varðveit Tínar tænarar og Tínar ternur, O mín Harri, frá spjótum teirru innantómu heilaspunanna og fáfongdu ímyndinganna, og gev teimum av Tínum náðihondum ein munn av teimum mjúkt floymandi vøtnum Tíns kunnleiks.

Tú ert, vissuliga, hin Almáttugi, hin Mest Upphevjaði, hin Æviga-Fyrigevandi, hin Mest Hásinnaði.

Bahá'u'lláh

O Guð, mín Guð! Eg eri farin frá mínum heimi ímeðan eg haldi fast í snóri Tíns kærleiks og eg havi latið meg sjálvan fullkomiliga í Tína varðveitslu og Tína verju. Eg bøni Teg við Tínari megi, sum Tú vardi Tíni kæru ímóti teimum forgjørdu, og frá hvørjum hørðum kúgara og hvørjum illavorðnum ( wicked doer), ið er vilstur langt frá Tær, um at varðveita meg við tínum gávumildi og Tínari náði. Ger meg tá føran fyri at venda aftur til mítt heim við Tínari megi og Tínum mátti. Tú ert, av sonnum, hin Almáttugi, Hjálpin í Neyðini, hin Sjálv-Uppihaldandi.
Bahá'u'lláh

Fyriskipa mær, O mín Harri, og teimum, ið trúgva á Teg, tað, ið verður hildið at vera best fyri okkum eftir Tínari meting, sum tað er sett fram í Móðirbókini, tí at í Tínum taki heldur Tú tí avgjørda mátinum fyri allar lutir.

Tínar góðu gávur regna uttan íhald á tey, ið virðismeta Tín kærleika, og tey undursomu teknini um Tínar himmalsku gávur verða í stórum máti ( amply ) veitt teimum, ið viðurkenna Tína guddómligu Eind. Vit lata í Tína varðveitslu hvat sum helst, ið Tú hevur ætlað okkum og bøna Teg inniliga um at geva okkum alt tað góða, ið Tín kunnleiki fevnir um.

Líva mær, O mín Harri, ímóti hvørjum óndskapi, ið Títt alviti sær, við tað at tað er eingin megi ella styrki uttan í Tær, eingin stórsigur fer at henda uttan frá Tínari hjáveru og Tú ert einsamallur um at geva boð. Hvat enn Guð hevur viljað, er blivið og tað, ið Hann ikki hevur viljað, fer ikki at verða.

Tað er eingin megi ella styrki uttan í Guði, hinum Mest Upphevjaða, hinum Mest Mæta.

Báb

Heiður veri Tær, O Guð!

Tú ert tann Guð sum hevur verið til áðrenn allar lutir, sum fer at vera til aftaná allar lutir og fer at vara longur enn allir lutir. Tú ert tann Guð sum kennur allar lutir og er hægstráðandi yvir øllum lutum. Tú ert tann Guð sum fer miskunnsamt við øllum lutum, sum dømir millum allar lutir og Hvørs sjón fevnir um allar lutir. Tú ert Guð mín Harri, Tú ert vitandi um mína støðu, Tú sært mína innaru og uttaru veru.

Gev mær og teimum trúgvandi, ið svaraðu Tínum Kalli, Tína fyrigeving. Ver Tú mín nøktandi hjálpari ímóti ónáðunum hjá teimum, ið ynskja mær ilt. Sanniliga, Tú ert Harrin yvir øllum skaptum lutum. Tú ert nøktandi fyri øll ímeðan eingin kann vera sjálv-nøktandi uttan Teg.

Báb

Í Navni Guðs, Harrin av ávinnandi hátign, hin Al-Tvingandi.

Heilagur veri Harrin í Hvørs hond er keldan til yvirræði. Hann skapar hvat sum helst Hann vil við Sínum Boðorði “Verð” og tað er. Hansara hevur verið megi myndugleikans higartil og hon fer at verða verandi Hansara hereftir. Hann ger hvønn sum helst Hann ynskir sigursælan við máttinum í Sínum boði. Hann er av sonnum hin Máttmikli, hin Almáttugi. Honum hoyrir allur heiður og øll hátign til í kongsríkum opinberingar og Skapanar og í hvørjum enn sum liggur millum tey. Sanniliga, Hann er hin Máttugi, hin Al-Heiðurligi. Úr ævigum tíðum hevur Hann verið Keldan til óbasandi styrki og fer at

verða verandi soleiðis í allar ævir. Hann er vissuliga Harrin av mátti og megi. Øll kongsríki himmalsins og jarðarinnar og alt tað, ið er millum tey, eru Guðs og Hansara megi er hægstráðandi yvir øllum lutum. Allir dýrgripir jarðarinnar og himmalsins og alt tað, ið er millum tey, eru Hansara og Hansara verja røkkur yvir allar lutir. Hann er Skapari himmalsins og jarðarinnar og alt tess, ið er millum tey og Hann er veruliga eitt vitni yvir øllum lutum. Hann er Harri Uppgerðar fyri øll, ið búgva í himlunum og á jørð, og øllum tí, ið er millum tey og Guð er vissuliga skjótur at gera upp. Hann ásetur mátið, ið er tillutað øllum, ið eru í himlunum og á jørð og øllum tí, ið er millum tey. Sanniliga, Hann er hin Hægsti Verjin. Hann heldur í Sínum taki lyklar himmalsins og jarðarinnar og øllum tess, ð er millum tey. Sum Hann Sjálvur vil veitur Hann gávur við megini í Sínum boði. Hansara náði fevnir vissuliga um alt og Hann er hin Alvitandi.

Sig: Guð er nøktandi fyri meg; Hann er Tann, sum heldur í Sínum taki kongsríki alra luta. Við megini hjá Sínum herskarum himlanna og jarðarinnar og øllum tí, ið er millum tey, verjur Hann hvønn sum helst av Sínum tænarum, ið Hann vil. Guð er, av sonnum, á varðhaldi yvir øllum lutum.

Ómetaliga upphevjaður ert Tú, O Harri! Líva okkum ímóti tí, ið liggur frammanfyri okkum og aftanfyri okkum, omanfyri okkara høvd, til høgru fyri okkum, til vinstru fyri okkum, undir okkara føtrum og til allar aðrar síður, sum vit eru opin fyri. Sanniliga, Tín verja av øllum lutum er ósvitalig. 1)

Báb

1) *Originalurin til hesa bøn um vernd er skrivaður av hond Bábs sjálvum, í skapinum av einari fimm-kantaðari stjørnu.*

O Guð mín Guð! Líva Tínum álitnu tænarum ímóti óndskapum sjálvsins og ovurhugans, líva teimum við eftiransna eyga Tínar elskandi góðvildar ímóti øllum illvilja, hatri og øvund, gev teimum lívd í óvinnandi skansa Tínar umsorganar og, tá ið teir eru tryggir frá spjótum ivasemis, ger teir til manifestasjónirnar av Tínum heiðurligu teknum, upplýs teirra andlit við teimum strálandi geislum frá Degningi Tínar guddómligu eindar, gleð teirra hjørtu við teimum versum, ið eru opinberaði úr Tínum heilaga kongsríki, styrk teirra lendar við Tínari al-ávirkandi ( all-swaying ) megi, ið kemur úr Tínum ríki dýrdarinnar. Tú ert hin Al-Gávumildi, Verjin, hin Almáttugi, hin Náðiligi.

‘Abdu’l-Bahá

O mín Harri! Tú veitst at fólkið er kringsett av pínu og vanlukkum og er umgyrt av trongdum og trupulleikum. Allar roynslur herja á menniskjað og hvør ringur mótburður

søkir at tí eins og álopið frá einum ormi. Tað er einki skýli ella friðskjól fyri tað uttan undir vongi Tínar verjunnar, varðveitslurnar, varðhalds og umsjónar.

O Tú Miskunnsami! O mín Harri! Ger Tína verju til mína brynju, Tína varðveitslu mítt skjóldur, eyðmjúkleika frammanfyri durði Tíns einleiks mítt varðhald og Tína umsjón og verju mín skansa og mín bústað. Varðveit meg frá tilmælum sjálvsins og gyrndarinnar og líva mær frá hvørjari sjúku, hvørjari roynslu, hvørjum trupulleika, og hvørjari trongd.

Sanniliga, Tú ert Verjin, Vørðurin, Varðveitarin, hin Nøktandi, og sanniliga, Tú ert hin Miskunnsami av teimum Mest Miskunnsomu.

‘Abdu’l-Bahá

# BØNIR TIL SERLIG HØVI

## TALVA AHMADS

“Hesar dagligu obligatorisku bønirnar, saman við nøkrum fáum ávísum øðrum, sum til dømis Bønin fyri Grøðing, Talva Ahmads, eru gjørdar út av Bahá’u’lláh við einari serligari megi og týdningi og og eiga tískil at verða góðtiknar soleiðis og upplisnar av teimum trúgvandi við treytaleysari trúgv og áliti, so at tey gjøgnum tær kunnu koma í eitt nógv tættari samband við Guð og kennast meira fult við Hansara lógir og fyriskipanir.”
 - Úr brævi, skrivað vegna Shoghi Effendi.

Hann er Kongurin, hin Alvitandi, hin Vísi!

Sí, Náttargali Páradísis syngur uppi á kvistinum á Træi Ævinleikans, við heilugum og søtum løgum, ímeðan Hann kunnger fyri teimum reinmeintu tey fróu tíðindini um nærleika Guðs, kallar tey, sum trúgva á tí Guddómligu Eindina til hov Hjáleika hins Gávumilda, upplýsir tey fráloystu um boðskapin, ið er opinberaður av Guði, Konginum, hinum Dýrdarliga, hinum Makaleysa, leiðbeinir elskarnar til sæti heilagleikans og til hendan skæra Fagurleikan.

Sanniliga er hetta hin Mest Mikli Fagurleikin, spáddur um í Bókum Boðberanna, við Hvørjum sannleiki skal verða skildur frá villu og vísdómurin í hvørjum boði skal verða royndur. Sanniliga er Hann Træ Lívsins, ið elur fram fruktir Guðs, hins Upphevjaða, hins Máttmikla, hins Mikla.

O Ahmad! Ber tú vitnisburð um, at Hann sanniliga er Guð og at tað eingin annar Guð er uttan Hann, kongurin, Verjin, hin Ósamanberiligi, hin Alvaldandi. Og at Tann, ið

Hann hevur sent út við navninum ‘Alí, var hin Sanni frá Guði, Hvørs boðum vit øll laga okkum eftir.

Sig: O fólk, verið lýðin ímóti fyriskipanum Guðs, ið eru álagdar í Bayánini av hinum Dýrdarliga, hinum Vísa. Sanniliga er Hann Kongur Boðberanna og Bók Hansara er Upprunabókin, um tit bara vistu.

Soleiðis ber Náttargalin fram Sítt Kall til tín úr hesum fangahúsi. Hann skal bert flyta hendan greiða boðskap. Hvør tann, ið ynskir tað, lat hann venda sær burtur frá hesum ráðum og hvør tann, ið ynskir tað, lat hann velja vegin til Harra sín.

O fólk, um tit avnokta hesi vers, við hvørjum prógvi hava tit tá trúð á Guð? Setið tað fram, O samkoma av følskum.

Nei, við Honum í Hvørs hond mín sál er, tey eru ikki og fara ongantíð at vera før fyri tí, sjálvt um tey høvdu lagt saman til tess at hjálpt hvørjum øðrum.

O Ahmad! Gloym ikki Mínar Náðigávur ímeðan Eg eri burtur. Minst á tínum døgum til Mínar dagar og Mína neyð og útlegd í hesum fjarskotna fangahúsi. Og ver tú so støðufastur í Mínum kærleika at hjarta títt ikki fer at sløðra, sjálvt um svørð fíggindanna oysa høgg niður yvir teg og allir himlarnir og jørðin reisast ímóti tær.

Ver tú eins og eldslogi fyri Mínar fíggindar og ein á av ævigum lívi fyri Míni elskaðu og ver ikki ein teirra, ið ivast.

Og um tú verur fyri líðingum á Mínum vegi ella eyðmýking fyri Mína skuld, so ver ikki nervaður av tí.

Lít á Guð, tín Guð og Harra fedra tína. Tí at fólkið reikar eftir gøtum hvørvisjónar, uttan skynsemi til at síggja Guð við teirra egnu eygum ella at hoyra Hansara Songlag við teirra egnu oyrum. Soleiðis hava Vit funnið tey, sum tú eisini ert vitni til.

Soleiðis er teirra pátrúgv vorðin til eitt slør millum tey og teirra egnu hjørtu og hevur hildið teimum frá vegi Guðs, hins Upphevjaða, hins Mikla.

Ver tú í sjálvum tær vissaður um, at sanniliga, hann, ið vendur sær burtur frá hesum Fagurleika, hevur eisini vent sær burtur frá teimum undanfarnu Boðberunum og vísir stoltleika ímóti Guði úr øllum ævum í allar ævir.

Lær hesa Talvu væl. O Ahmad. Syng ( chant ) hana á tínum døgum og halt teg ikki frá tí. Tí at sanniliga, Guð hevur fyriskipað honum, ið syngur hana, samsýning hundrað pínslavátta og eina tænastu í báðum heimum. Hendan tokka hava Vit veitt tær sum eina gávu frá Okkum av og eina miskunn frá hjáveru Okkara, so at tú kanst vera ein teirra, ið eru takksom.

Við Guði! Um ein, ið er raktur av líðing ella sorg, lesur hesa bøn við avgjørdum reinlyndi, so fer Guð at burturbeina hansara syrgni, loysa hansara trupulleikar og fáa hansara líðingar at hvørva.

Sanniliga, Hann er hin Miskunnsami, hin Samkennandi. Lovprísaður veri Guð, Harri alra heimanna.

Bahá’u’lláh

## ELD-TALVAN

Í Navni Guðs, hins Mest Fyrndargamla, hins Mest Mikla.

Av sonnum eru hjørtuni hjá teimum reinmeintu tærd í eldi skilnaðins: Hvar er glampanin frá ljósi Tínar ásjónar, O Elskaði heimanna?

Tey, ið eru Tær nær, eru slept uppá fjall í myrkri einsemis: Hvar er geislanin frá morgninum í Tínari endursameining, O Tráan heimanna?

Likamini hjá Tínum útvaldu liggja skelvandi á fjarskotnum sandum: Hvar er hav tínar hjáverunnar, O Dárari heimanna?

Longsulsfullar hendur eru lyftar upp ímóti himli Tínar náðinnar og Títt hásinnis: Hvar eru æl Tínar veitingar, O Svarari heimanna?

Tey vantrúgvandi hava reist seg við kúging til allar síður: Hvar er noyðandi megin hjá Tínum fyriskipandi Penni, O Sigursharri heimanna?

Goyggj frá hundum ljóðar hart úr øllum ættum:Hvar er leyvan í skógi Túns máttarins, O Tyktari heimanna?

Kuldi hevur fingið tak í alla mannaættina: Hvar er hiti kærleiks Tíns, O Eldur heimanna?

Vanlukka er á sínum hámarki: Hvar eru tekin hjálpar Tínar, O Bjarging heimanna?

Myrkur hevur umgyrt tey flestu fólkasløgini: Hvar er bjartleikin í glampa Tínum, O Geisling heimanna?

Hálsar menniskjunnar eru spentir fram í óndskapi: Hvar eru svørð hevndar Tínar, O Oyðari heimanna?

Mannminkan er komin niður í sítt lægsta dýpi: Hvar eru merki dýrdar Tínar, O Dýrd heimanna?

Sorgir hava rakt Opinberarnar av Tínum Navni, hin Al-Miskunnsami: Hvar er frøin í Degningi Tínar Opinberingar, O Fragd heimanna?

Kvøl er komin á øll fólkasløg jarðarinnar: Hvar eru fløgg Tínar gleðinnar, O Frøi heimanna?

Tú sært Degningsstað Tíns tekins dult av óndum ábendingum ( suggestions ): Hvar eru fingrar Tíns máttarins, O Megi heimanna?

Svárur tosti er komin á øll menniskju: Hvar er á gávumildis Tíns, O Miskunn heimanna?

Girnd hevur tikið alla mannaættina til fanga: Hvar eru likamliggerðirnar av skilnaði ( detachment ), O Harri heimanna?

Tú sært hendan Misbjóðaða einsamallan í útlegd: Hvar eru herskararnir úr himli Títt Boðs, O Drottin heimanna?

Eg eri vorðin forsakaður í einum fremmendum landi: Hvar eru merki Tíns trúfestis, O Álit heimanna?

Kvølir deyðans hava tikið fast tak í øll menniskju: Hvar er aldanin av Tínum havi æviga lívsins, O Lív heimanna?

Teskanir Sátans eru bornar øllum skapningum: Hvar er meteorur Tíns elds, O Ljós heimanna?

Fyllskapur ovurhugans hevur avskeplað tað mesta av mannaættini: Hvar eru degningar reinleikans, O Tráan heimanna?

Tú sært hendan Misbjóðaða huldan í kúging millum sýrlendingarnar: Hvar er geislingin frá Tínum degnandi ljósi, O Ljós heimanna?

Tú sært Meg forbjóðaðan at tala: Hvar frá kunnu tá Tíni songløg koma, O Náttargali heimanna?

Tey flestu menniskjuni eru sokkin niður í heilaspuna og innantómar tilhugsanir: Hvar eru talsmenn Tínar vissunnar, O Vissa heimanna?

Bahá druknar í einum havi av roynslum: Hvar er Ørk Tínar bjargingar, O Bjargari heimanna?

Tú sært Degning Tínar framberingar í myrkri skapanar: Hvar er sólin á himli Tínar náðinnar, O Ljósgevari heimanna?

Lampur sannleikans og reinleikans, trúskapsins og ærunnar eru sløktar: Hvar eru tekin Tínar hevnandi øðinnar, O Førkari heimanna?

Sært Tú nakran, ið hevur stríðst fyri Tínum Sjálvi ella grundað yvir hvat Honum hevur verið fyri á Tínum Vegi? Nú steðgar Mín pennur, O Elskaði heimanna.

Greinarnar á tí Guddómliga Lotus-trænum liggja brotnar av teimum rusandi stormum lagnunnar: Hvar eru merki hjálpannar Tínar, O Fyristríðsmaður ( Champion ) heimanna?

Hetta andlit er fjalt í dusti bakbítingar: Hvar eru lot Tínar samkenslunnar, O Miskunn heimanna?

Glæstribúni ( robe ) heilagleikans er dálkaður av fólki sviksins: Hvar er klæði Tíns heilagleiks, O Prýðari heimanna?

Hav náðinnar er stillað vegna tað, ið hendur menniskjunna hava framt: Hvar eru bylgjur Tíns gávumildis, O Tráan heimanna?

Dyrnar, ið føra til tí Guddómligu Hjáveruna, eru stongdar vegna harðræði Tína fígginda: Hvar er lykil Tína veitinganna, O Upplæsari heimanna?

Bløðini eru gulnaði av eitrandi vindum uppreistrarhugans: Hvar er glopraregnið úr skýggjum Tíns gávumildis, O Gevari heimanna?

Alheimurin er myrknaður av dusti syndarinnar: Hvar eru lot Tínar fyrigevingar, O Fyrigevari heimanna?

Hesin Ungdómur er einsamallur í einum troystarleysum landi: Hvar er regn Tínar himmalsku náðinnar, O Veitari heimanna?

O Hægsti Pennur, Vit hava hoyrt Títt so sera søta kall í tí æviga ríkinum: Lurta eftir tí sum Tunga Stórfingis sigur, O Misbjóðaði heimanna!

Um tað ikki var fyri kuldanum hvussu kundi hitin í Tínum orðum annars sigra, O Útleggjari heimanna?

Um tað ikki var fyri vanlukka hvussu kundi sólin í Tínum toli annars skinið, O Ljós heimanna?

Eymka Teg ikki vegna tey óreinu. Tú vart skaptur til at bera og at tola, O Tol heimanna.

Hvørt søtur var Tín degningur á havsbrúgv Sáttmálans millum tilevnarnar ( stirrers ) av uppreistri, og Tín trálongsul eftir Guði, O Kærleiki heimanna.

Við Tær varð hermerki sjálvbjargnis sett í jørðina á teimum hægstu tindum og hav gávumildis aldaði, O Eldhugi heimanna.

Við Tínum einaleika ( aloneness ) skein Sól einleikans og við Tínari útlegd varð land Eindarinnar prýtt. Ver tolin, O Tú Útlagni heimanna.

Vit hava gjørt mannminking til klæði dýrdarinnar og líðing til prýði Títt tempuls, O Stoltleiki heimanna.

Tú sært at hjørtuni eru fylt við hatri og at bera yvir hoyrir Tær til, O Fjalari av syndum heimanna.

Tá ið svørðini skyggja, gakk fram! Tá ið skøftini flúgva, strong á frameftir! O Tú Offur heimanna.

Eymkar Tú Teg ella skal Eg eymka Meg? Heldur vil Eg gráta yvir hvussu fáir Tínir fyristríðsmenn ( champions ) eru, O Tú, ið hevur orsakað ( caused ) eymkan heimanna.

Sanniliga, Eg havi hoyrt Títt kall, O Al-Dýrdarligi Elskaði; og nú logar andlitið á Bahá við hita roynslunnar og við eldi Títt skínandi orðs hevur Hann reist Seg upp í trúfesti á ofringarstaðnum, ímeðan Hann hyggur mótvegis Tínari fragd, O Fyriskipari heimanna.

O ‘Alí-Akbar, takka tínum Harra fyri hesa Talvu, av hvørjari tú kanst anda í teg angan av Mínari eyðmýkt og vita hvat hevur plágað Okkum á vegi Guðs, hins Tilbidna alra heimanna.

Um allir tænarnir lesa og grunda yvir hetta, so fer tað at verða tendraður í teirra æðrum ein eldur, ið fer at seta heimarnar í ljósan loga.

Bahá’u’lláh

# TALVA HEILAGA SJÓFARANS

*“Granskið Talvu Heilaga Sjófarans, so at tit kunnu vita sannleikan og gevið gætur, at hin Vælsignaði Fagurleikin til fulnar hevur spáað ( foretold ) komandi hendingar. Lat tey, ið skilja, vera ávaraði!”* ‘Abdu’l-Bahá

Hann er hin Náðiligi, hin Høgt-Elskaði!
O Heilagi Sjófari!
Bið tína ørk ævinlekans at koma til sjóndar fyri tí Himmalska Herskaranum,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Flota hana á tí fyrndargamla havi í Hansara Navni, hin Mest Undursami,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Og lat teir einglaligu andar koma inn í Navni Guðs, hin Mest høgi.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Loys tá hennara teymar, so at hon kann sigla á havi dýrdarinnar,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Kanska tey, ið dvøljast í henni, kunnu náa friðskjól nærleikans í tí æviga ríkinum.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Tá ið tey eru nádd tí heilugu fjøru, sjóvarstrond hitt blóðreyða havs,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Bið tey streyma fram og náa hetta yvirjarðliga ósjónliga tignarstig,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Eitt tignarstig,í hvørjum Harrin í Loga Síns Fagurleiks er komin til sjóndar inni í tí ódeyðiliga træi;

Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Í hvørjum likamliggerðir Hansara Sakar reinsaðu seg sjálvar fyri sjálvi og ovurhuga;
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Rundan um hvørt Dýrd Mósesar melur saman við teimum ævigu herskarunum;
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Í hvørjum Hond Guðs varð tikin fram úr Hansara barmi Stórfingis;
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Í hvørjum ørk Sakarinnar verður verandi órørilig, sjálvt um allir guddómligir eginleikar verða fráboðaðir fyri íbúgvum hennara.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
O Sjófari! Lær tey, sum eru í ørkini, tað, ið Vit hava lært teg aftanfyri tað duldarfulla slørið,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Kanska tey fara ikki at drála á tí heiluga snjóhvíta bletti,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Men fara at flúgva upp á veingjum andans til tað tignarstigið, ið Harrin hevur upphevjað yvir alla umrøðu í heimunum í neðra,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Fara at sveima gjøgnum rúmdina eins og teir framumtiknu fuglar í ríki teirra ævigu endursameiningar;
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Fara at kenna tey loyndarmál, ið eru fjald í Høvum ljóssins.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Tey fóru framvið stigum teirru verðsligu avmarkinganna og náddu stigi teirru guddómligu eindarinnar, miðdepil himmalsku leiðbeininganna.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Tey hava tráað eftir at rísa upp til tað støðið, ið Harrin hevur fyriskipað at vera omanfyri teirra tignarstig.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Í tí sama kastaði tann brennandi meteorurin tey út frá teimum, ið búgva í Kongsríki Hansara Hjáverunnar,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Og tey hoyrdu Rødd Stórfingis tala hart frá aftanfyri hin ósædda skálan á Hædd Dýrdarinnar:
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
“O verndareinglar! Sendið tey aftur til teirra bústað í heiminum í neðra,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
“Við tað, at tey hava ætlað sær at rísa upp til tað himnahválv, ið veingirnar hjá tí himmalsku dúgvuni ongantíð eru náddar;
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
“Tínæst stendur skip ímyndingarinnar í stað, eitt sum hugarnir hjá teimum skiljandi ikki megna at fata.”
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Tínæst hyggur moyggj himmalsins út frá sínum upphevjaða kamari,

Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Og við sínum enni gjørdi tekin til tann himmalska herskaran,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Og baðar við ljósinum frá ásjónd sínari himmalin og jørðina,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Og tá ið geislingin frá hennara vakurleika skein á fólk dustsins,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Vórðu allar verur skakaðar í teirra deyðiligu gravum.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Síðan skar hon í tað kall, sum einki oyra um allar ævir nakrantíð hevur hoyrt,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Og kunngjørdi soleiðis: "Við Harranum! Hann, hvørs hjarta ikki hevur angan av kærleikanum fyri tí upphevjaða og dýrdarliga Arabiska Ungdóminum,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
"Kann á ongan hátt rísa upp til dýrd hins hægsta himmals."
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Síðan bað hon eina moyggj av sínum ternum koma til sín,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Og gav henni boð: "Far niður í rúmdina úr borgum ævinleikans,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
"Og vent tær ímóti tí, ið tey hava fjalt í tí innasta í teirra hjørtum.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
"Um tú andar í teg luktilsi glæstribúnans av tí Ungdómi, sum er fjaldur í tabernakli ljóssins vegna tað, ið hendur teirra óreinu hava framt
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
"Sker í eitt róp innan í tær sjálvari, so at allir íbúgvarnir í Kømrum Páradísis, ið eru likamliggerðirnar av tí æviga ríkidøminum, fara at skilja og lurta;
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
"So at tey øll fara at koma niður frá teirra ævigu kømrum og skelva,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
"Og kyss teirra hendur og føtur afurfyri at hava flogið upp til hæddir trúfestis;
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
"Kanska tey fara at finna av glæstribúnum sínum angan av hinum Elskaða."
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Tínæst strálaði ásjónin hjá tí framumtiknu moyini omanfyri tey himmalsku kømrini eins og ljósið, ið skínur av andliti Ungdómsins omanfyri Hansara deyðiliga templi;
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Síðan steig hon niður við einum slíkum prýði, ið kundi upplýst himlarnar og alt tað, sum er í teimum.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Hon ressaðist og gjørdi angandi allar lutir í londum heilagleikans og stórfingnis.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Tá ið hon náddi tað stað, reisti hon seg upp til sína fullu hædd í innasta hjarta skapanar,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!

Og royndi at anda í seg teirra angar í einari tíð, sum hvørki kennur byrjan ella enda.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Hon fann ikki í teimum tað, ið hon tráaði eftir og hetta er, sanniliga, bert ein av Hansara undursomu søgum.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Síðan rópti hon hart, eymkaði seg og helt avstað til sítt egna tignarstig í hennara mest gøvigu borg,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Og mælti síðan eitt einstakt dularfult orð, ið varð teskað loyniliga við hennara hunangssøtu tungu,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Og hevjaði kallið millum Himmalska Herskaran og tær ódeyðiligu moyggjar himmalsins:
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
"Við Harranum! Ungdómurin hevur verið verandi einsamallur og burturgloymdur í landi útlagdar í hondum teirra ógudiligu."
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Síðan skær hon innan í sær sjálvari í eitt slíkt róp, at tann Himmalski Herskarin skríggjaði og skalv,
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Og hon fall niður á dustið og gav upp andan. Tað tykist sum um, at hon var kallað av Honum og lurtaði eftir Honum, ið bjóðaði henni at koma inn í Ríkið í tí Høga.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Hálovaður veri Hann, ið skapti hana burturúr kjarna kærleikans í tí innasta hjarta Hansara upphevjaða páradísis!
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Síðan skundaðu moyggjar himmalsins sær út úr kømrum sínum, á hvørs ásjónir eygað hjá ongum íbúgva í tí hægsta páradísi nakrantíð hevur skoðað.
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!
Og tá ið tær sóu hennara støðu og fataðu eitt orð av søguni, ið Ungdómurin segði frá, avhyldu tær seg um høvdið, skræddu klæði síni sundur, slóu seg í andlitið, gloymdu sína frøi, feldu tár og ( smote ) seg á kjálkarnar við hondunum, og hetta er sanniliga ein av teimum loyndarfullu ræðuligu plágunum ---
Hálovaður veri mín Harri, hin Al-Dýrdarligi!

Bahá'u'lláh

# VITJANARTALVUR

( Hendan Talva verður lisin við Gravarhúsini hjá Bahá'u'lláh og Báb. Hon verður eisini ofta brúkt til hátíðarhaldini av Teirra ársdøgum ).

Tann lovprísan, ið er degnað úr Tínum mest gøvgaða Sjálvi og tann dýrd, ið er skinin fram úr Tínum mest ljómandi Fagurleika hvíla á Tær, O Tú sum ert Manifestasjónin av Stórfingni og Kongur Ævinleikans og Harrin yvir øllum teimum, sum eru í himli og á jørð! Eg vitni, at við Tær vórðu fullveldi Guðs og Hansara yvirvald, og hátign Guðs og Hansara Stórfingni opinberaði og Morgunstjørnur teirri fyrndargomlu glampanar kastað sína geisling í himli Tíns óbroytandi boðs og Fagurleiki hins Ósædda er skinin fram omanfyri havsbrúgv skapanar. Eg vitni harumframt, at bara við einari rørslu við Tínum Penni er Tín fyriskipan "Verð Tú" framd og Guðs loynda Dulsmál opinberað og allir skaptir lutir kallaðir fram í tilveruna og allar Opinberingarnar sendar niður.

Eg vitni harumframt um, at við Tínum fagurleika er fagurleiki hins Tilbidna avdúkaður og við Tínum andliti er andlit hins Eftirstundaða skinið fram og, at við einum orði frá Tær hevur Tú valt ímillum allar skaptar lutir, fingið teir, ið eru trúfastir ímóti Tær at rísa upp til tind dýrdarinnar og tey vantrúgvandi til at detta niður í tí lægstu avgrundina.

Eg vitni, at tann, ið hevur kent Teg, hevur kent Guð og at tann, ið er náddur Tínari hjáveru, er náddur hjáveru Guðs. Stór er tískil sæla hansara, ið hevur trúð á Teg og á Tíni tekin og hevur gjørt seg sjálvan lítlan frammanfyri Tínum fullveldi og er vorðin æraður við at møta Tær og er náddur góðu vælvild Tíns vilja og hevur malið rundan um Teg og hevur staðið frammanfyri Tínari trónu. Vei honum, ið hevur misbrotið seg ímóti Tær, og hevur avnoktað Teg og kastað aftur Tíni tekin, og mælt ímóti Tínum fullveldi, og reist seg ímóti Tær, og er túsnaður upp av stoltleika frammanfyri Tínum andliti og hevur stríðst ímóti Tínum yvirlýsingum, og er flýddur undan Tínum ræði og Tínum yvirvaldi og er taldur millum tey vantrúgvandi, hvørs nøvn av fingrum Tína boðgevinganna eru rist í Tínar heilugu Talvur.

Rek tá á meg, O mín Guð og mín Elskaði, frá høgru hond Tínar miskunnar og Tínar eymu góðvildar, heilugu fleyr Tíns tokka, so at tey kunnu draga meg burtur frá mær sjálvum og frá heiminum til hov Tíns nærleiks og Tínar hjáverunnar. Máttugur ert Tú til at gera tað, ið Tær lystir. Tú hevur, av sonnum, verið hægstráðandi yvir øllum lutum.

Minningin um Guð og Hansara lovprísan og dýrd Guðs og Hansara glampi hvíli á Tær, O Tú sum ert Fagurleiki Hansara! Eg vitni, at eyga skapanar hevur ongantíð sæð ein so misbjóðaðan sum Teg. Tú vart allar Tínar lívsdagar søktur niður í eitt hav av roynslum. Einaferð vart Tú í ketum og leinkjum; eina aðra ferð vart Tú hóttur við svørðunum hjá Tínum fíggindum. Tó, hóast alt hetta, so álegði Tú øllum menniskjum at halda tað, ið varð fyrisett Tær av Honum, sum er hin Alvitandi, hin Alvísi.

Gævi mín andi kundi gjørst eitt offur fyri teir órættir, ið Tú toldi og mín sál verði eitt loysigjald fyri teir mótburðir, ið Tú bar. Eg bøni Guð, við Tær og við teimum, hvørs andlit eru upplýst við glampunum av ljósinum frá Tínari ásjón og sum, av kærleika fyri Tær, hava hildið alt tað, ið tey vóru biðin um, um at taka burtur tey slør, ið eru komin ímillum Teg og Tínar skapningar, og um at útvega mær tað góða av hesum heimi og av tí komandi. Tú ert, av sonnum, hin Almáttugi, hin Mest Upphevjaði, hin Al-Dýrdarligi, hin Æviga Fyrigevandi, hin Mest Samkennandi.

Vælsigna Tú, O Harri mín Guð, tað Guddómliga Lotus-træið og bløð tess og tess greinar og tess kvistar og tess bul og tess sprotar, so leingi sum Tíni mest frálíku heiti og Tínir mest gøvgaðu eginleikar fara at vara. Líva tað tá ímóti ónáðunum frá

atsøkjaranum og herskarum harðræðis. Tú ert, av sonnum, hin Almáttugi, hin Mest Máttmikli. Vælsigna Tú eisini, O Harri mín Guð, Tínar tænarar og Tínar ternur, ið eru nádd til Tín. Tú ert, vissuliga, hin Al-Gávumildi, hvørs náði er óendalig. Eingin Guð er uttan Tú, hin Æviga-Fyrigevandi, hin Mest Hásinnaði.

Bahá'u'lláh

Hendan bønin, ið er opinberað av 'Abdu'l-Bahá, verður lisin við Hansara Gravarhús. Hon verður eisini brúkt sum vanlig bøn.

*Hvør tann, ið lesur upp hesa bøn við eyðmjúkleika og innileika, fer at geva gleði og frøi til hjartað hjá hesum Tænara; tað fer at vera eins og at møta Honum andlit til andlit.*

Hann er hin Al-Dýrdarligi!

O Guð, mín Guð! Eyðmjúkur og grátkomin lyfti eg mínar biðjandi hendur upp ímóti Tær og fjali mítt andlit í dustinum á tí Gátt Tínari, ið er upphevjað yvir kunnleika teirra lærdu og hálovan alra teirra, ið lovprísa Tær. Lít náðiliga at Tínum tænara, lítillátaður og eyðmjúkur við Tínar dyr, við eygnabrái Tínar miskunnar og søkk hann niður í Hav Tínar ævigu náðinnar.

Harri! Hann er ein fátækur og eyðmjúkur tænari hjá Tær, bergtikin og bønar Teg, fongslaður í Tínari hond, biður gløðandi til Tín, lítur á Teg, grátandi frammanfyri Tínum andliti, rópar á Teg og bønar Teg, og sigur:

O Harri, mín Guð! Gev mær Tína náði til at tæna Tínum kæru, styrk meg í mínari tænastu fyri Tær, upplýs mítt enni við ljósi tilbiðjanar í Tínum hovi heilagleikans og bønarinnar til Títt kongsríki stórfingnis. Hjálp mær at vera ósjálvsøkin við himmalsku inngongd Títt porturs og hjálp mær at vera leysur av øllum lutum inni á Tínum heilugu eginøkjum. Harri! Gev mær at drekka úr bikari ósjálvsøknis; lat meg í búna tess og søkk meg niður í tess hav. Ger meg eins og dust á gøtuni hjá Tínum kæru og gev, at eg kann ofra mína sál fyri ta jørð, ið er góðskað av fótafetunum hjá Tínum útvaldu á Tínari gøtu, O Harri Dýrdarinnar í tí Hægsta.

Við hesari bøn kallar tænari Tín á Teg, í degningsløtu og á náttartíð. Eftirlíka hansara hjartans trá, O Harri! Upplýs hansara hjarta, gleð hansara bróst, tendra hansara ljós, so at hann kann tæna Tínari Søk og Tínum tænarum.

Tú ert Veitarin, hin Várkunnsami, hin Mest Gávumildi, hin Náðiligi, hin Miskunnsami, hin Samkennandi.

'Abdu'l-Bahá

# INNSKOTSDAGARNIR

( Innskotsdagarnir, frá 26. Februar til 1. Mars, báðir dagar roknaðir við, eiga at verða brúktir til at fyrireika Føstuna, til gestablídni, til vælgerð og til at geva gávur. )

Mín Guð, mín Eldur og mítt Ljós! Teir dagar, ið Tú hevur nevnt Ayyám-i-Há í Tínari Bók, eru byrjaðir, O Tú sum ert Kongur navnanna, og føstan, ið Tín mest upphevjaði Pennur hevur álagt øllum, sum eru í kongsríki Tínar skapanar, at halda, nærkast. Eg bøni Teg, O mín Harri, við hesum døgum og við øllum teimum, sum í hesum tíðarskeiði hava krøkt seg í strong Tíni boðanna og tikið í hald Tíni fyriskipanar, um at geva, at hvørjari sál verður tillutað eitt pláss inni á eginøkjum Títt hovs og eitt sæti við opinberingina av glampunum av ljósi Tínar ásjónar.

Hesir, O mín Harri, eru Tínir tænarar, ið einki spilt lyndi hevur hildið aftur frá tí, ið Tú sendi niður í Tínari Bók. Tey hava boygt seg sjálvi fyri Tínari Søk og tikið ímóti Tínari Bók við einari avgerð, ið er fødd av Tær, og hava hildið tað, ið Tú hevur fyrisett teimum, og valt at fylgja tí, ið varð sent niður til tey.

Tú sært, O mín Harri, hvussu tey hava viðurkent og játtað alt tað, ið Tú hevur opinberað í Tínum Skriftum. Gev teimum at drekka, O mín Harri, av hondum Tíns náðiligleiks vøtn Tíns ævinleiks. Skriva tá niður fyri teimum tí afturløning, ið er fyriskipað honum, ið hevur søkt seg niður í hav Tínar hjáverunnar og er náddur tí framúrskarandi víni sum er at møta Tær.

Eg bøni Teg, O Tú Kongur konganna og Várkunnari teirra niðurtraðkaðu, um at fyriskipa teimum tað góða av hesum heimi og av tí komandi heimi. Skriva harumframt niður fyri teimum tað, ið eingin av Tínum skapningum hevur varnast og tel tey millum teirra, ið hava malið rundan um Teg og sum ferðast um Tína trónu í hvørjum einasta av Tínum heimum.

Tú ert, av sonnum, hin Almáttugi, hin Alvitandi, hin Al-Upplýsti.

Bahá’u’lláh

# FØSTAN

Kitáb-i-Aqdas sigur: “Vit hava givið tykkum boð um at biðja og fasta frá byrjan búgvinskapsins ( 15 ár ); hetta er fyriskipað av Guði; Harra tykkara og Harra tykkara forfedra.... Tann Ferðandi, tann sjúki, tær, ið eru við barni ella geva bróst, eru ikki bundin av føstuni.... Haldið tykkum frá mati og drekka frá sólarrísi til sólsetur og ansið eftir at girnd ikki tekur frá tykkum hesa náði, sum er ásett í Bókini.”

Tíðarskeiðið fyri Føstuni er frá 2. Mars til 20. Mars.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við Tínum mæta Tekni og við opinberingini av Tínari náði millum menniskju, um ikki at kasta meg burtur frá portrinum til bý Tínar hjáverunnar og um ikki at svíkja tær vónir, ið eg havi sett til manifestasjónirnar av Tínari náði millum Tínar skapningar. Tú sært meg, O mín Guð, halda í Tínum Navni, hin Mest Heilagi, hin Mest Lýsandi, hin Mest Mæti, hin Mest Mikli, hin Mest Upphevjaði, hin Mest Dýrdarligi, og krøkja meg í seymin á tí glæstribúna, sum øll í hesum heimi og í tí komandi heimi hava krøkt seg í.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við glampunum av Tínum lýsandi enni og bjartleikanum í ljósi Tínar ásjónar, ið skínur frá tí allarhægstu havsbrúnni, um at draga meg at Tær við anganum frá Tínum klæði og at fáa meg til at drekka av tí framúrskarandi víni Tínar talunnar. Tú sært meg, O mín Guð, halda í Tínum Navni, hin Mest Heilagi, hin Mest Lýsandi, hin Mest Mæti, hin Mest Mikli, hin Mest Upphevjaði, hin Mest Dýrdarligi, og krøkja meg í seymin á tí glæstribúna, sum øll í hesum heimi og í tí komandi heimi hava krøkt seg í.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við Tínum hári, ið flytir seg eftir Tínum andliti eins og Tín mest upphevjaði pennur flytir seg eftir síðunum í Tínum Talvum, ímeðan hann gevur frá sær moskusið av loyndum merkingum yvir kongsríki Tínar skapanar, um í tann mun at reisa meg upp til at tæna Tínari Søk, at eg ikki fari at taka meg aftur, ei heldur verða forðaður av eggjanum teirra, ið hava funnist at Tínum teknum og venda mær frá Tínum andliti. Tú sært meg, O mín Guð, halda í Tínum Navni, hin Mest Heilagi, hin Mest Lýsandi, hin Mest Mæti, hin Mest Mikli, hin Mest Upphevjaði, hin Mest Dýrdarligi, og krøkja meg í seymin á tí glæstribúna, sum øll í hesum heimi og í tí komandi heimi hava krøkt seg í.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við Tínum Navni, ið Tú hevur gjørt til Kongin yvir øllum Nøvnum, við hvørjum øll, sum eru í himli og á jørð, eru hugfangaði, um at gera meg føran fyri at skoða Morgunstjørnu Tíns Fagurleiks og at geva mær vín tínar talunnar. Tú sært meg, O mín Guð, halda í Tínum Navni, hin Mest Heilagi, hin Mest Lýsandi, hin Mest Mæti, hin Mest Mikli, hin Mest Upphevjaði, hin Mest Dýrdarligi, og krøkja meg í seymin á tí glæstribúna, sum øll í hesum heimi og í tí komandi heimi hava krøkt seg í.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við Tabernakli Tínar hátignar á teimum hægstu tindum og Trónuhimli Tínar Opinberingar á teimum hægstu heygum, um náðiliga at hjálpa mær at gera tað, ið Tín vilji hevur ynskt og Tín ætlan hevur manifesterað. Tú sært meg, O mín Guð, halda í Tínum Navni, hin Mest Heilagi, hin Mest Lýsandi, hin Mest Mæti, hin Mest Mikli, hin Mest Upphevjaði, hin Mest Dýrdarligi, og krøkja meg í seymin á tí glæstribúna, sum øll í hesum heimi og í tí komandi heimi hava krøkt seg í.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við Tínum Fagurleika, sum skínur fram yvir havsbrúgv ævinleikans, ein Fagurleiki, frammanfyri hvørjum, so skjótt sum hann opinberar seg sjálvan, kongsríki fagurleikans boyggir seg niður í tilbiðjan og lovprísan av honum við ringjandi tónum, um at geva, at eg kann doyggja frá øllum tí, ið eg eigi og liva fyri øllum tí, ið hoyrir Tær til. Tú sært meg, O mín Guð, halda í Tínum Navni, hin Mest Heilagi, hin Mest Lýsandi, hin Mest Mæti, hin Mest Mikli, hin Mest Upphevjaði, hin Mest Dýrdarligi, og krøkja meg í seymin á tí glæstribúna, sum øll í hesum heimi og í tí komandi heimi hava krøkt seg í.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við Manifestasjónini av Tínum Navni, hin Høgt-Elskaði, við Hvørjum hjørtuni hjá Tínum elskarum vórðu tærd og sálirnar hjá øllum, ið búgva á jørð, hava hevjað seg høgt upp, um at hjálpa mær at minnast Teg millum Tínar skapningar og at lovsyngja Teg millum Títt fólk. Tú sært meg, O mín Guð, halda í Tínum Navni, hin Mest Heilagi, hin Mest Lýsandi, hin Mest Mæti, hin Mest Mikli, hin Mest Upphevjaði, hin Mest Dýrdarligi, og krøkja meg í seymin á tí glæstribúna, sum øll í hesum heimi og í tí komandi heimi hava krøkt seg í.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við skróvanini frá tí Guddómliga Lotus-trænum og mutlanini frá lotum Tínar talunnar í kongsríki Tína navnanna, um at taka meg burtur frá øllum tí, ið Tín vilji hevur andstygd fyri og at draga meg nær at tí tignarstigi, í hvørjum Hann, sum er Degningur Tíni teknanna, hevur skinið fram. Tú sært meg, O mín Guð, halda í Tínum Navni, hin Mest Heilagi, hin Mest Lýsandi, hin Mest Mæti, hin Mest Mikli, hin Mest Upphevjaði, hin Mest Dýrdarligi, og krøkja meg í seymin á tí glæstribúna, sum øll í hesum heimi og í tí komandi heimi hava krøkt seg í.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við tí Bókstavi, sum, so skjótt sum hann kom út úr munni Tíns vilja, hevur fingið høv at alda og vindarnar at blása og fruktirnar at opinberast og trøini at næla og øll gomul spor at hvørva og øll slør at verða skrødd sundur og tey, ið eru Tær alskin, at skunda sær til ljósið av ásjón teirra Harra, hinum Ótvingaða, um at gera mær kunnugt tað, ið lá loynt í skattkømrum Tíns kunnleiks og fjalt í goymslum Tíns vísdóms. Tú sært meg, O mín Guð, halda í Tínum Navni, hin Mest Heilagi, hin Mest Lýsandi, hin Mest Mæti, hin Mest Mikli, hin Mest Upphevjaði, hin Mest Dýrdarligi, og krøkja meg í seymin á tí glæstribúna, sum øll í hesum heimi og í tí komandi heimi hava krøkt seg í.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við eldi Tíns kærleiks, ið rak svøvn úr eygunum á Tínum útvaldu og Tínum elskaðu, og við teirra minning um Teg og teirra lovprísan av Tær í degningstímanum, um at telja meg millum slík, ið eru nádd tað, ið Tú hevur sent niður í Tínari Bók og manifesterað við Tínum vilja. Tú sært meg, O mín Guð, halda í Tínum Navni, hin Mest Heilagi, hin Mest Lýsandi, hin Mest Mæti, hin Mest Mikli, hin Mest Upphevjaði, hin Mest Dýrdarligi, og krøkja meg í seymin á tí glæstribúna, sum øll í hesum heimi og í tí komandi heimi hava krøkt seg í.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við ljósinum av Tínari ásjón, ið fær tey, ið eru Tær nær, at møta ørvum Tína boðanna og tey, ið eru Tær alskin, at standa fyri svørðum Tína fígginda á Tínari gøtu, um at skriva niður fyri mær við Tínum mest upphevjaða Penni tað, ið Tú hevur skrivað niður fyri Tínum álitnu ( trusted ones ) og Tínum útvaldu. Tú sært meg, O mín Guð, halda í Tínum Navni, hin Mest Heilagi, hin Mest Lýsandi, hin Mest Mæti, hin Mest Mikli, hin Mest Upphevjaði, hin Mest Dýrdarligi, og krøkja meg í seymin á tí glæstribúna, sum øll í hesum heimi og í tí komandi heimi hava krøkt seg í.

Eg bøni Teg, O mín Guð, við Tínum Navni, við hvørjum Tú hevur lurtað eftir kallinum frá Tínum elskarum og suffunum hjá teimum, ið leingjast eftir Tær og rópunum frá teimum, ið hava næra atgongd til Tín og stynjanini hjá teimum, ið eru Tær alskin, og við hvørjum Tú hevur lúkað ynskini hjá teimum, ið hava sett sínar vónir á Teg og hevur givið teimum tað, ið tey vildu hava við Tínari náði og Tínum tokka og við Tínum Navni, við hvørjum hav fyrigevingar aldaði frammanfyri Tínum andliti og skýggj Títt hásinnis regnaðu á Tínar tænarar, um at skriva niður fyri hvønn tann, ið hevur vent sær til Tín og hildið føstuna, ið er fyrisett av Tær, tí samsýning, ið er ásett teimum, sum ikki tosa uttan við loyvi frá Tær og sum fóru frá øllum, sum tey áttu, á Tínari gøtu og av kærleika fyri Tær.

Eg bøni Teg, O mín Harri, við Tær sjálvum og við Tínum teknum og Tínum greiðu prógvum og tí skínandi ljósinum frá Morgunstjørnu Tíns Fagurleiks og Tínum Greinum, um at strika misbrotini hjá teimum, ið hava hildið fast við Tínar lógir og hava hildið tað, ið Tú hevur fyrisett teimum í Tínari Bók. Tú sært meg, O mín Guð, halda í Tínum

Navni, hin Mest Heilagi, hin Mest Lýsandi, hin Mest Mæti, hin Mest Mikli, hin Mest Upphevjaði, hin Mest Dýrdarligi, og krøkja meg í seymin á tí glæstribúna, sum øll í hesum heimi og í tí komandi heimi hava krøkt seg í.

Bahá'u'lláh

Prís veri Tær, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við hesari Opinbering, sum myrkur er vorðið til ljós við, við hvørjari tann ofta vitjaði Halgidómurin er bygdur og tann Skrivaða Talvan opinberað og tann Útbreidda Skrift-rullan avdúkað, um at senda niður til mín og til tey, sum eru saman við mær, tað, ið fer at gera okkum før fyri at hevja okkum upp til himlar Tínar gøvgaðu dýrdar og fer at reinsa okkum fyri blettinum av slíkum ivum, ið hava forðað teimum illgrunasomu í at koma inn í tabernakul Tínar eindarinnar.

Eg eri tann, O mín Harri, sum hevur hildið fast í strongi Tínar alsknu góðvildar og hevur krøkt seg í seym Tínar miskunnar og Tíns tokka. Fyriskipa Tú mær og mínum elskaðu tað góða av hesum heimi og av tí komandi heimi. Útvega teimum tá ta Loyndu Gávu, ið Tú fyriskipaði teimum mest framúrskarandi av Tínum skapningum.

Hesir eru, O mín Harri, teir dagar, sum Tú hevur álagt Tínum tænarum at fasta í. Vælsignaður er tann, ið heldur føstuna einans fyri Tína skuld og við avgjørdum skilnaði frá øllum uttan Tær. Hjálp mær og hjálp teimum, O mín Guð, at akta Teg og at halda Tínar fyriskipanir. Tú hevur, sanniliga, megi til at gera tað, ið Tær lystir.

Tað er eingin Guð uttan Tú, hin Al-Vitandi, hin Alvísi. Øll prís veri Guði, Harra alra heima.

Bahá'u'lláh

Hesir eru, O mín Guð, teir dagar har Tú álegði Tínum tænarum at halda føstuna. Við henni prýddi Tú inngangin í Bók Tínar Lóganna, ið varð opinberað fyri Tínum skapningum, og prýddi ( didst deck forth ) Goymslustøð ( repositories ) Tínar Boðanna fyri eygunum á øllum, ið eru í Tínum himli og øllum, ið eru á Tínari jørð. Tú hevur útgjørt hvønn tíma av hesum døgum við einari serligari dygd, ið er órannsakandi fyri øllum uttan Tær, Hvørs kunnleiki fevnir um allar skaptar lutir. Tú hevur, eisini, tillutað hvørjari sál ein part av hesari dygd í samsvari við Talvu Tínar fyriskipanar og Skriftir Tíns óbroytiliga dóms. Hvørt blað í hesum Bókum og Skriftum hevur Tú, harafturat, lutað hvørjum fólkaslagi og hvørjari ætt jarðarinnar.

Tínum gløðandi elskarum hevur Tú, sambært Tínari fyriskipan, ætlað, í hvørjari morgunlýsing, bikar Tínar minningar, O Tú, Sum ert Valdsharri alra valdsharra! Hesi eru tey, ið eru vorðin so drukkin av víni Tíns margfalda vísdóms, at tey forsaka legur sínar í teirra longsli eftir at hátíðarhalda Tína lovprísan og at lovsyngja Tínar dygdir, og flýggja undan svøvni í teirra ídni eftir at nærkast Tínari hjáveru og at fáa lut í Tínum gávumildi. Eygu teirra hava, til allar tíðir, verið vend ímóti Degningi Tínar miskunnar,

og andlit teirra fest á Keldu Tíns íblásturs. Regna tá niður á okkum og á tey úr skýggjum Tínar náðinnar tað, ið sømir seg himli Títt stórtøknis og hásinnis.

Lovprísað veri Títt navn, O mín Guð! Hetta er tímin tá ið Tú hevur læst upp dyr Títt gávumildis fyri andlitunum hjá Tínum skapningum, og latið víðupp portursdyr Tínar eymu náðinnar fyri øllum, ið dvølja á Tínari jørð. Eg bøni Teg, við øllum teimum hvørs blóð varð helt út á Tínari gøtu, sum, í teirra tráan eftir Tær, loystu seg frá øllum tilknýti til nakran av Tínum skapningum, og sum vórðu so hugtikin av teimum søtu angunum frá Tínum íblástri, at hvør einasti limur á likamum teirra sang Tína lovprísan og titraði til Tína minning, um ikki at halda aftur frá okkum tað, ið Tú óbroytiliga hevur fyriskipað í hesari Opinbering – ein Opinbering hvørs megi hevur fingið hvørt træ at skríggja tað, sum hin Brennandi Runnurin frammanundan hevði kunngjørt fyri Mósesi, ið samtalaði við Teg, ein Opinbering, ið hevur gjørt hvønn hin minsta smástein føran fyri at ljóma aftur við Tínari lovprísan, eins og steinarnir hálovaðu Teg á døgum Muhammads, Tínum Vini.

Hesi eru tey, O mín Guð, ið Tú náðiliga hevur gjørt før fyri at hava felagsskap við Teg og at tala í trúnaði við Hann, Sum er Opinberarin av Tær Sjálvum. Vindar Vilja Tíns hava spjatt tey víða um inntil Tú savnaði tey saman undir skugga Tínum, og fekk tey at fara inn í eginøki Títt hovs. Nú tá ið Tú hevur fingið tey at dvølja undir skugga trónuhimins Tínar náðinnar, hjálp teimum at náa tað, ið hóskar seg einum so gøvgaðum tignarstigi. Lat tey ikki, O mín Harri, gerast tald millum teirra, sum, hóast at tey hava næra atgongd til Tín, eru hildin aftur frá at kenna aftur Títt andlit og, sum, hóast at tey møta Tær, eru frátikin Tína hjáveru.

Hesi eru Tínir tænarir, O mín Harri, ið eru farin inn saman við Tær í hetta, hitt Mest Mikla Fongslið, ið hava hildið føstuna innanfyri veggir tess í samsvari við tað, ið Tú hevur álagt teimum í Talvum Tínar avgerðar og í Bókum Títt boðs. Send, tískil, niður á tey tað, ið fullkomiliga fer at reinsa tey fyri alt, ið Tú hevur andstygd fyri, so at tey til fulnar mega gerast trúføst ímóti Tær, og gera seg sjálvi leys frá øllum uttan Tær.

Regna, tá, niður á okkum, O mín Guð, tað, ið sømir seg Tínari miskunn og hóskar seg Tínum gávumildi. Ger okkum, tá, O mín Guð, før fyri at liva í minning um Teg og at doyggja í kærleika fyri Tær, og veit okkum gávu Tínar hjáverunnar í Tínum heimum hereftir – heimar, ið eru órannsakandi fyri øll uttan Teg. Tú ert okkara Harri og Harri alra heima, og Guð hjá øllum, ið eru í himli og á jørð.

Tú sært, O mín Guð, hvat Tínum kæru hevur verið fyri á Tínum døgum. Tín dýrd er mítt vitni! Eymkanarrøddin hjá Tínum útvaldu er hevjað um alt Títt ríki. Summi vórðu fangað av teimum vantrúgvandi í Tínum landi, og vórðu forðað av teimum í at hava næra atgongd til Tín og í at náa hov Tínar dýrdar. Onnur vóru før fyri at nærkast Tær, men vórðu hildin aftur frá at skoða Títt andlit. Uppaftur onnur fingu loyvi, í teirra ídni eftir at líta at Tær, at koma inn í eginøki Títt hovs, men tey lótu slørið frá ímyndingum Tína skapninga og misbjóðingarnar, framdar av kúgarunum millum Títt fólk, at koma ímillum tey og Teg.

Hetta er tímin, O mín Harri, ið Tú hevur fingið at bera av einhvørjum øðrum tíma, og hevur tengt at teimum mest framúrskarandi av Tínum skapningum. Eg bøni Teg, O mín Guð, við Tínum Sjálvi og við teimum, um í hesum ári at skipa fyri tí, ið fer at upphevja Tíni elskaðu. Fyriskipa, harumframt, í hesum ári tað, ið fer at fáa Morgunstjørnu Títt

valds at skína bjart yvir havsbrúgv Tínar dýrdar, og við Tínari hægstráðandi megi at upplýsa allan heimin.

Ger Tína Søk sigrandi, O mín Harri, og eyðmýk Tú Tínar fíggindar. Skriva tá niður fyri okkum tað góða í hesum lívi og í hinum komandi lívi. Tú ert Sannleikin, Sum kennir teir loyniligu lutirnar. Eingin Guð er uttan Tú, hin Æviga-Fyrigevandi, hin Al-Gávumildi.

Bahá'u'lláh

Dýrd veri Tær, O Harri mín Guð! Hesir eru teir dagar tá ið hevur álagt øllum menniskjum at halda føstuna, so at gjøgnum hana tey mega reinsa sínar sálir og gera seg ley frá øllum bindingum til nakran uttan Teg, og so at frá teirra hjørtum kann rísa upp tað, ið fer at vera verdugt hovi Tínar hátignar og fer at vera hóskandi sæti opinberinganna av Tínum einleika. Gev, O mín Harri, at hendan føsta kann gerast ein á við lív-gevandi vøtnum og fer at geva av sær ta dygd, ið Tú hevur búgvað hana út við. Reinska Tú við henni hjørtuni hjá Tínum tænarum, sum tað illa í hesum heimi ikki er eydnast at forða í at venda sær móti Tínum al-dýrdarliga Navni, og sum eru vorðin verandi óvikaði av óljóði og roki teirra, ið hava avvíst Tíni mest glæsiligu tekin, ið eru fylgd við komuni av Tínari Manifestasjón, Sum Tú hevur búgvað út við Tínum fullveldi, Tínari megi, Tínari hátign og dýrd. Hesir eru teir tænarir, sum, so skjótt sum at Títt kall náddi teir, skundaðu sær mótvegis Tínari náði og vórðu ikki hildnir aftur frá Tær av broytingum og tilvildum hesum heimsins ella av nakrari menniskjaligari avmarking.

Eg eri hann, O mín Guð, ið vitnar um Tína eind, ið ásannar Tín einleika, ið boyggir seg eyðmjúkliga niður fyri opinberingunum av Tínari hátign, og sum við niðurvendum andliti viðurkennur glamparnar frá ljósinum í Tínari upphevjaðu dýrd. Eg havi trúð á Teg eftir at Tú gjørdi meg føran fyri at kenna Títt Sjálvi, Sum Tú hevur opinberað fyri eygum menniskjunna gjøgnum megi Tíns fullveldis og máttars. Móti Honum havi eg vent mær, fullkomiliga loystur frá øllum lutum, og krøki meg trúgvur í strong Tínar gávunnar og góðvildar. Eg havi tikið ímóti Hansara sannleika, og sannleikanum í øllum teimum undursomu lógunum og fyriskipanunum, ið eru sendar niður til Hann. Eg havi fastað av kærleika fyri Tær og samsvarandi við Títt boð, og havi brotið mína føstu við Tínari lovprísan á mínari tungu og í samsvari við Tín tokka. Lat meg ikki, O mín Harri, gerast taldur millum teirra, sum hava fastað um dagin, sum um kvøldið hava lagt seg niður eftir rommum fyri andliti Tínum, og sum hava avvíst Tín sannleika, ikki trúð á Tíni tekin, mælt ímóti Tínum vitnisburði, og avskeplað Tínar framsagnir.

Lat Tú upp, O mín Harri, míni eygu og eygu alra teirra, ið hava sóknast eftir Tær, so at vit mega kenna Teg aftur við Tínum egnu eygum. Hetta er boð Títt, ið er givið okkum í tí Bók, sum er send niður av Tær til Hann, Sum Tú hevur valt við boði Tínum, Sum Tú hevur útvalt Tær til Tína góðvild yvir allar aðrar skapningar, Sum Tú hevur verið Tín fragd ( been pleased to ) at útgera við Tínum fullveldi, og Sum Tú hevur serliga givið fyrimunir til ( favored ) og litið upp í hendur Tín Boðskap til Títt fólk. Lovaður veri Tú, tí, O mín Guð, fyri at Tú náðiliga hevur gjørt okkum før fyri at viðurkenna Hann og at

ásanna alt tað, ið er sent niður til Hann, og veitt okkum heiðurin at náa hjáveru Hansara, Sum Tú fyrijáttaði í Tínari Bók og í Tínum Talvum.

Tú sært meg tá, O mín Guð, við mínum andliti vendum móti Tær, ímeðan eg trúgvur krøki meg í strong Tínar náðilig forsjónar og Tíns gávumildis, og halda fast í seymi Tínar eymu miskunnar og gávumildu náðinnar. Oyðilegg ikki, bøni eg Teg, mínar vónir um at náa til tað, ið Tú hevur fyriskipað Tínum tænarum, ið hava vent sær móti eginøkjum Títt hovs og friðskjóli Tínar hjáverunnar, og hava hildið føstuna av kærleika fyri Tær. Eg viðgangi, O mín Guð, at alt tað, ið kemur frá mær, er fullkomiliga óverdugt Tínum fullveldi og nær ikki upp til Tína hátign. Og kortini bøni eg Teg við Tínum Navni gjøgnum hvørt Tú hevur opinberað Títt Sjálvi, í dýrdini í Tínum mest framúrskarandi heitum, fyri øllum skapningum, í hesari Opinbering við hvørjari Tú hevur, gjøgnum Títt mest glæsiliga Navn, gjørt sjónligan Tín fagurleika, um at geva mær at drekka av víni Tínar miskunnar og av tí reina drykki Tínar góðvildarinnar, ið hava runnið úr høgru hond Tíns viljans, so at eg í tann mun kann festa míni eygu á Teg og gerast so leysur av øllum uttan Tær, at heimurin og alt, sum er skapt í honum, kunnu tykjast fyri mær eins og ein stokkutur dagur, sum Tú ikki hevur hirt at skapa.

Eg bøni Teg harumframt, O mín Guð, um at regna niður, úr himli Tíns viljans og skýggjum Tínar miskunnar tað, ið fer at reinsa okkum frá andstyggiligu roykunum frá okkara misbrotum, O Tú, Sum hevur kallað Teg Sjálvan Guð Miskunnar! Tú ert, sanniliga, hin Mest Máttmikli, hin Al-Dýrdarligi, hin Góðgerandi.

Rek ikki burtur hann, O mín Harri, ið hevur vent sær móti Tær, lat ei heldur hann, ið er komin Tær nær, verða fluttan langt burtur frá Tínum hovi. Brest ikki vónirnar hjá tí biðjandi, sum langtandi hevur strekt út hendur sínar fyri at sóknast eftir Tínari náði og góðvild, og lat ikki Tínar falsleysu tænarar vera uttan undur Tínar eymu miskunnar og Tíns kærleiks. Fyrigevandi og Gávumildur ert Tú, O mín Harri! Megi hevur Tú til at gera tað, ið Tær lystir. Øll onnur uttan Tú eru máttleys frammanfyri opinberingunum av Tínari megi, eru eins og fyri ongum yvir av prógvunumum um Títt ríkidømi, eru eins og einki í samanbering við manifestasjónirnar av Tínum upphevjaða fullveldi, og eru sør fyri alla styrki tá ið tey eru andlit til andlits við tekin og ímyndir Títt valds. Hvat friðskjól er uttan Tú, O mín Harri, sum eg kann flýggja til, og hvar er ein hvíldarstaður, sum eg kann skunda mær til? Nei, vald Tínar meginnar er mítt vitni! Eingin verji er uttan Tú, einki stað at flýggja til uttan Tú, einki friðskjól at søkja uttan Tú. Fá meg at smakka, O mín Harri, guddómliga søtleika Tínar minningarinnar og lovprísannar. Eg svørji við Tínum mátti! Hvør tann, ið smakkar søtleika tess fer at loysa seg frá øllum bindingum til heimin og øllum í honum, og fer at venda andliti sínum móti Tær, reinsaður frá minningini um nakran uttan Teg.

Íblás tá mína sál, O mín Guð, við Tínari undurfullu minning, so at eg kann prísa Tínum navni. Tel meg ikki millum teirra, ið lesa Tíni orð og ikki eydnast at finna Tína loyndu gávu, sum fyriskipað av Tær, er rúmað harí, og sum fær sálir Tína skapninganna og hjørtu tænaranna Tína at kvaklast. Fá meg, O mín Harri, at gerast taldur millum teirra, ið eru vorðin so hugfangaði av teimum søtu angunum, ið hava rikið í Tínum døgum, at tey hava ofrað lív sítt fyri Teg og skundað sær til staðið har tey skulu doyggja í teirra longsli eftir at skoða fagurleika Tín og í teirra tráan eftir at náa Tína hjáveru. Og

um nakar segði við tey á teirra leið, “Hvagar fara tit?” høvdu tey sagt, “Til Guð, hin Alt-Eigandi, Hjálpin í Neyðini, hin Sjálv-Uppihaldandi!”

Misbrotini, ið eru framd av slíkum, sum hava vent sær burtur frá Tær og hava borið seg hugmóðiga at ímóti Tær, hava ikki nyttað til at forða teimum í at elska Teg, og í at venda teirra andlitum móti Tær, og í at venda sær mótvegis Tínari miskunn. Hesi eru tey, ið eru vælsignaði av Fjøldini í tí høga, ið eru lovprísaði av íbúgvunum í teimum ævigu býunum, og harumframt eisini av teimum á hvørs pannum Tín mest upphevjaði pennur hevur skrivað: “Hesi! Fólkið hjá Bahá! Gjøgnum tey eru kastaðir glamparnir frá ljósi vegleiðingarnar.” Soleiðis er tað vorðið fyriskipað, eftir Tínum boðum og við Tínum vilja, í Talvu Tínar óbroytiligu avgerðanna.

Kunnger, tískil, O mín Guð, teirra stórleika og stórleika teirra, sum, ímeðan tey vóru á lívi ella aftaná deyðan, hava malið rundan um tey. Veit teimum tað, ið Tú hevur fyriskipað teimum rættvísu millum Tínar skapningar. Mætur ert Tú at gera alt. Eingin Guð er uttan Tú, hin Al-Máttmikli, Hjálpin í Neyðini, hin Almáttugi, hin Mest Gávumildi.

Fá ikki okkara føstur at halda uppat við hesari føstuni, O mín Harri, ei heldur teir sáttmálar, ið Tú hevur gjørt, við hesum sáttmála. Góðtak alt tað, vit hava gjørt av kærleika fyri Tær, og fyri Tínar fragdanna sakir, og alt tað, vit hava latið vera ógjørt sum eitt úrslit av at vit hava givið okkum undir okkara óndu og spiltu tráanir. Ger okkum, tá, før fyri at krøkja okkum trúgv í Tín Kærleika og Tína vælvild, og varðveit okkum frá ónáðunum frá teimum, ið hava avnoktað Teg og hava kastað aftur Tíni mest ljómandi tekin. Tú ert, av sonnum, Harri hendan heims og hins næsta. Eingin Guð er uttan Tú, hin Upphevjaði, hin Mest Høgi.

Lovprísa Tú, O Harri mín Guð, Honum, Sum er hitt Upprunaliga Punktið, hin Guddómligi Loynidómurin, hin Ósæddi Kjarnin, Degningur Guddómleikans, og Manifestasjónin av Tínum Yvirvaldi, gjøgnum Hvønn allur kunnleiki um fortíðina og allur kunnleikin um framtíðina vórðu gjørdir týðiligir, gjøgnum Hvønn perlur Tíns fjalda vísdóms vórðu avdúkaðir, og loynidómur Títt goymda navns opinberað, Sum Tú hevur tilnevnt sum Kunngera av av Honum gjøgnum Hvørs navn bókstavirnir V-E-R-Ð eru settir samanskoyttir og bundnir saman, gjøgnum Hvønn Tín hátign, Títt fullveldi og Tín máttur vórðu gjørd kend, gjøgnum Hvønn Tíni orð eru send niður, og Tínar lógir settar fram við klárleika, og Tíni tekin breidd út, og Títt Orð fest rót, gjøgnum Hvønn hjørtuni hjá Tínum útvaldu vórðu avhyljað, og øll í himli og øll á jørð vórðu savnaði saman, Sum Tú hevur kallað ‘Alí-Muhammad í kongsríki Tína navnanna, og Andi Andanna í Talvum Tína óbroytiliga boðanna, Sum Tú hevur gjørt út við Tínum egna heiti, til Hvørs navn øll onnur nøvn, eftir Tínum boðum og gjøgnum vald Tínar meginnar, eru fingin at venda aftur, og í Hvørjum Tú hevur fingið allar Tínar eginleikar og øll Tíni heiti at náa teirra endaligu fullfíggjan. Honum hoyra eisini til tey nøvn, ið lógu goymd í Tínum óblettaðu tabernaklum, í Tínum ósjónliga heimi og í Tínum halgaðu býum.

Lovprísa Tú, harumframt, tey, ið hava trúð á Hann og á Hansara tekin og hava vent sær móti Honum millum teirra, ið hava viðurkent Tína eind í Hansara Seinnu Manifestasjón – ein Manifestasjón, sum Hann hevur nevnt í Sínum Talvum, og í Sínum Bókum, og í Sínum Skriftum, og í øllum teimum undursomu versum og gimsteina-líku

framsagnum, ið eru komin niður á Hann. Tað er hendan sama Manifestasjón Hvørs sáttmála Tú hevur biðið Hann grundfesta áðrenn Hann hevði grundfest Sín egna sáttmála. Hann er tann Hvørs lovprísan Bayánin hevur heiðrað. Í henni er Hansara framúrleiki vorðin lovsungin, og Hansara sanleiki grundfestur, og Hansara fullveldi kunngjørt, og Hansara Søk gjørd fullkomin. Vælsignaður er tann maður, ið hevur vent sær móti Honum, og hevur framt tað, ið Hann hevur givið boð um, O Tú, Sum ert Harri heimanna og Tráanin hjá øllum teimum, ið hava kent Teg.

Lovprísaður veri Tú, O mín Guð, við tað at Tú hevur stuðlað okkum í at viðurkenna og elska Hann. Eg bøni Teg, tískil, við Honum og við Teimum, Sum eru Degningar Tíns guddómleiks, og Manifestasjónir Títt Yvirvalds, og Skattkømur Tínar Opinberingar, og Goymslustøð Tíns íblásturs, um at gera okkum før fyri at tæna og akta Hann, og at styrkja okkum í at gerast hjálparar Sakar Hansara og spjaðarar av fíggindum Hansara. Máttmikil ert Tú til at gera sum Tær lystir. Eingin Guð er uttan Tú, hin Almáttugi, hin Al-Dýrdarligi, Hann Hvørs hjálp øll menniskju sóknast eftir!

Bahá'u'lláh

# NAW-RÚZ

( Naw-Rúz, 21. Mars, er fyrsti dagurin í Bahá'í árinum. )

Lovaður veri Tú, O mín Guð, at Tú hevur fyriskipað Naw-Rúz sum eitt hátíðarhald tey, ið hava hildið føstuna av kærleika fyri Tær og hava hildið seg frá øllum, ið Tú hevur andstygd fyri. Gev, O mín Harri, at eldur kærleiks Tíns og hitin, ið er framleiddur av føstuni, ið er áløgd av Tær, kann eggja ( inflame ) tey í Søk Tínari, og fáa tey at gerast upptikin við Tínari lovprísan og við minning um Teg.

Við tað at Tú hevur prýtt tey, O mín Harri, við prýði føstunnar, ið er fyriskrivað av Tær, prýð tey tá eisini við prýði Tínar góðkenningar, gjøgnum Tína miskunn og gávumilda tokka. Tí at gerningar menniskjunna eru allir bundnir at Tínari vælvild og eru treytaðir av Tínum boðum. Skuldi Tú mett Hann, ið hevur brotið føstuna, sum ein, ið hevur hildið hana, vildi ein slíkur maður verði taldur millum teirra, sum í allar ævir hava hildið føstuna. Og skuldi Tú gjørt av, at hann, ið hevur hildið føstuna hevur brotið hana, vildi tann persónur verði taldur millum teirra, ið hava fingið glæstribúna Tínar Opinberingar at gerast dálkaður við dusti, og eru blivin rikin langt burtur frá krystalkláru vøtnunum úr hesum livandi gosbrunni.

Tú ert Hann gjøgnum Hvønn merkið "Rósverdur ert Tú í verkum Tínum" er lyft upp, og fánin "Aktaður ert Tú í Tínum boðum" er breiddur út. Ger kunnugt hetta tignarstig Títt, O mín Guð, fyri tænarum Tínum, so at teir mega gerast greiðir yvir at dygdargøðska alra luta er bundin at Tínum boði og Tínum orði, og at dygdin í hvørjari gerð er treytað av Tínum loyvi og vælvild Tíns viljans, og mega ásanna at teymarnir á gerningum menniskjunna eru í taki Tínar góðkenningar og Títt boðs. Ger teimum hetta kunnugt, so at als einki skal stongja tey úti frá Tínum Fagurleika, í hesum døgum har

Kristus rópar: “Alt ræði er Títt, O Tú Upphav Andans ( Jesus )”, og Vinur Tín ( Muhammad ) kallar: “Dýrd veri Tær, O Tú Hægst-Elskaði, fyri at Tú hevur avhyljað Tín Fagurleika, og skrivað niður fyri Tínum útvaldu tað, ið fer at fáa tey at náa sæti opinberinganna av Tínum Mest Mikla Navni, gjøgnum hvørt øll fólkasløgini hava eymkað seg uttan slík, ið hava loyst seg sjálvi frá øllum uttan Tær, og hava vent sær móti Honum, Sum er Opinberarin av Tær Sjálvum og er Manifestasjónin av Tínum eginleikum.”

Hann, Sum er Tín Grein og allur skari Tín, O mín Harri, hava hendan dag brotið føstuna eftir at hava hildið hana innanfyri eginøki Títt hovs, og í teirra ídni eftir at gera Tær til vildar. Fyriskipa Honum, og teimum, og øllum slíkum, ið eru farin inn í hja´veru Tína í hesum døgum, alt tað góða, ið Tú frammanundan gjørdi av í Bók Tínari. Veit teimum tá, tað, ið fer at gagna teimum í bæði hesum lívi og í lívinum fyri handan.

Tú, av sonnum, ert hin Al-Vitandi, hin Al-Vísi.

Bahá’u’lláh

# INDEX


“Av teimum søtt angandi streymum Tíns ævinleiks...”
“Dýrd veri Tær, O Guð. Hvussu kann eg nevna Teg, tá ið...”
”Dýrd veri Tær, O Harri alra heima og Tráan tjóðanna...”
”Dýrd veri Tær, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg...”
“Dýrd veri Tær, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum Navni...”
“Dýrd veri Tær, O Harri mín Guð! Eyðmýk ikki hann, ið...”
“Dýrd veri Tær, O Harri mín Guð! Hesir eru teir dagar...”
“Dýrd veri Tær, O Harri, Tú sum hevur gjørt...”
“Dýrd veri Tær, O Kongur ævinleikans og Skaparin av tjóðum...”
”Dýrd veri Tær, O mín Guð! Sanniliga, hesin tænari Tín...”
“Dýrd veri Tær, O mín Guð! Um tað ikki var...”
“Eg biði Teg við Tínari megi, O mín Guð!...”
“Eg biði um Tína fyrigeving, O mín Guð, og bøni...”
“Eg bøni Teg um at fyrigeva mær, O mín Harri, hvørja umrøðu...”
“Eg bøni Teg, O mín Guð, við Tínum mæta Tekni...”
“Eg eri tann, O mín Harri, sum hevur vent sínum andliti ímóti Tær...”
“Eg eri vaknaður í Tínum skýli, O mín Guð...”
“Eg gevi Tær prís, O mín Guð, fyri at Tú hevur vakt meg...”
“Eg havi reist meg hendan morgun...”

“Eg veit ikki, O mín Guð, hvat tað er fyri ein Eldur...”
”Eg vitni, O mín Guð, at Tú hevur skapað meg...”
”Er tað nakar Burturbeinari av trupulleikum...”
”Fá mína sorg til at hvørva við Tínum gávumildi...”
“Fyriskipa mær, O mín Harri, og teimum, ið trúgva á Teg...”
”Ger okkara fótafet føst, O Harri, á Tínari gøtu...”
”Hálovaður veri Tú, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg...”
“Hann er Grøðarin, Nøktarin, Hjálparin, hin Al-Fyrigevandi...”
“Hann er Guð! O Guð, mín Guð! Hesir eru tænarar, sum á Tínum døgum...”
“Hann er Guð! O Harri, mín Guð, mín Høgt-Elskaði! Hesir eru...”
“Hann er Guð! O makaleysi Harri! Í Tínum almáttuga vísdómi...”
“Hann er Guð, upphevjaður er Hann, Harri miskunnar...”
“Hann er hin Al-Dýrdarligi! O Guð, mín Guð! Eyðmjúkur...”
“Hann er hin bønahoyrandi, bønasvarandi Guð!...”
“Hann er hin Mæti, Fyrigevarin, hin Samkennandi!...”
“Hann er hin Náðiligi, hin Al-Dýrdarligi! O Guð, mín Guð! Tín kallan...”
“Hann er hin Náðiligi, hin Høgt-Elskaði! O Heilagi Sjófari!...”
“Hann er hin Samkennandi, hin Al-Gávumildi!...”
“Hann er Kongurin, hin Alvitandi, hin Vísi!...”
“Hann er Veitarin, hin Gávumildi!...”
”Harri! Neyðarslig eru vit, gev okkum Tína vælvild...”
“Heiðraður ert Tú, O Harri mín Guð! Eg veiti Tær takk...”
“Heiðraður ert Tú, O mín Guð! Eg veiti Tær takk fyri at Tú hevur...”
”Heiður veri Tær, O Guð!...”
“Hesir eru, O mín Guð, teir dagar...”
“Hvussu kann eg velja at sova, O Guð, mín Guð...”
“Í Guðs Navni, hin Mest Høgi! Lovaður og heiðraður...”
”Í Navni Guðs, Harrin av ávinnandi hátign...”
”Í Navni Guðs, hins Mest Fyrndargamla, hins Mest Mikla...”
”Í Navni Tíns Harra, Skaparin, hin Hægsti, hin Alt-Nøktandi...”
“Lovaður ert Tú, O Harri mín Guð! Eg veiti Tær takk...”
“Lovaður ert Tú, O Harri mín Guð! Hvørt menniskja...”
“Lovað veri Títt Navn, O Harri, Guð okkara! Tú ert av sonnum...”
“Lovað veri Títt navn, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg...”
“Lovað veri Títt navn, O Harri mín Guð! Myrkur er komið...”
“Lovað veri Navn Títt, O Harri mín Guð! Eg eri Tín tænari...”
“Lovað veri Títt navn, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg...”
“Lovað veri Títt navn, O Harri mín Guð! Tú ert Tann...”
“Lovað veri Títt navn, O mín Guð, fyri at Tú hevur manifesterað Dagin...”
“Lovað veri Títt navn, O mín Guð og Guð alra luta, mín Dýrd...”
“Lovaður ert Tú, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Honum...”
“Lovaður og prísaður veri Tú, O mín Guð! Eg bøni...”
“Lovaður veri Tú, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum Útvaldu...”
“Lovaður veri Tú, O Harri mín Guð! Hvørja ferð eg hætti mær...”

“Lovaður veri Tú, O mín Guð, at Tú hevur fyriskipað Naw-Rúz...”
“Lovprísað veri navn Títt, O mín Guð! Eg bøni Teg við angunum...”
“Lovprísaður og heiðraður ert Tú, O Guð! Gev, at tann dagur...”
“Lovprísaður veri Tú, O Harri mín Guð! Hetta er Tín tænari, ið hevur drukkið...”
“Lovprísaður veri Tú, O Harri, mín Hægst Elskaði! Ger meg støðufastan...”
“Lovprísan veri Tær, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum Navni...”
“Lovprísan veri Tær, O mín Guð! Eg eri ein av Tínum tænarum, ið hevur...”
“Loyv mær, O mín Guð, at nærkast Tær og at dvølja...”
”Mangt eitt kalt hjarta, O mín Guð, er sett í ljósan loga...”
”Mín Guð, mín Eldur og mítt Ljós! Teir dagar...”
“Mín Guð, mín Tilbidni, mín Kongur, mín Tráan! Hvør tunga...”
“Mín Guð, sum eg tilbiði og elski inniliga! Eg vitni...”
“Mín Harri! Mín Harri! Eg prísi Tær og eg takki...”
“Navn Títt er mín grøðing, O mín Guð...”
“O Guð! Al upp hetta lítla barn í fangi Tíns kærleiks...”
“O Guð! Endurnýggja og gleð mín anda...”
“O Guð! Lær upp hesi børn...”
”O Guð okkara Harri! Líva okkum við Tínari náði...”
”O Guð, mín Guð! Eg bøni Teg við havi Tínar grøðingar...”
”O Guð, mín Guð! Eg eri farin frá mínum heimi...”
”O Guð, min Guð! Eg havi vent mær í iðran til Tín...”
“O Guð, mín Guð! Fyll mær tað bikar, ið er frígering frá øllum...”
“O Guð, mín Guð! Hendan terna Tín kallar...”
”O Guð, mín Guð! Hesir eru Tínir veiku tænarar...”
“O Guð, mín Guð! Hetta er Tín ljómandi tænari...”
“O Guð, mín Guð! Hjálp Tú Tínum álitnu tænarum at hava kærleiksfull...”
“O Guð mín Guð! Líva Tínum álitnu tænarum...”
“O Guð, mín Guð! Prís veri Tær fyri at hava tendrað...”
”O Guð, mín Guð! Tú ert mín Vón og mín Elskaði, mítt hægsta mál...”
”O Guð, mín Guð! Upplýs enni teirra, ið veruliga elska Teg...”
”O Guð, mín Guð! Vit eru Tínir tænarar, ið hava vent sær...”
”O Guð! O Guð! Úr tí ósædda kongsríki Tíns einleiks...”
“O Guð, sum ert Upphavið til allar Manifestasjónirnar...”
“O mín Guð, Guð gávumildis og miskunnar! Tú ert tann Kongur...”
“O mín Guð! Hetta er Tín tænari og sonur Tíns tænara, ið hevur trúð...”
“O mín Guð, hjálp Tú Tínum tænara at upphevja Orðið...”
“O mín Guð, mín Harri og mín Meistari! Eg havi loyst meg...”
“O mín Guð, mín Meistari, Málið fyri mínari tráan!...”
“O mín Guð og mín Meistari! Eg eri Tín tænari og sonur Tín tænara...”
“O mín Guð! O mín Guð! Dýrd veri Tær fyri tað at...”
“O mín Guð! O mín Guð! Hesin Tín tænari hevur tikið...”
“O mín Guð, O mín Guð! Sameina hjørtuni...”
“O mín Guð! O mín Guð! Sanniliga ákalli eg Teg...”
“O mín Guð! O mín Guð! Sanniliga, hesir tænarir venda sær til Tín...”

“O mín Guð! O mín Guð! Sanniliga, tænari Tín, eyðmjúkur frammanfyri...”
“O mín Guð! O Tú fyrigevari av syndum, veitari av gávum...”
“O Guddómliga Forsjón! Hendan samkoma er sett saman av Tínum vinum...”
”O Guð! O Guð! Úr tí ósædda kongsríki Tíns einleiks...”
“O Harri, eg havi vent mínum andliti ímóti Tínum kongsríki...”
“O Harri! Fá Træ Tínar guddómligu Eindar til at vaksa...”
“O Harri! Ger hesi børn til frálíkar plantur...”
”O Harri! Ger Tínar tolnu tænarar sigrandi...”
”O Harri! Ger øll fólkasløg jarðarinnar...”
”O Harri! Í hesari Mest Miklu Trúarskipan...”
”O Harri mín Guð! Hjálp Tínum elskaðu...”
”O Harri, mín Guð og mín Havn í mínari neyð!...”
”O Harri! Til Tín leiti eg mær fyri at finna skjól...”
”O Harri! Tú ert Burturbeinarin av hvørjari kvøl...”
”O mín Harri! Lat Tín fagurleika vera mína føði...”
“O mín Harri, mín Elskaði, mín Tráan! Ver hjá mær...”
“O mín Harri og mín Vón! Hjálp Tú Tínum elskaðu at vera stinn...”
“O mín Harri, O mín Harri! Hesi bæði bjørtu himnahválv...”
“O mín Harri! O mín Harri! Hetta er ein lampa...”
“O mín Harri! Tú veitst at fólkið er kringsett...”
“O samkennandi Guð! Takk fái Tú fyri at Tú hevur vakt meg...”
“O Tú blíði Harri! Hesir eru Tínir tænarar, ið eru savnaðir...”
“O Tú blíði Harri! O Tú sum ert hásinnaður...”
”O Tú blíði Harri! Tú hevur skapað alla mannaættina...”
”O Tú fyrigevandi Guð! Hesir tænarar venda sær til Títt kongsríki...”
”O Tú fyrigevandi Harri! Hóast at summar sálir hava brúkt...”
”O Tú fyrigevandi Harri! Tú ert skýlið hjá øllum hesum...”
”O Tú góði Harri! Hesi elskuligu børn...”
”O Tú góði Harri! Vit eru tænarar av Tínari Gátt, ið leita...”
”O Tú Harri kongsríkisins! Hóast at okkara likam eru savnaði...”
”O Tú Hvørs andlit er málið fyri mínari tilbiðjan, Hvørs fagurleiki...”
”O Tú Hvørs nærleiki er mítt ynski...”
”O Tú Hvørs roynslur eru ein grøðandi heilivágur...”
”O Tú makaleysi Harri! Lat hetta bróstabarn fáa...”
”O Tú, mín Guð, sum leiður tann søkjandi...”
“O Tú miskunnsami Guð! O Tú sum ert mætur og máttmikil...”
“O Tú samkennandi Harri, Tú sum ert hásinnaður...”
“O Tú, sum ert Harri alra navna og Skapari himlanna! Eg bøni Teg...”
“O Tú Uppihaldari! Tú hevur andað yvir vinirnar...”
“Prísaður veri Tú, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum Mest Mikla Navni...”
“Prísaður veri Tú, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við Tínum Mest Mikla Navni, sum Hann...”
“Prísaður veri Tú, O Harri mín Guð! Hvørja ferð eg royni...”
“Prísaður veri Tú, O Harri mín Guð! Náðiliga gev, at hesin...”

“Prís veri Tær, O Harri. Fyrigev okkum okkara syndir...”
“Prís veri Tær, O Harri mín Guð! Eg bøni Teg við hesari Opinbering...”
“Prís veri Tær, O Harri mín Guð! Tú sært...”
“Sig: Guð er nøktandi fyri øllum...”
”Skapa í mær eitt reint hjarta, O mín Guð...”
”Styrk mína hond, O mín Guð, so at hon kann taka...”
”Tak ikki burtur, O Harri, tað veitsluborð...”
”Tann lovprísan, ið er degnað úr Tínum mest...”
”Tú sært meg, O mín Guð, niðurboygdan í...”
”Tú sært meg, O mín Harri, við mínum andliti...”
”Tú veitst fullvæl, O mín Guð, at sorgir...”
”Veit mær, O mín Guð, tað fulla mátið av Tínum kærleika...”
”Øll hátign og dýrd, O mín Guð...”
“Øll lovprísan, O mín Guð, veri Tær sum...”